Síða 6

# FF bladið

BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 376 Hósdagur 21. september 2006 15,-



## Heini Olsen: Hugleiðingar um SEV




P/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 311909 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo

Síða 8

## Eitt 70 ára minni:

# “Pourquoi Pas” gekk burtur við 39 monnum






## Dupultmoralurin hjá Vinnuhúsinum:

# Tað, sum teir hava “gloymt”!

# “Ran” góðan túr á nýggjari leið



Síða 21

KÄRCHER



Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til ídnað.



Vit umvæla eisini

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42

# Aldur kalvi úr Hetlandi á marknaðin

Baksíðan

**FF blaðið**
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

**FF-blaðið:** Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
**Útgevari:** Føroya Fiskimannafelag

**Blaðstjóri:** Óli Jacobsen
**Layout:** Føroya Fiskimannafelag
**Prenttilgerð:** Føroya Fiskimannafelag
**Prent:** Prentmiðstøðin

**Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin**

**- kemur út annanhvønn hósdag**




P/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 311909 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo

# Frágreiðingin komin frá Ben-Yami



Sum kunnugt høvdu vit í summar vitjan av Menakhem Ben Yami, sum vegna fiskiveiðufeløgini mettu um fiskastovnar og fiskifrøðiliga ráðgeving í Føroyum.

Í blaði nr. 371 høvdu vit hansara fyribils niðurstøðu, har hann m.a. mælti frá at skerja línuveiðuna við teirri grundgeving, at tað var betri fyri toskin at fiska ta hýsu, sum er høvuðsveiðan við línu.

Nú er ein endalig frágreiðing komin frá Ben-Yami, og hon telur heilar 25 síður, har hann væl og virðiliga lýsir sínar niðurstøður. Í samband við ta aktuellu kanningina av Fiskirannsóknarstovuni, sum Hjalti hevur biðið um, heldur Ben Yami, at tað er einki galið við dugnaskapinum hjá teimum, sum arbeiða á FRS. Heldur er tað arbeiðshátturin, sum er ov avmarkaður.

Vit hava lagt frágreiðingina inn á okkara heimasíðu. Vit fara nú at fáa hana týdda til føroyskt, og tá hetta er gjørt, verður føroyska týðingin eisini løgd inn.

Ben Yami er ein av fremstu fiskiveiðuserfrøðingum. M.a. hevur hann arbeitt fyri FAO, sum er matvørustovnurin hjá ST. Hann hevur búð í 7 londum og hann hevur ferðast í 50 londum í fiskivinnuørindum. Hann veit, hvat hann tosar um!



## KT-VERKÆTLANARLEIÐARI

**Vit leita eftir royndum og framfýsnum verkætlanarleiðara til kt-øki bankans**

**Arbeiðsøki**
Sum verkætlanarleiðari skalt tú:

- Vera við í og leiða verkætlanarbólkar
- Samráðast og gera avtalur á økinum
- Gera sáttmálar, ætlanir og veitanarlýsingar
- Fylgja upp og tryggja, at verkætlanir røkka ásettum málum
- Tryggja eina hóskandi kunning um verkætlanir í fyritøkuni

Vit leggja dent á dygdargott arbeiði, at evstamørk og figgjarætlanir halda – alt við eini skipaðari skjalfesting. Tað er tín ábyrgd at tryggja framdrift í uppgávuloysnum við einum jaligum og gevandi samstarvi við aðrar verkætlanarluttakarar.

Harumframt fert tú at nágreina viðkomandi virkisøkir og arbeiðsgongdir, ið hava týdning í verkætlanum.

Tú fert at arbeiða í einum toymi við dugnaligum og røskum starvsfeløgum, og vit vænta, at tú saman við teimum stuðlar uppundir at røkka handilsligum málsetningum sambært teim virðum, ið eyðkenna virksemi okkara.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú hevur:

- Viðkomandi útbúgving
- Royndir við kt-verkætlanarleiðslu
- Praktiskar royndir við menningarætlanum, kravfestingum og broytingarleiðslu
- Kunnleika til góðskustýring og váðastýring
- Tekniskan førleika

Vit leggja dent á, at tú ert fyrikomandi, ágrýtin og uppsøkjandi, og at tú megnar at hugsa og arbeiða sjálvstøðugt.

**Løn og setanarviðurskifti**
Verða ásett eftir avtalu, alt eftir útbúgving og royndum.

**Umsókn**
Send eina umsókn við livrensli til: Føroya Banki, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn, att: Bjarki Mohr, ella við telduposti til: starvsfolk@foroyabanki.fo innan 6. oktober 2006.

**Meira kunning**
Hevur starvið tín áhuga, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Inga Vestergaard, leiðara á KT-økinum, á tlf. 31 13 50 ella ingi.vestergaard@foroyabanki.fo, ella Bjarka Mohr, tlf. 31 99 37 ella á telduposti bjarki.mohr@foroyabanki.fo

FØROYA BANKI
100 ár – yngri enn nakrantíð

Fiskimálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING

## FISKIVINNUROYNDIR 2007
### LÝSING EFTIR UMSÓKNUM

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar gransking og menning innan fiskivinnu:

Verkætlanir innan fylgjandi høvuðsøki hava fyrimun:

- Fiskiskapur við ábyrgd
- Royndarveiða, framleiðsla og søla
- Virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
- Heilsa, trygd og umhvørvi

Innanfyri høvuðsøkini verður lagdur dentur á at fáa verkætlanir, sum kunnu:

- Lýsa og loysa praktiskar trupulleikar at fáa alla veiðu til høldar (fisk, livur, rogn innvølir vm.)

Serligur dentur verður lagdur á, at

- vinnan tekur lut í verkætlanini
- eginfigging ella onnur figging er verulig
- samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum og/ella uttanlands.

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Víst verður á, at møguleiki er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir.

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi **mánadagin 16. okt. 2006 kl. 12.00.**

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins figgjarlóg fyri 2007.

Jákup Mørkøre, samskipari
tlf.: 35 30 30 / 35 32 48
fartel.: 21 73 69
t-post: jakupmo@fisk.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347, Heykavegur 6
FO-110 Tórshavn

FF-blaðið
Gerst haldari fyri bert kr. 250,- um árið
tlf. 31 15 69
ff-blad@post.olivant.fo

# Livur og rogn: Nei til pískin!

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt fram á ting uppskot um, at stigvíst skal verða álagt øllum skipum at taka alt, sum eitur rogn og livur til lands. Hetta er sjálvsagt eitt mál, sum vit taka undir við. Men tað er kortini ikki so einfalt, at hetta kann gerast bert við einum lógaruppskoti.

Hetta mál er nú til viðgerðar í vinnunevndini hjá løgtinginum. FF hevur fingið uppskotið til ummælis og hevur sent Vinnunevndini hesa viðmerking:

Vit mæla avgjørt frá at samtykkja hetta uppskot. Tað er eingin grund til at halda, at eitt slíkt uppskot loysir trupulleikarnar á hesum øki.

Vit hava fleiri ferðir havt tilmæli um, hvussu tað politiskt kann verða eggjað monnum at taka livur og rogn.

Annars vita vit eisini, at tað verður arbeitt við tøkni, sum ger tað lættari at skilja livur og rogn frá slógnum annars. Hetta arbeiðið eigur at verða stuðlað frá almennari síðu, so tað kann komast skjótari á mál.

Skipaeftirlitið

FAROESE MARITIME AUTHORITY
*MINISTRY OF FISHERY AND MARITIME AFFAIRS*

## Skipaeftirlitsfólk og løgfrøðingur

Til tess at optimera raksturin av manningareindini á Skipaeftirlitinum, verður søkt eftir tveimum starvsfólkum, einum skipaeftirlitsfólki og einum løgfrøðingi

Skipaeftirlitsfólk:
Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

Starvið inniber í høvuðsheitum. hesar upppgávur:

- Umsiting og málsviðgerð av lóggávu, ið knýtir seg at manningarviðurskiftum, undir hesum:
  - at fyrireika manningarskjøl til fiskiskip, farmaskip og ferðamannaskip
  - at hava umsjón við mynstringum og viðurskiftum, sum knýta seg at mynstring sum t.d. at føroyskir sjómenn lúka krøvini til førleika á skipunum teir sigla við
  - málsviðgerð av vinnubrøvum, undir hesum málsviðgerð av vinnubrøvum hjá útlendskum sjómonnum, sum sigla við føroyskum skipum
  - luttaka í fyrireikingararbeiðið til lógarsmíð
  - at hava eftirlit og umsita viðurskiftini, sum eru staðfest í STCW konventiónini og ILO konventiónum, ið knýta seg at manningarviðurskiftum á skipum
  - samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar.

FØRLEIKAKRØV:
Hann ið settur verður, má hava áhuga í og førleika til væl og virðiliga at gera seg kunnugan við við løgfrøði og tær fyriskipanir, ið knýta seg at manningarviðurskiftum og skiparakstri annars.

Til starvið krevst viðkomandi útbúgving sum t.d.:

- skipsførari
- maskinmeistari
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- telduførleiki á brúkarastøði
- at arbeiða við verkætlanum
- góð samstarvsevni

Harumframt er kunnleiki til góðskustýring (kvalitetsstýring) ein fyrimunur.

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki.

Løgfrøðingur:
Starvið inniber í høvuðsheitum. hesar upppgávur:

- umsiting og lógarsmíð av lóggávu, ið knýtir seg at manningarviðurskiftum, og tryggja at føroysk lóggáva til eina og hvørja tíð lýkur ásetingarnar í galdandi altjóða konventiónum
  - tulking av altjóða sáttmálum
  - taka sær av fyrisitingarligum og løgfrøðiligum málum á Skipaeftirlitinum
  - viðgerð av kærum
  - umsiting av avtalum við aðrar flaggstatir
  - luttaka í fyrireikingararbeiði til Fráboðanir frá Skipaeftirlitinum
  - hava eftirlit við- og umsita viðurskiftini, sum eru staðfest í STCW konventiónini, ILO konventiónum og øðrum konventiónum, ið knýta seg at manningarviðurskiftum á skipum
  - samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar.

FØRLEIKAKRØV:
Hann ið settur verður, skal hava løgfrøðiligt embætisprógv.

Harumframt má viðkomandi persónur hava áhuga til væl og virðiliga at gera seg kunnugan við við tær fyriskipanir, ið knýta seg at skiparakstri undir hesum serliga manningarviðurskiftum

- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- telduførleiki á brúkarastøði
- góð samstarvsevni

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki

SETANARTREYTIR:
Skipaeftirlitisfólkið verður lønt í lønarflokki 8 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starsvsmannafelagið. Aftrat lønini verða veittar kr. 3000,- um mánaðin, sum viðbót fyri 35 tímar álagda yvirtíð triðja hvønn mánaða.

Løgfrøðingurin verður løntur sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelagið (BLF).

Fyri bæði størvini er galdandi at setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

UMSÓKNIR:
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 29. september 2006, kl. 14.30.

Umsóknir skulu sendast til:
**Skipaeftirlitið · Postmoga 26 · 370 Miðvágur**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.

# Vinnuhúsið og sjófólk

Í seinasta blaðnum var tað av tíðarorsøkum avmarkað, hvussu nógv vit kundu svara til sjónarmiðini hjá Vinnuhúsinum um at avtaka skattaskipanina og inntøkutrygdina hjá fiskimonnum.

Vit eru ikki ræddir fyri at taka hendan spurning upp. Vit vilja í hesi grein fyrst endurtaka tað, sum Vinnuhúsið hevur sagt. Síðan vilja vit endurtaka tað, sum Búskaparráðið førdi fram í 2004 um sama evni, og tað er lætt at síggja, at hjá vinnuhúsinum er talan um ekkó av búskaparráðnum.

Síðan vilja vit endurtaka tær viðmerkingar, sum vit høvdu til hesi somu sjónarmiðini hjá búskaparráðnum, og sum teir ikki svaraðu aftur, hóast teir høvdu givið tilsøgn um tað.

### Vinnuhúsið sigur í dag:

**2.1.2 Skattalættin til sjófólk**

Skattalættin til sjófólk varð settur í verk, tí politiski myndugleikin metti, at føroysk sjófólk fóru at búseta seg í øðrum londum, um ikki skattalætti varð givin.

Skattalættin var 15% av hýruni upp til 500.000 krónur, men er lækkaður til 14%. Niðanfyri er talva fyri, hvussu nógvur frádráttur talan er um, og hvussu nógv tað almenna missir í skattainntøkum.

Skattafrádrátturin er galdandi fyri føroysk sjófólk við føroyskum skipi og útlendskum skipi. Frádrátturin hesi fýra árini hevur verið millum 133 og 156 milliónir krónur um ári, og ein missur í skattainntøkum millum 60 og 74 milliónir krónur um ári.

Skattalættin skeiklar kappingina um hendan partin av arbeiðsmegini, tí aðrar vinnur skulu gjalda munin fyri at tekkjast sjófólki. Eisini kann hugsast, at skattalættin til sjófólk trýstir lønarlagi í øðrum vinnum upp.

Skattalættin eggjar fleiri føroyingar enn annars til skips, sjálvt um teir ikki eru eins produktivir har, sum teir høvdu verið í øðrum vinnum. Skattalættin merkir eisini, at fiskivinnan fær arbeiðsmegina bíligari enn annars, og sostatt verður kapitalurin avlønaður betri, enn hann eigur. Ov nógv starvsfólk og kapitalur er tí í hesari vinnuni, og virðisøking fer fyri skeyti.

**2.1.4 Tilmæli**

Strategibólkurin mælir til, at frí og virkin kapping verður um arbeiðsmegina. Mælt verður tí til, at omanfyrinevndu serviðgerðir verða beindar av vegnum.

Best var, um tær vóru burturbeindar í morgin, men fyri at vinnan og arbeiðsmegin skal hava tíð og møguleika til at tillaga seg broyttu umstøðurnar, verður tilmælt eitt áramál á trý ár, har hesar serviðgerðir so líðandi vera beindar av vegnum.

Hendan upphædd kann ístaðin vera javnt luta út til allar føroyingar sum skattalætti, og sum vil stimbra fyritakssemið uttan mun til vinnutilknýti.

### Búskaparráðið segði í 2004

*Við serskipanini fyri sjómenn skeiklar tað almenna kappingina millum ymsu vinnurnar í Føroyum um arbeiðsmegi soleiðis, at býtið av arbeiðsmegini millum vinnurnar verður eitt annað, enn marknaðaravkastið í teim ymsu vinnunum gevur grundarlag fyri. Serligi skattalættin til sjómenn ger nátúrliga munin í lønini eftir skatt millum sjómenn og flest allar aðrar arbeiðstakarar ónatúrliga stóran. Hetta ger, at meira arbeiðsmegi enn annars leitar yvir móti fiskiskapi.* ***Yvir tíð vil hetta gera, at lønin í fiskiskapi áðrenn skatt verður lægri, enn hon annars hevði verið. Ónatúrliga stóra útboðið av arbeiðsmegi í fiskiskapi vil sostatt gera, at arbeiðsgevararnir í fiskivinnuni sleppa bíligari og tí umbiða meira arbeiðsmegi, enn teir annars høvdu gjørt.***

Sum tað sæst eru sjónarmiðini stórt sæð tey somu.

### Okkara sjónarmið

Til hesi sjónarmiðini førdu vit fram fylgjandi viðmerkingar í 2004, og tær eru eins væl galdandi í dag:

Tá tað verður sagt, at fiskimannaskatturin, sum fráliður, fer at gera tað, at reiðararnir fáa bíligari arbeiðsmegi, so er einki grundarlag fyri hesum pástandi, sum heldur ikki verður undirbygdur á nakran hátt. Hetta kundi teoretiskt verið rætt, um fiskimenn fingu tíðarløn, t.d. mánaðarløn sum starvsfólk, og tað skuldi verið samráðast um eina slíka annaðhvørt ár. Tá kundi skattaskipanin ávirkað lønarkrøvini. Men royndirnar seinastu tíðina hava tó víst, at evt. skattasømdir onga generella ávirkan hava á lønarkrøv.

Men fiskimenn fáa jú ein prosentpart av veiðini, sum vanliga er støðugur ár eftir ár. Og so leingi hesin verður fasthildin, er ikki grundarlag fyri umrødda sjónarmiði. Í veruleikanum er parturin hjá fiskimonnum øktur, síðan fiskimannaskatturin var settur í verk, og tekur tað eisini grundarlagið undan umrøddu grundgeving.

Fortreytin fyri hesi fortreyt er tískil, at manningarfeløgini skuldu góðkent at fari niður í prosentparti við skattingini sum grundarlag. Tað finnist ikki skuggi av grundarlagi fyri hesum sjónarmiði, og hetta er í hvussu er eitt øki, har vit meta okkum at hava størri serkunnleika enn búskaparráðið. Gongdin síðani 1998 hevur víst tað øvugta, nevniliga at reiðararnir í sáttmála hava góðkent at gjalda eftirlønargjald av sínum parti, og tessvegna er tann prosentparturin av veiðuni, sum skal gjaldast av reiðarum til fiskimenn, øktur. Og tað er so avgjørt einki, sum bendir á, at hetta heldur fer at henda í framtíðini.

Tað finst heldur einki søguligt grundarlag fyri hesi grundgeving. Vit hava fyrr havt fiskimannafrádrátt, nevniliga frá 1963 til 1984, og tað hevur ikki verið grett, at hetta skal hava ført til bíligari arbeiðsmegi enn annars. Tá frádrátturin datt burtur, hendi heldur ikki tað mótsatta av hesi orsøk.

Grundað á hesa skeivu niðurstøðu verður komið til eina aðra skeiva niðurstøðu. Nevniliga, at við bíligari arbeiðsmegi fáa reiðararnir áhuga fyri at seta fleiri fiskimenn í starv enn neyðugt, og hetta minkar tískil um tøku arbeiðsmegina í øðrum vinnugreinum. Hetta sjónarmið er eisini prógv um eina grundleggjandi manglandi vitan um lønarskipanina við fiskiskipum. Tá reiðarar kortini gjalda sama prosentpart - uttan mun til manningartal - er tað als ikki í teirra áhuga at seta fleiri fólk, og tað hevur heldur ikki verið gjørt. Afturat tí eru tað als ikki arbeiðsgevararnir sum seta fólkið, men tað er skiparin. Skipanin virkar á tann hátt, at skiparin, og fyri so vítt manningin, hevur áhuga í at hava fægst møguligar mans við, tí meira verður tá í inntøku uttan mun til skatt ella ikki. Tí er manningin altíð tillagað tað arbeiði sum skal gerast. (Her skal skoytast uppí, at júst støðan hjá línubátum í 2006, har tað er trupult at manna skipini, váttar okkara sjónarmið).

Tí er heldur ikki grundarlag fyri pástandinum um, at skattaskipanini skal hava ta umrøddu avlaging av arbeiðsmegini sum avleiðing.

Fyri okkum sær tað út sum, at Búskaparráðið hevur lagað grundgevingarnar til niðurstøðuna í málinum heldur enn til tað mótsatta. Hetta meta vit at vera eitt álvarsmál, sum eisini skaðar trúvirðið hjá Búskaparráðnum.

Vit góðkenna heldur ikki hesa mannagongd. Vit eru altíð til reiðar at hava orðaskifti um eitt mál sum hetta, og vit góðkenna til fulnar, at onnur hava eina aðra hugsan enn vit á hesum øki. Men hetta orðaskifti skal vera grundað á facts, og hetta er ikki minst galdandi fyri búskaparráðið, har almenninngurin má hava grund til at halda, at framløgurnar eru sakliga grundaðar.

Her kann verða skoytt uppí, at búskaparráðið lovaði alment, at fiskimannafelagið skuldi fáa svar uppá hesi sjónarmið. Hetta svar kom ongantíð!

| Frádráttur | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Føroysk skip | 139.621.975 | 145.743.595 | 132.333.378 | 122.296.353 |
| Útlendsk skip | 7.256.020 | 9.866.095 | 10.149.819 | 10.540.326 |
| Kostnaður | 70.729.000 | 73.516.000 | 66.092.000 | 60.263.000 |

*Talva 4. Skattafrádráttur hjá sjófólki*

*Kelda: Fíggjarmálaráðið*

### Vit vilja skoyta uppí í 2006 um skattaskipanina

Fyrst í samband við skattaskipanina. Ein grundgeving fyri hana var at fáa føroyingar við útlendskum skipum framvegis at búgva í Føroyum, so teir harvið komu at dugna føroyska samfelagnum. M.a. við at teirra familjur blivu verandi og útvegaðu samfelagnum aftur aðrar inntøkur hjá øðrum húsfólkum.

Tað hevur verið pástaðið, at einki er komið komið burtur úr á hesum økinum. Men tað siga tey tøl, sum eru lýst í framløguni hjá vinnuhúsinum ikki.

Her síggja vit, at skattafrádráttur hjá sjófólki við útlendskum skipum er hækkandi bæði í upphædd og í prosentum í mun til samlaða frádráttin. Sum tað sæst í talvuni er krónutalið hækkað úr 7,3 mill í 2001 til 10,5 mill í 2004 ella ein hækking uppá 43,8%.

Verður prosenttalið, sum inntøkan við útlendskum skipum er í mun til samlaða frádráttin, er hækkingin tilsamans 61%. Hetta er avgjørt ein ábending um, at henda skattaskipan hevur týdning fyri at fólk sjófólk at búgva í Føroyum. Vit kundu eisini í síni tíð greiða frá, at 7 av 9 føroyingum við donskum kraftblokkaskipi vóru fluttir heima aftur takkað veri hesi skipan. Uttan iva hevði ein partur av teimum nevndu sjófólkunum í hagtølunum framvegis verið í Føroyum, um eingin skipan hevði verið. Men tá høvdu heilt avgjørt aðrar fiskimenn verið farnir. Vit kunnu gera eitt roknistykki, sum er grundað á, at hesi bæði fyrivarni uppheva hvørt annað. Vit rokna tískil við, at fiskimenn við útlendskum skipum, sum annars høvdu flutt av landinum, hava "kostað" landskassanum 10,5 mill í 2004. Hetta svarar til eina lønarinntøku uppá 70 mill. kr, sum vit tá høvdu mist. Av hesum meira meira enn 20 mill verið goldnar í beinleiðis skatti. Umframt hetta hevði landskassin fingið inntøku, sum t.d. MVG og oljugjald v.m., av húsarhaldinum hjá viðkomandi. Nakrir hava eisini konu við inntøku, sum eisini geva av sær í landskassan.

Tí er roknistykkið als ikki so einfalt, har tað verður gjørt til, at bert vit strika hesa skipan, so koma allar tær útroknaðu milliónirnar bóltandi inn í landskassan.

Tað ber so til at halda, at tað kann gera tað sama um hesi sjófólk búgva í Føroyum ella ikki. Koma so sjófólk at resta í, kunnu vit bert innflyta útlendingar. Hetta ljóðar sum ein vittigheit.

Tað er so politikkurin her í Føroyum, at vit skulu gera tað sum gerast kann, m.a. við skattaskipanina, til at eggja fólki at vera búgvandi í Føroyum. Vit eru nøkur, sum taka undir við tí. Eisini tí at tað loysir seg fyri samfelagið, bæði so og so.

Tá er tað ov lítið við nøkrum leysum pástandum um at henda skipan er "skaðilig".

## Tjóðveldisuppskotið um vinnuligan fiskiskap ivasamt

Fiskimannafelagið hevur fingið til ummælis uppskotið til vinnuligan fiskiskap, sum tjóðveldisflokkurin legði fram herfyri. Í hesum uppskoti er uttan iva tiltrongd nýhugsan, men vit halda, at tað í avgerandi spurningum verður farið í so langt.

Viðmerkingin vit hava sent vinnunevndini er henda:

"Vit hava viðgjørt aktuella málið um vinnuligan fiskiskap í nógvum greinum í FF-blaðnum, tann seinasta í blaði nr. 372, sum sæst sum pdf-fílur á okkara heimasíðu.

Her er okkara støða, at vit meta tað vera skeivt, at óbrúkt veiðurættindi kunnu umsetast til nógvar pengar. Men hinvegin eru vit ímóti eyka gjøldum á loypandi fiskiskap. Vit meta uppskotið at innibera hetta.

Hetta vil eisini, soleiðis sum vit síggja tað, viðføra ótryggleika í starvssetan hjá fiskimonnum, tá fiskiloyvini bert eru fyri avmarkað tíðarskeið.

Uppskot, sum er bygt á hesar fortreytir, kunnu vit ikki taka undir við".

# Inntøkutrygd og strategibólkar

**Í samband við uppskotini um at avtaka inntøkutrygd hjá fiskimonnum, fara vit at lýsa hetta mál eitt sindur nærri. Sum vit hava greitt frá aðra staðni í blaðnum er alt, sum bendir á, at strategibólkurin hjá løgmanni hevur kopierað tilmælið hjá Vinnuhúsinum á hesum øki. Hetta er gjørt uttan minstu ítøkiligu grundgeving. Hinvegin hevur Vinnuhúsið grundgevingar, og vit endurgeva her tað, sum Vinnuhúsið sigur í sínum tilmæli. Sagt verður:**

Útgjald til minstaløn, minstaforvinning og dagstudning

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| Minstaløn | 1.367.000 | 3.410.000 | 1.365.000 | 6.214.000 | 4.120.000 |
| Dagstudningur | 9.498.000 | 11.116.000 | 12.893.000 | 20.340.000 | 14.305.000 |
| Minstiforvinningur | 10.437.000 | 8.341.000 | 11.158.000 | 11.422.000 | 8.754.000 |

Kelda: Lønjavningargrunnurin

### Minstaløn og minstiforvinningur

Minstaløn og minstiforvinningur eru ásett við tí endamáli at geva sjófólki eina inntøkutrygd, tí hýran er ásett eftir veiðu og prísum, sum merkir, at hon kann vera óstøðug. Talvan vísir útgjaldið frá 2001 til 2005.

Minstaløn, dagstudningur og minstiforvinningur gav eitt samlað útgjald í 2004 á 38 mió. kr. Gjaldið er hækkað á hvørjum ári, tó í 2005 lækkaði tað við 11 milliónum.

Stuðulin, sum er nevndur omanfyri, er til at fasthalda ov mangar føroyingar í fiskivinnuni, sum høvdu gjørt størri gagn aðrastaðni í samfelagnum, um hesin studningur varð burturtikin. Hann skerjir frælsið at velja hjá føroyinginum og er við til, at ov mangir sjómenn skapa ov smá virðir. Stuðulin minkar eisini um kappingina millum vælrikin og minni vælrikin reiðarí - minni vælrikin reiðarí, sum uttan stuðul høvdu horvið, tí tey ikki høvdu megnað at skaffa sær arbeiðsmegi.

## Okkara viðmerkingar

### Manipulatión við tølum

Fyrst vilja vit gera ta viðmerking, at hesi tølini hjá Vinnuhúsinum geva ikki eina fulla lýsing av gongdini í útreiðslunum til inntøkutrygd ella yvirhøvur stuðul til fiskiflotan. Tað er nærum tvørturímóti, tá sagt verður, at útreiðslurnar eru hækkaðar hvørt ár. Tað valdast sanniliga, hvørji ár teir hava valt sær. Men at nýta 2001 sum grundarlag fyri hesum pástandi er rein manipulatión.

Fara vit aftur til 1980, høvdu vit tá ein planøkonomi, sum fyri ein stóran part var grundaður á stuðul, og kreppuárini seinast í 1980-unum vóru samlaðu veitingarnar til fiskivinnuna fleiri hundrað milliónir krónur.

Hetta var eitt óføri, sum vit vóru komin í, og tað var vinnan sjálv, sum vísti veg burtur úr tí. Nevniliga við uppskoti um at fáa marknaðarbúskap í flakavinnuni á landi. Tað fyrsta ítøkiliga uppskot á hesum økinum varð samtykt á tingi í 1988, og var hetta byrjanin til ein búskaparligt undur, sum fullkomiliga broytti "studningstørvin", sum vit fyrr hava greitt frá. Hetta uppskot var orðað av Føroya Fiskimannafelag. Tað kann verða nevnt her, at í fyrsta umfari vóru flakavirkini hart ímóti eini og hvørji broyting mótvegis marknaðarbúskapi, og tað vóru vit, sum máttu hála flakavirkinki aftaná okkum. Tá tey vóru komin á "rættkjøl", vóru tey eisini av fullum huga við uppá hesa nýggju skipan.

Samstundis hava vit verið við til at tillaga lóggávuna um inntøkutrygd, og hetta hevur eisini givið úrslit.

Gongdin í minstuløn, dagstudningi og minstaforvinningin síðan 1993 kann lýsast við hesum tølum:

1993 ...............75 mill
1994 ...............85 -
1995 ...............86 -
1996 ...............71 -
1997 ...............72 -
1998 ...............34 -
1999 ...............30 -
2000 ...............23 -
2001 ...............21 -
2002 ...............22 -
2003 ...............25 -
2004 ...............37 -
2005 ...............27 -

Sum tað sæst á hesum tølum, hevur talan verið um eitt sera stórt fall í útreiðslunum til inntøkutrygd. Frá at liggja um 70-75 mill, árliga er upphæddin farin niður í 20-30 mill. Verður hugsað um lønargongdina í samfelagnum, er niðurskurðurin enn størri. Annars kemur helvtin aftur í landskassan, so hansara útreiðslur á hesum øki eru minimalar, og kunnu ikki vera nøkur hóttan móti nøkrum sum helst. Tískil er gongdin beint tann mótsetta enn tann, sum Vinnuhúsið sigur hana hava verið.

Hetta skuldi verið ein gongd, sum Vinnuhúsið skuldi fegnast um, men so tykist ikki at vera. Tað er ikki nóg mikið, at útreiðslurnar eru farnar niður við 2/3, um bert verður hugt at hesum økinum. Tað er heldur ikki nóg mikið, at játtanin til fiskivinnuna er farin niður við 90%, um hugt verður eftir samlaðu tølunum síðan 1980-ini.

### Søktar grundgevingar

Tær endurgivnu grundgevingarnar eru eisini sera søktar, og eru merktar av, at fyrst er niðurstøðan gjørd - fyri síðan finna grundgevingarnar. Tær virka esini sera forhánisligar móti fiskimonnum, tá sagt verður, at "ov mangir sjómenn skapa ov smá virðir".

Grundgevingarnar eru stórt sæð tær somu, sum Búskaparráðið nýtti í 2004, og sum eisini vóru grundarlagið fyri tey tíðindini í danska TV2 um hesi mál, sum teir máttu taka aftur.

Annars vilja vit siga, at tað er púra einki grundarlag fyri at halda, at inntøkutrygdin er avgerandi fyri áhugan hjá fólki at sigla. Tá minstalønin kom á fyrsta sinni, vóru summi ímóti teirri grundgeving, at nú fóru menn ikki at tíma at standa við snørið longur, tá inntøkan kortini var trygg. Tað vísti seg beinanvegin, at hesum var púra einki grundarlag fyri.

Allar royndir vísa, at er nóg mikið av arbeiði á landi, so vilja teir allarflestu taka hetta fram um at vera til fiskiskap við minstuløn. Inntøkutrygdin er kortini ikki meira enn ein vanlig dagløn við 8 tímar á landi. Fyri tað fara menn ikki at fara burtur frá konu, børnum og annars allar teimum hentleikum, sum eru á landi.

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

Pf. Petur Larsen

Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

Vit hava útgerðina



Flótitrol
Snurpunótir
Botntrol
Aliútgerð
Rækjutrol
Annað

VÓNIN

Høvuðsskrivstova:
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 474 200
Telefax 474 201

Tórshavn:
Vestara bryggja 12
100 Tórshavn
Telefon 35 43 91
Telefax 31 33 19

info@vonin.com - www.vonin.com

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi, langabbi og oldurabbi okkara

Petur Danielsen
vanliga nevndur Petur á Hvítanesi

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til. Tøkk til talarar, sangarar og spælarar. Eisini ein tøkk til starvsfólki á Sambýlinum Oman Hoydalar.

Tøkk fyri minnisgávur til Føroya Blindastovn. Tøkk til tykkum, sum sendu blómur og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her.

*Vegna tey avvarðandi*
*Signhild*

# Føroyavinurin Poul Kjeldgård farin

**Heini Olsen er framúr frásøgumaður, sum okkara lesarar eisini havt sæð við teimum frásagnum hann hevur havt her í blaðnum. Í samband við minngarorð um Poul Kjeldgård lýsir hann á ein stuttligan hátt fyrstu tíðina hjá SEV.**



**Tekstur og myndir**
*Heini Olsen*

Tá eg í danska tíðarritinum Ingeniøren nr. 17 frá 28. apríl 2006 læs, at Poul Kjeldgård civilverkfrøðingur, var deyður 30. mars í ár, fimm dagar áðrenn hann røkk teimum 82, runnu gamlar hendingar fram fyri meg, sum eg her skal royna at siga frá.

Kjeldgård var ein av teknisku stuðlunum undir SEV-arbeiðinum og gloymdi ongantíð bygdina, har hann arbeiddi og fólkið, ið har búði tey árini. Fyrraárið støkk hann soleiðis ein dagin inn á gólvið heima hjá okkum við einum forkunnugum myndasavni úr SEV-arbeiðinum, sum eg fekk loyvi og hjálp til at fáa skannað inn á føroyska teldu.

Hugsaði, tá eg sá hann aftur, at so lítið hann var eldur, kundi hann lættliga røkka teimum hundrað; men so skuldi ikki verða.

Eg haldi besta mátan at minnast skilamannin Kjeldgård vera við at sýna onkra av myndum hansara og samstundis draga fram hendinga brot úr vanliga arbeiðsdegnum, sum hann kundi hátta seg í SEV-arbeiðinum fyri meira enn hálvari øld síðani.

Um sjálvan mannin, Poul Anker Kjeldgård, er í stuttum at siga, at hann varð borin í heim 4. apríl 1924 í Kjellerup, Danmark, sonur lærarahjúnini Kristen Bisgård Kjeldgård og Dagmar Pedersen Badstue. 1942 studentsprógv í Viborg. 1948 kand. B DtH. 1949-51 Søllerød Kommune. 1951-61 Højgaard & Schultz. 1958 g.v. Bente Jensen lærarinnu, dóttir Knud Jensen og Ruth Ottesen,Thisted.

Frá 1961 til fráfaringaraldur arbeiddi hann hjá Thisted amts vej- og vandløbsvæsen.

### SEV seksti og onnur minnilig árstøl

Í ár eru 100 ár liðin síðan Ólavur á Heygum av sínum eintingum legði telefonlinju úr Havn til Vestmanna - tlf. nr. 1 er á garðinum enn - og 100 ár síðani hann fekk Føroya Banka settan á stovn.

Eisini eru 100 ár liðin, síðani hann fyrireikaði fyrstu royndina at vinna elorku burtur úr vatninum í Fossá, 70 ár síðan bróðursonur hansara, Harry Fonsdal, á lærda háskúlanum í Tróndheimi gjørdi sína serritgerð um somu orku, 60 ár síðan SEV varð stovnað, og loksins eru 52 ár liðin, síðan dreymur Óla'bónda gjørdist veruleiki, tá ljósið varð tendrað.

Nú vit nevna árstøl í Føroya undirkervi, kann leggjast afturat, at 40 ár longu eru liðin, síðan lítla bygdin Tjørnuvík og høvuðstaður okkara Tórshavn sama árið fingu vegasamband við umheimin.

1. oktober komandi eru 60 ár runnin, síðan fólkaognin, kommunusamtakið SEV, varð stovnað og 55 ár síðan, farið varð undir sjálva byggingina inni á Fjørð í Vestmanna og vegur lagdur úr gamla traðarvegnum niðan gjøgnum Fossdal fram á Skot og Glinsból, fram til fyrstu byrgingina á Lómundaroyri og til ta næstu frammi á Vatni.

### Mikkjal Helmsdal uppi í leikinum

Poul Kjeldgård fekk løn sína goldna frá SEV, men minnist meg rætt, fekk eg mína frá Føroya Løgtingi, sum við Mikkjali Helmsdal, landsverkfrøðingi, hevði tekniska yvireftirlitið við Sev-byggingini, ið fremjast skuldi eftir upprunaprosjektinum hjá Harry Fonsdal.

Vegna misskiltar sparingar var okkurt í prosjektinum broytt frá aðrari síðu, eitt nú lægri byrgingar og veikari mastrar, sum í báðum førum kom okkum aftur um brekku; men tað høvdu vit á arbeiðsplássinum einki frætt um og høvdu einki við at gera.

Mikkjal, sum tá bert hevði sitið 3-4 ár í sessinum, hevði úr at gera og fekk tí loyvi at seta danska verkfrøðingin Palle Filholm sum dagligan eftirlitsmann, og skuldu vit arbeiða saman. Dugnaligi Palle Filholm giftist Sonju, dóttir svian Albin Åkesen og Mathildu Mortensen í Trongisvági, og er tað sonur teirra, Bjarni, sum hevur skrivað um *Smyrlarnar*.



*Vegagerð oman fyri Glinsból*



*Onnur hugnaløta í gomlu sethúsunum hjá Kongaliga Monopolhandlinum á Fitjunum, sum SEV keypti og síðani hevur hildið.*
***Sitandi frá vinstru:*** *Poul Kjeldgård, Højgaard & Schultz, Chr. Eli Lamhauge hjá føroyska byggifelagnum Lamhauge og Waagstein, Carl Jespersen, bókhaldari, H&S. Fýra ár seinni hitti eg Jespersen aftur sum høvuðsbókhaldara hjá KAMPSAX í Teheran. Fyri endan situr Herluf Ernst, byggileiðari hjá H&S. Honum undir lið situr svenski formaðurin Gerdin, H&S.*
***Standandi frá vinstru:*** *Nielsen høvuðsformaður;H&S og Palle Filholm, Landsverkfrøðingurin. Triðja mannin kenni eg ikki aftur.*

### Fyrstu SEV-arbeiðini

Vit báðir Kjeldgård, sum hann í Vestmanna varð nevndur, hittust undir SEV-arbeiðinum í 1952, har vit hvør sær mátaðu hæddina frá hægstu flóð og fram til tunnunilsinntakið á Lómundaroyri og upp til heimara tunnilsmunna. Eisini settu og hildu vit hvør sær kósina inni í tí 1200 metrar langa vatntunlinum av Lómundaroyri og heim undir Ennið, har vatnið úr tunlinum varð leitt í rørini oman til fyrsta vatnorkuverkið, sum bygt varð hjá SEV.

Tá nivelleringin var liðug, var munurin 30 centimetrar okkara millum, og hildu vit tað í 220 metra hæddarmuni vera á góðari leið; men svenski tunnilsformaðurin Gerdin helt tað vera alt ov nógv "derfor at tretti centimeters fel er like forbandet mycke, om det så er i gamla Sveden eller langt fa'n ute i Atlanterhavet!" sum hann málbar seg.

Í FF-blaði nr. 263 havi eg áður sagt frá um, tá Gerdin steðgaði arbeiðinum av tí, at eg segði meg hava funnið silvurklumpin úr Kongsberg inni í SEV-tunlinum í Vestmanna.

Eisini var stuttligt at síggja øðina á Gerdin, tá alt fólkið knappliga hvarv, og at Gerdin, tá hann hevði fatað føroysku sið-



*Fitjarnar og Fjørðurin áðrenn SEV-arbeiðið byrjaði*



*Kjeldgård á rossabaki við SEV-skrivstovuna á Fitjunum.*

venjuna, var eina fyrstur í bát, næstu ferð grindaboðini vórðu rópt.

Jú, Gerdin var heiðursmaður av tí gamla, kanska heldur harðliga slagnum.

Kjeldgård var 28 ára gamal við sløkum fýra árum á baki sum verkfrøðingur. Eg var 22 ár og nýklaktur, hálvstuderaður røvari frá Bergen Tekniske Skole, so respektin fyri hinum um 60 ára gamla Gerdin var stór, og hildu vit tí best vera at nivellera umaftur.

Vit rættaðu nivellerinstrumentini, so frægt vit dugdu, skiftu um útgerð og so aftur at máta møtumikla brattleikan, og kom Kjeldgård tá næstan uppá centimetrina til mína fyrru hædd og eg somuleiðis tætt upp at hansara fyrru. Vit tóku síðani meðaltalið og samdust um at halda fast um tað, sama hvat Gerdin segði.

### Íspegil uppá spæl

Til tunnilskósina tryggjaðu vit okkum við innmátaðum trýhyrningum (polygonum) fjall av fjalli. Á fjallatoppunum varð stoypt kring stavin um ikki borast kundi beinleiðis í klettin at seta stavarnar í, og mátaðu vit hvør sær allar vinklarnar, roknaðu út og stungu út fyrstu kósirnar - onnur á Lómundaroyri og hin við tvørtunli miðskeiðis inn á megintunnilin fyri at styttri skuldi vera at fáa grótið út til knúsaran, sum farvegurin enn sæst eftir har frammi.

Inni í tunlinum vóru fleiri bend, og umframt vinklarnar skuldi longd og hall eisini passast, so har galt um at máta og rokna rætt. Hvønn einasta morgun samanbóru vit tað, sum vit kvøldið fyri høvdu eftirroknað okkum fram til.

Ein góðveðurs leygardag høvdu vit seinnapartin aftur hvør sær endurmátað allar vinklar av einslistum; men varð lítil svøvnur tað vikuskiftið, tí har var komin sperðil í av ringasta slag, sum ikki var til at finna, sama hvussu høvur vórðu løgd á blot. Telduroknari kom ikki til landið fyrr enn eini 15 ár seinni.

Mánamorgun hugdu vit spyrjandi hvør uppá annan og samdust um at ganga saman í felag, tí her mátti berast skjótt at, áðrenn Gerdin ella nakar annar fekk frænir av okkara gáloysni.

Vit so aftur til fjals við tungu teodolittunum, og til alla lukku fóru vit fyrst niðan í Fjallið vestan fyri Fossá, sum lá tunlinum næst. Tá vit komu til stavin, stóð hann loddrættur, sum hann átti, og tað við góðum bardunum, so har skuldi alt verið í lagi; men hann stóð í svørðinum og ikki í stoypta holinum. Vit so at leita og funnu gamla holið einar tveir, tríggjar metrar frá stavinum. Har hevði so onkur íspegil ætlað sær at spælt okkum eitt puss.

### Fyrsti SEV-tunnilin skotin ígjøgnum

Nú passaði alt aftur; men einki er yvir at dylja, at spenningurin vaks, so hvørt tunnilsarbeiðið nærkaðist endanum, og seinastu tíðina lá Kjeldgård flatur inn móti berginum og lurtaði, um nakað var at hoyra.

Gomlu vestmenningarnir gjørdu tað ikki betur við teirra viðmerkingum um, hvar vit mundu fara at enda, tí at navigera inni í fjallinum trúðu teir lítið uppá.

At enda hoyrdist skrambul nærkast, og tá langi royndarborurin kom ígjøgnum, rakti hann beint í málaða blettin, har vit høvdu ætlað, hann skuldi koma.

Kjeldgård var í øllum hampamaður og gjørdi heilt lítið av tí váta slagnum; men tunnilsball skuldi verða um kvøldið, og ein dropi var tikin við niðan til tunnilsmunnan. Tá borurin rakti, endurbórust ljómandi hurrárópini millum fjalla. Onkur rætti Kjeldgård fløskuna og ynskti honum tillukku við bragdinum. Kjeldgård legði nakkan afturav og drakk, so menn øtaðust.

Sligin varð ringur við “Vælkomnir føroyingar her í vási” og serliga harðmælt gjørdist: “enn eru knotur í føroyskum kongum, tað kennist við hvørt lógvatak;” men hjá Kjeldgård mundi lógvatakið vera so sum so, tí hann slongdist í ringinum sum tongul í brimi, so alkoholeitraður, at hann átti at verið borin til lækna; men nú varð hann borin oman til vegin, lagdur upp í lastbilin hjá Olaf á Posthúsinum, sum saman við mold og gróti varð brúktur til fólkaflutning, og so í song.

Kjeldgård stakkalin fekk sostatt einki við av hugnanum á Fitjunum tað kvøldið.

Ei undur í, at hann segði árini í Føroyum vera tey, sum fastast høvdu bitið seg í lívslanga minnið.

Jú, kósin var í lagi; men hæddarmunurin var enn uml. 15 centimetur ella helmingin av muninum á okkara truplu nivelleringum úr fjøru til fjalls; men tað hildu vit okkara millum.

Meginparturin av Føroya nú gomlu monnum hava eins og hjá Landsverkfrøðinginum okkurt skifti arbeitt hjá SEV, og SEV gjørdist gjøgnum áræði kommunurnar sum frá leið ogn hvønn einasta føroyings, hetta frá nýføðingi til elstu ommu.

Smásøgurnar kundu verið mangar at sagt frá úr fyrstu SEV-arbeiðunum; men fari eg við hesum stutta afturliti við takksemi fyri tíðina, vit høvdu saman, at lýsa frið yvir minnið um starvsfelagan og føroyavinin Kjeldgård, og samstundis minnast tey mongu, sum farin eru, føroysk sum útlendsk, ið strevaðust og stríddust fyri at gera SEV-dreymin til veruleika og við honum medvirka til at lyfta føroyska undirkervið úr miðøldini og inn í tann bert 52 ára gamla gerandisdagin, sum vit í dag halda vera sjálvsagdan.

Eg skal enda við at ynskja SEV og Føroya kommunum hjartaliga til lukku við 60 ára degnum og heita á tær um at halda fast um hesa felags ogn, so hon verður verandi á fólksins hondum, sama hvussu klandur og stríð annars so av og á kann stinga seg upp.



*Tey trý elementini vindur, eldur og vatn:*

- *Ytst liggur seglskipið, Georg Stage, og bíðar bæði eftir sjóvarfallsorku og vindmegi.*
- *Á sandinum uttan fyri bátahylin, sæst eldorkan úr jóansøkubáli*
- *Fremst stendur - eftir ein mansaldur í vatndrivnari orkumegi - fyrsta peltonturbinan hjá SEV sum søguligur fornlutur frá nýggjari tíð, um ein so kann siga.*

*myndatakari: Heini Olsen*



*Fossurin áðrenn hann tagnaði í rørunum, sum hómast í baksýni.*

## Eitt 70 ára minni:

# "Pourquoi Pas" gekk burtur við 39 monnum undir Íslandi

**Nógvar skipsvanlukkur eru hendar undir Íslandi. Tað hava vit nógvar royndir av, soleiðis sum tað eisini kann lesast í frásøgnini hjá Andreas í Tarti her í blaðnum. Ein tann størsta vanlukkan, tá talan er um tap av mannalívum, var tá franska havrannsóknarskipið "Pourquoi Pas" gekk burtur fyri 70 árum síðani á Akranesleiðini.**



*Her liggur "Pourquoi Pas" á Havnini seinastu ferð í jul 1936.*



*Modell av Pourquou Pas hongur í verandi Mariu kirkju. Her síggja vit nógvar av teimum smálutum, sum annars ikki síggjast á myndum.*

Tann 16. september 1936 hendi ein ræðulig sjóvanlukka undir Íslandi. Tá gekk franska kanningarskipið "Pourquoi Pas" burtur í Faksaflógvanum, og 39 av teimum 40 monnum umborð druknaðu.

Hetta var ein vanlukka, sum tað frættist nógv um, og Dimmalætting skrivaði eisini nógv um hesa hendingina í fleiri bløðum.

Ein av orsøkunum fyri, at hetta skipbrotið vakti so miklan ans var, at Jean Baptiste Charcot var kanningarleiðari umborð. Hann var útbúgvin lækni, men hevði harafturat - frá hann var heilt ungur - verið á fleiri kanningarferðum við Polarøki, bæði sunnan fyri og norðan fyri.

Pápi hansara - Jean Martin Charcot - var ein heimskendur nervalækni, og fólk komu úr øllum heiminum at lurta eftir hansara fyrilestrum.

Jean Charcot var føddur í 1867 og gjørdist tískil 69 ára gamal. Longu í 1903-5 var hann leiðari á kanningarferðum í Suðuríshavinum. Hann rindaði størsta partin av kostnaðinum sjálvur. Seinni yvirtók franski staturin skipið.

Árini 1908-1910 fór Charcot nýggja kanningarferð, og tá lat hann byggja skipið "Pourquoi Pas?", sum merkir "Hví ikki?". Við hesum skipinum sigldi hann 2.250 fjórðingar framvið Antarktis. Hann fann eina oyggj, sum fekk navn eftir honum - Charcot Land, og hann fekk ein hóp av týdningarmiklum vísindaligum tilfari heim við sær.

Upprunin til navnið á skipinum stavar frá teirri tíðini, tá Charcot plagdi at marra við pápa sín um at hann fór at gera slíkar ferðir. Pápin var tvørur og ráddi frá, og svarið hjá soninum var hvørja ferð: "Hví ikki?", og tí gjørdist hetta eisini navnið á skipinum. Teir komu hvørja ferð heim við stórbærum kanningarúrslitum.

Skipið var 140 føtur, hevði 3 mastrar, var 449 t. til støddar, og - umframt at hava 450 hk motor - var tað eisini útgjørt við seglum, sum kundu hava týdning í ísfyltum farvatni. Tað minti nógv um "Liljuna", sum eisini var ein fransaskonnart.

Tískil var hetta í 1936 eitt hampiliga nýtt skip. Tað var sterkt bygt - júst til sigling í ísi. Tað hevði eisini tá nútímans útgerð sum ekkolod, peiliútgerð og alla útgerð til havrannsóknir og var roknað sum eitt tað mest framkomna rannsóknarskip tá í tíðini.

Aftan á fyrra heimsbardaga gjørdi skipið - við Charcot sum leiðara - fleiri ferðir á okkara leiðum - sum til Eysturgrønland, Jan Mayen, Svalbard, Bjarnoynna. Í Grønlandi var dentur lagdur á at kanna grønlendska mentan.



*Leiðarin Jean Charcot plagdi at fara niðan á Katólsku kirkjuna at biðja eina bøn, tá hann kom á Havnina. Hetta er gamla katolikkakirkjan.*

### Varð eisini á Havnini

Á hesum ferðum hevur "Pourquoi Pas" fleiri ferðir lagt at í Havn, har tað hevur verið ein vælkomin gestur. Charcot var føroyavinur, og hann skrivaði fleiri áhugaverdar myndprýddar greinar um Føroyar í fronskum tíðarritum. Fyrst í 30-unum skrivaði hann eina lítla bók um Føroyar.

Sambært protokollini hjá Tórshavnar Havn hevur "Pourquoi Pas" ligið á Havnini 26. og 27. juli. Tað er eisini skrásett, at tá tók hann 18 t av vatni. Teir hava helst tá verið ávegis til Grønlands. Tá hevði Dimmalætting samrøðu við hann, og teir skriva m.a.:

*Dr. Charcot var en ualmindelig flink og elskværdig Mand. Til trods for sin høje Alder var han rask og rørig og man behøvede ikke at have talt med ham i mange Minutter for at blive klar over, at man her stod overfor en fremragende Videnskabsmand og en nobel og højt begavet personlighed."*

Tá 40 ár vóru liðin síðan vanlukkuna, skrivaði táverandi katolikkapresturin í Føroyum, Alex Kons, ein stubba í Dimmalætting, har hann greiddi frá, at tað fyrsta, Charcot plagdi at gera, tá hann var á Havnini, var at vitja Franciskanarasystrarnar og biðja eina bøn í kirkjuni. Hetta man vera orsøkin til, at tað seinni varð bygt ein modell av "Pourquoi Pas", sum varð smíðað av Palle Burla, sum í mong ár var katólskur prestur í Føroyum, og Verland Johansen eftir tekningum frá "La Musée de la Marine" í Paris.

### Skuldi vera seinasti túrur

"Pourquoi Pas" var annars ávegis til Keypmannahavnar, har Chacot skuldi halda fyrilestur í Geografisk Selskab. Her var ætlanin at handa honum gullmedalju frá felagnum, og var hetta ein sera sjáldsamur heiður at fáa. Síðan var ætlanin, at Chacot skuldi gevast við sínum kanningarvirksemi, og hesum hevði hann boðað frá.

### Andreas í Tarti minnist veðrið

Tann 15. september 1936 fór "Pourquoi Pas" av Reykjavík eftir at hava ligið í 14 dagar fyri at fáa bøtt um ketilskaða, sum skipið hevði fingið millum Ísland og Eysturgrønlandi seinast í august mánaði. Tá varð skipið sleipað inn til Reykjavíkar av verjuskipinum "Hvidbjørnen". Hetta var ein seinking, sum kom illa við, og tí vóru fleiri av manningini longu farnir heim við øðrum skipum, og tað bjargaði so teimum lívið.

Júst tá teir vóru farnir av Reykjavík brestir eitt øgiligt ódnarveður á. Vit eru so heppin at hava eitt eygnavitni til hetta ringa veðrið, og tað er Andreas í Tarti. Vit hava hansara "søgu til skips" sum greinarøð her í blaðnum. Hann greiðir soleiðis frá:

*Hetta minnist eg eisini sera væl. Men fyrst skal eg siga, at eg minnist eisini, tá skipið kom á Fuglafjørð á síni seinastu ferð norð eftir í juli mánaði. Gamli Sámal Petur fór umborð, og eg minnist skiparan, tá hann kom í land. Hann var ein framúr vakur maður.*

*Í hesum ódnarveðrinum var eg við "Guide Me", sum eg sjálvur átti,*

*á Eysturlandinum. Har var veðrið eins ringt sum á vesturlandinum. Vit lógu ankraðir við Bakkafjørðin, og veðrið var so ringt, at vit máttu andøva við motorinum fyri ikki at slíta ankarketuna. Hetta er einasta ferð eg minnist, at vísarin á barometrinum hevur sveiggjað upp og niður, sum hann gjørdi tá. Vanliga fer vísarin spakuliga hvønn vegin. Seinni frættu vit so um hesa vanlukkuna.*

Ein feril av veðrinum hevur eisini verið í Grønlandi. Johan Christiansen hevur fingið hendur í dagbókini hjá abba sínum Malvinus í Vátutoft, sum var skipari á Liljuni. Júst um hesa tíðina greiðir hann frá sera skiftandi ættum og so mikið av vindi, at tað ikki var fiskandi.

## Ein slapp livandi frá vanlukkuni

Tað var bert ein maður, bátsmaðurin, sum slapp livandi frá vanlukkuni, og hann greiddi síðan frá, hvat ið hendi. Hann var komin á vakt á midnátt, og vindmegin var 12 ella meira. Við nútíðar vindorkumáting svarar hetta til út móti 40 metur um sekundið

Eftir at teir vóru farnir av Reykjavík, gjørdist vindurin so nógvur, at skipið slapp ongan veg og avgjørdi teir tí at venda aftur. Samstundis vísti tað seg, at yvirmenninir umborð á "Pourquoi Pas" høvdu tikið feil av tveimum vitum. Teir høvdu blandað Akranes vita, sum er á sunnara arminum á Borgarfjørðinum við Seltjarnanes vitan vestan fyri Reykjavík. Bátsmaðurin varð sendur niður í bestikkrúmið eftir sjókortum, men júst tá rendi skipið á eitt sker ella ein boða. Tá var kl. 3 um náttina. Síðan varð skipið skolað av aldunum av einum skeri á annað. Her var sera óreint, og tað var skjótt at sjógvur kom í maskinrúmið, og tað ikki longur bar til at manøvrera. Roynt varð at koma leysir av skerinum við seglum, men skipið stóð fast, og sum leið á náttina smildraðist tað - bert 25 metrar úr landi. Fyrst knústist forstevnið, og síðan fór fremsta masturin, og restin við henni. Tá var klokkan blivin út ímóti 4 á morgni.

Tað vóru 40 mans umborð, nevniliga Dr. Charcot og tríggir vísindamenn, sjey yvirmenn, filmsfotografur og harafturat 28 mans. Teir flestu komu úr franska býnum St. Malo.

Verjuskipini "Hvidbjørn"



*Her sæst "Pourquoi Pas" í Reykjavík 14. september 1936, dagin fyri at teir fóru avstað lagnutúrin.*



*Her sæst Jean Charcot saman við manning. Sum tað sæst hevur hann umsorgan fyri fugli. Henda umsorgan var eisini tað seinasta sum sást til hansara, sum greitt er frá í greinini.*



*Íslendingar vístu sum vanligt samkenslu. Hetta er tá kisturnar fara avstað heim til Frankaríki.*



*Her verður farið seinasta túrin!*

og "Ægir" vóru stødd á leiðini, men veðrið var so vánaligt, at tað var ógjørligt at koma til hjálpar.

## Manningin leyp í havið

Tað seinasta, bátsmaðurin hoyrdi skiparan rópa, var, at nú máttu hvør maður klára seg sjálvan. Allir menn vóru róligir, og tað var eingin panikkur umborð. Allir vóru í bjargingarbeltum, og teir lupu fyri borð í vónini um at klára seg til lands.

Bátsmaðurin og ein dekkari hildu seg fastar í eitt vrakpetti, men tað var skjótt at matrósurin varð burtur. 4 tímar seinni varð bátsmaðurin slongdur upp á land í fjøruni, meðan hann helt fast í eina landgangsbrúgv. Sigast kann, at hann varð bjargaður sum við einum undri. Íslendingar tóku sjálvsagt hond um hann. Hann fekk kaffi og varð koyrdur í song. Men hann var so skakaður, at hann fekk ikki tosað ta fyrstu tíðina, eftir at hann vaknaði við aftur.

## Másin bjargaður

Bátsmaðurin greiddi eisini frá, at umborð høvdu teir ein grønlandsmása, sum var komin umborð í Angmassalik í Eysturgrønlandi. Hann var næstan tamur. Um dagin gekk hann leysur umborð, men um náttina varð hann koyrdur í ein kassa á dekkinum undir brúnni. Tað seinasta, sum bátsmaðurin sá til Charcot, var, at hann róliga fór niður av brúnni, har skiparin framvegis stóð. Hann opnaði lúkuna til kassan, og másin fór á flog og hvarv í náttini. Hetta var eitt vakurt seinasta minni um hendan kappan.

## Íslendingar vístu samkenslu

Síðani skrivar Dimmalætting úr Íslandi, at 20 mans úr økinum arbeiddu við at fáa líkini í land, og tað sást á fleiri av teimum, at tey vóru illa farin. Tó hevði skipslæknin framvegis sínar brillur uppi á nøsini.

Allar kirkjuklokkurnar í Reykjavík ringdu og 2000 fólk luttóku, tá 32 lík vórðu førd gjøgnum býin til katólska kapellið. Til staðar við havnina var katólski bispurin Meulenberg, "løgmaðurin" Jónasson og nógvir aðrir av leiðandi monnunum í Íslandi. Henda støðan var lík henni, tá manningin á "Onnu" varð borðin somu leið sum lík í 1924. Vit hava fyrr havt frásøgn um tað.

Við umborð á motorbátinum "Ægir", sum førdu teir deyðu til Reykjavíkar, var eisini tann einasti av manningini, sum kom frá hendingini við lívinum, nevniliga Eugene Gouldec - ein lítil tættbygdur 29 ára gamal svarthærdur maður, sum framvegis var skakaður aftaná hendingina.

Franska stjórnin sendi síðani eitt herskip til Íslands at føra líkini heim, so tey kundu hvíla í heimlandsins mold. Sorgin var stór í St Malo og í øllum Fraklandi.

## Minningarhald í Íslandi

Nú 70 ár eru liðin síðani hesa hending, hevur nakað verið gjørt burtur úr hesum í Íslandi.

Tann 14 . september var ein samkoma á Lærda háskúlanum í Reykjavík til at minnast hesa hending - og kanska serliga at minnast Jean-Baptiste Charcot. Millum luttakararnar var eisini abbadóttir Charcot, sum eitur Anne-Marie Vallin-Charcot, og greiddi hon frá um abban.

Vit vilja eisini minnast hesa hending í FF-blaðnum. Íblásturin til tað, hava vit fingið frá einum kenningi hjá blaðnum, nevniliga Jóhan Christiansen, havnarfúta í Havn. Hann hevur júst verið í Íslandi, og á havnaskrivstovuni í Reykjavík hevur hann funnið myndir og annað tilfar frá hesum tilburði, sum vit eru fegin um at kunna endurgeva.

## MAN B&W Diesel A/S

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64



ALT TIL ÚTRÓÐRARMANNIN

**GUMMIBÁTATÆNASTAN hevur tað, tú hevur brúk fyri**

Vit hava gummibátin, termodraktina, bjargingarvestin, handskarnar og meginpartin av tí, tú hevur brúk fyri.




GUMMIBÁTATÆNASTAN

31 49 13 | Mannaskarð 4 | FO-110 Tórshavn | gbt@gbt.fo | www.gbt.fo


# Gamlar myndir

**Vit hava fingið hesi nøvn á gomlum myndum vit hava havt:**





*Hetta er Dánjal Jacobsen, í Geil, Skálavík.*
3350F03232

*Hetta er Johannes Ellingsgaard og Jóan Petur (Pedda) Kruse av Eiði.*
3350F03224



*Hetta er Dánjal Joensen, ættaður úr Vági. Hann var sonur Jóan Petur, Toska Jóan Petur.*
3350F03234


**Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá**

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

***Sp/f Contrive Jsp Ltd.***
**FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945**



FAROE SEAFOOD

# BÓKHALDARI

Søkt verður eftir einum bókhaldara, at byrja sum skjótast.

Persónurin vit leita eftir, hevur hóskandi útbúgving sum t.d. skrivstovuútbugving ella líknandi. Arbeiðsroyndir við bókhaldsskipanina Axapta er ein fyrimunur.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Løn sambært avtalu

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jens Paula á telefon 594001

**Umsóknarfreistin er 29. september.**

P/F Faroe Seafood Tórshavn
Vestara Bryggja · FO-100 Tórshavn
Tlf. 355555 · Telefax 312631

## Samrøða við Andreas í Tarti – 2. partur:

**At taka úr blaðnum**

Síðurnar 11, 12, 17 og 18 eru samanhangandi og kunnu takast úr blaðnum

# Konfirmeraður, og so til skips

**Andreas heldur fram við síni frásøgn. Nú er barndómurin farin og vaksnamannalívið stundar til. Sum 14 ára gamal er fyrst at verða konfirmeraður og síðan at fara til skips.**

### Konfirmatiónin

Nú er barndómurin við at gerast liðugur, og hetta hendir við konfirmatiónini, sum merkir byrjanina til vaksnamannalívið.

Um konfirmatiónina hjá Andreas hevur Freydis skrivað hesa frásøgn:

"Tann 10. apríl í 1921 hevði Kristian Vilhelm Nielsen prestur konfirmatión í Oyndarfjarðar kirkju. Tað vóru 39 konfirmantar, og ein av teimum var Andreas.

Sum nevnt hevur Andreas eitt gott minni, og nógv er at minnast aftur á eftir so langt lív. Hann minnist flestallar, ið hann hevur verið til skips saman við. Hann mintist tey flestu, hann varð konfirmeraður saman við. Hann greiddi systirdóttrini Freydis frá, at tað vóru nakrir konfirmantar, sum hann ikki kundi koma fram á, og tað lá hann og hugsaði um, tá hann vakti um næturnar.

Men ráð vóru fyri tí. Prestur á Nesi var so beinasamur, at hann segði okkum nøvnini, og tað vísti seg at vera nakrar av gentunum, hann hevði gloymt.

Hetta var fyrsta konfirmatiónin í Oyndarfirði í langa tíð, og Andreas er tann einasti av øllum 12 systkjunum, sum er konfirmerað í heimbygdini. Sum vit síggja, so vóru tríggir konformantar úr Oyndarfirði og tveir av Hellunum, hini 34 hildu til hjá familju og kenningum hjá foreldrunum. Pápi Freydis, Martin úr Svínáum, og Niels Petur í Leirvík gistu í Billustovu, og Hans á Norði á Toftum gisti hjá skyldfólki í Ansastovu.

Tey gingu eina viku til prest, og Andreas minnist, at tey lærdu sálmin *O du min Immanuel.*

Vit hoyra mangan fólk siga frá tíðini, tey gingu til prest, hvussu stóran týdning hon hevur havt fyri teirra vaksna lív. Sjálvt um fleiri longu høvdu verið heimanífrá, so var hetta sum eitt uppihald ímillum barnaárini og vaksnalívið, ein vika við stuttleika og spæli, til sunnudagurin kom, og tey fingu prestsins hond á høvdið.

### Riggi til at fara til skips

So fari eg til skips við Arizonu. Men fyrst er at verða riggaður til. Fyrst má eg keypa mær einar stivlar og eitt sett av oljuklæðum. Tá vóru als ikki gummistivlar til. Hetta keypti eg frá Poul Klein, sum var pápi skiparan Klæmint Klein. Stivlarnir vóru einar trægaggur, sum tað var kallað tá. Hetta vóru leðurstivlar við træbotni. Teir kostaðu kr. 50 og oljuklæðini kostaðu eisini 50 kr. Annars var nógv brúkt tá í tíðini at fernisera sær oljuklæði, men tað bar eisini til at keypa liðugtgjørd oljuklæði. Eg skilji ikki, so lítil eg var til mannar, at eg kundi ganga í hesum gaggunum. Tað kostaði 100 kr. at gera meg út. Mamma bant alt annað uppá meg, sum troyggjur, hosur og vøttir og helst eisini undirklæðir. Eitt mátti ikki gloymast at hava við, og tað var eitt noða av tógv og eina stoppinál, sum mátti vera tøkt, um hol kom á.

Buksur vórðu seymaðar í bygdini. Trina plagdi at seyma, seinni var tað ein av Hellunum. Hon æt Poulina og hevði lært at seyma hjá Trinu. Eg minnist einki til at keypa buksur tey fyrstu árini. Elspa við Lið og Fía við Stein plagdu at veva buksuvadmal.



*Andreas saman við Menakhem Ben Yami, ísraelska fiskivinnufrøðinginum, sum var her í summar*

### Eitt sindur um fiskiskapin hesa tíðina

Tað var í 1872, at vit byrjaðu okkara havfiskiskap við sluppum. Fyrstu nógvu árini varð fiskað bæði undir Føroyum og Íslandi. Men so við og við verður lagt av at veiða undir Føroyum. Fram til 1920 vóru tey eini 100 skip, sum veiddu á okkara leiðum, men í 1921 fer talið úr 89 í 1920 niður í 19, og árini eftir enn minni.

Talið av skipum, sum fiskaðu undir Íslandi, var hvørt ár væl omanfyri 100. Í 1921 vóru tey 136 skip við 2.209 monnum. Ein av hesum var Andreas, og hesum greiðir hann frá nú.

### Avstað fyrsta túrin 1921

Vanligt var, at menn fóru at rigga til einar seks dagar áðrenn farið var. Men tað vóru bert teir útvaldu, sum fingu hetta til arbeiðis. Tað skuldu ganga eini trý ár, áðrenn ein fiskimaður var nóg royndur til tað, og tá slapp eg eisini uppí part. At rigga til varð roknað til 6 dagsarbeiðir, og lønin var 5 kr. pr. dag. Hetta var als ikki so galið.

Skiparin Klæmint Klein var føddur við Gjógv í 1894, og hann tók skiparaprógv í 1918. Hann fór til skips í 1910 við Golden Harp, og hann var í 1912 við "Otariu" hjá sama reiðara sum "Arizonu". Hann var fleiri ár við "Norðlýsinum", sum er umrøtt seinni í greinini. Hann doyði longu í 1938 av barnalammilsi.

Nú fara vit so avstað. Tá skiparin var úr Oyndarfirði, fóru vit eisini umborð har. Eg haldi, at vit mugu hava havt gott veður yvir til Ísland, tí eg kann einki minnast til sjóverk. Sikkurt hevur tað verið ov lítið av koyggjum umborð á Arizonu, tí eg kom at hava koyggju saman við einum elduvíkskingi, Elias Berg, sum var beiggi Marius Berg í Gøtu. Eg kom eisini at standa undir liðini á honum, tá vit stóðu við snørið. At hava koyggju í felag merkti, at menn skiftust um at vera í koyggjuni aðru hvørja vakt. Hvør maður hevði síni seingjarklæði, so hesi skuldu eisini skiftast hvørja ferð. Í kahúttini vóru eisini tveir brøður frá Gjógv, sum vóru felags um eina koyggju.

Alt hetta ljóðar sera pri-

## Konfirmantarnir vóru:

| | |
|---|---|
| Jens Christian Johannesen, 1906-1928 | av Hellunum |
| Johannes Fr. Olsen | av Skála |
| Hans Jakob Jakobsen (á Norði) | av Toftum |
| Johan S. Fr. Joensen | undan Gøtueiði |
| Andreas Sofus Andreasen f. 01.12.1906 | úr Oyndarfirði |
| Hans Christoffer Toftenæs | úr Leirvík |
| Peter Hilmar Eliasen | úr Leirvík |
| Axel Lervig, fórst við Fossanes í 1938 | úr Leirvík |
| Samuel Peter Fr. Hansen | úr Norðragøtu |
| Samuel Peter Reinhold Thomsen | úr Norðragøtu |
| Ingvard E. Olsen | av Toftum |
| Sofus Andreasen | av Strondum |
| Martin Sofus Poulsen, 1907-1995 | úr Svínáum |
| Edvard S. Lamhauge | úr Lamba |
| Mourits E. M Petersen, 1907-1991 | úr Oyndarfirði |
| Hans Peter Højgaard | av Toftum |
| Christian Andreasen, 1907-1972 | av Strondum |
| Samuel Jacob Hansen, 1907-1991 | úr Lamba |
| Niels Peter Johannesen | úr Leirvík |
| Jacob Oluf Magnus Anton Lervig | úr Leirvík |
| Louis Anton Kr. Hansen | úr Saltnesi |
| Margot Sofie Olsen | úr Funningi |
| Anna Elisabeth Susanne Nielsen, 1906-83 | frá Saltangará |
| Anna Malena Olsen, 1906-1996 | av Hellunum |
| Anna Sofía Joensen, 1906-1981 | frá Gjógv |
| Christiane Margrethe Susanna Jacobsen | av Glyvrum |
| Johanna Herborg Dahl, 1906-1985 | úr Oyndarfirði |
| Petra Maria Jacobsen | úr Leirvík |
| Else H. Danielle Petronelle Fr.Lamhauge | úr Lamba |
| Marie Sofie Kjeld | úr Funningsfirði |
| Oluffa Sofie Lambaa | úr Fuglafirði |
| Anna Olga Malene Sigvardsen | av Toftum |
| Sigrid Johanne Sofie Johannesen, 1906-2000 | úr Funningi |
| Cathrine Malene Elise Margrethe Danielsen | av Strondum |
| Sørine Alfride Nicoline Møller | úr Norðragøtu |
| Petra Christiana Margrethe Danielsen | úr Søldarfirði |
| Eina Høgnesen, 1907-1994 | úr Fuglafirði |
| Anna Malene Johannesen | úr Funningi |
| Johanna Højsted, 1907-1979 | úr Svínáum |




1. Petur Klein.
2. Jóan Fredrik Hansen, í Leynum.
3. Jákup í Horni, við Gjógv.
4. Jógvan Garðshorn, Elduvík.
5. Andrass Hansen, Streymnes.
6. Hans Debes, bestimaður, av Oyrareingjum.
7. Poul Laksafoss, Klaksvík. Hann var annars við "Sæborg".
8. Mikkjal Andreassen, í Tarti.
9. Jákup Sofus, við Gjógv.
10. Klæmint Klein, skipari.
11. Jóhan Sofus Haraldsen.
12. Emil Simonsen í Króki, Sandur.
13. Andreas Rasmussen í Køk, Sandur.

*Hesir av manningini eru ikki við á myndini: Andreas í Tarti, Sjúrður á Rætt, Niklas í Heiðriksstovu og Sakaris undir Kuldarasteini.*

**Framhald á næstu síðu**




*Her liggur Arizona á Havnavág. Hetta er ein av teimum mongu skipsmyndunum hjá fornminnissavninum.*



*Klæmint Klein var skipari á "Arizonu".*

mitivt, men var kortini í aðrar mátar framkomið í mun til bert eini 10 ár frammanundan. Tá vóru sluppir, har tað í lugarinum vóru hvørki beinkir ella borð. Menn máttu sita á teirra skrínum, sum teir surraðu føst frammanfyri koyggjuna. Tá eg fór til skips, hevði hvør maður sín bonk at hava klæðir í, og afturat tí hevði hann so eisini skrín í lugarinum. Har man hava verið trongt.

## Fekk tríggjar fiskar fyrsta dagin

Eg kann minnast tann fyrsta dagin, vit kastaðu á Kolmunnagrunninum. Tað var gott veður. Eg minnist ikki, hvør ið hjálpti mær við snørinum at rigga tað til. Men pápi hevði verið á Suðurlandinum um várið, og tað er møguligt, at tað hevur verið tað loddið, sum eg havi havt. Tað var eitt sjeypundslodd. Snørini vóru hollendsk, og tey vóru 50 favnar stykkið. Mítt snøri bleiv 100 favnar. Fiskur stóð á 120 favnar dýpi. Kanska havi eg fingið styttri snøri, tí sum so ungur var hildið, at eg orkaði ikki væl at draga. Og eg orkaði heldur ikki at draga loddið, sjálvt tá tað var einsamalt. Elias hjálpti mær, sum teir eldru ofta hjálptu uppá teir yngru. Og veitst tú, hvussu nógvar fiskar eg fekk fyrsta dagin? Eg fekk tríggjar fiskar av 700, sum var samlaða veiðan fyri dagin!

Tá tað kemur til kvøldið, og teir fara at reinsa, fái eg boð um at fara í koyggjuna. Og so fór eg at rokna út, meðan eg lá í koyggjuni, hvussu langa tíð tað fór at taka hjá mær at fáa fyri oljuklæði og stivlar. Men so batnaði, 7 fiskar fekk eg dagin eftir. Men eg kom so at mennast í hvørjum. Sum ungur varð ein vandur hart, og tað bar ikki til at sleppa sær undan. Eg var á bestamansvaktina og mátti standa við lúnningina, um eingin annar stóð, so eg kundi nappa ein fisk nú og annan tá. Tú skal trúgva mær, at vit fingu 26.000 fiskar fyri summarið, og eg fekk knappar 700 fiskar. So tað var úti ímóti 400 kr, sum eg fekk fyri túrin.

Tá fingu vit avrokning fyri talið av fiski vit veiddu, vit høvdu jú sjálvdrátt. Tað verða færri og færri sum vita hvat hetta er, og skal greiðast frá tí í stuttum. Hvørja ferð, vit fingu ein fisk, varð lippan skorin av. Hon varð koyrd í lippukassan, sum hevði tvey rúm. Annað var til lippurnar fyri dagin. Við dagslok varð talt upp, og so vóru lippurnar koyrdar í størra rúmið. Tá vikan var liðug, varð talt upp undir umsjón, og lipputalið hjá hvørjum manni varð skrivað í protokol hjá skiparanum. Tá túrurin var av, varð talt saman hjá øllum.

Tá eg fór til skips, vóru bert 10 ár liðin, síðan fiskimannafelagið var stovnað í 1911, og fiskimenn fingu sín fyrsta sáttmála í 1912. Eftir honum fingu fiskimenn 1/3 av veiðuvirðinum við nøkrum frádráttum. Í 1918 var ein rættilig kreppa í vinnuni og verkfall hjá fiskimonnum. Reiðarar vildu hava partin hjá fiskimonnum niður. Men hetta endaði við, at fiskimenn fingu valið millum at varðveita 1/3 í sín part móti at selja fiskin fyri ein fastan prís til

### Við Arizonu summartúrin í 1921

Klæmint Klein, skipari
Jóhan Klein, við Gjógv, bestimaður
Petur Klein, 2.bestimaður
Dánjal Jákup Garðshorn, kokkur
Zakarias Zakariassen
Andreas Andreassen, í Tarti
Jóhan Marius Joensen, í Geil,
Heini Hansen, "Stóri Heini".
Magnus Johannesen, av Hellunum
Elias Berg á Mýruni, Elduvík
Danin Andersen úr Kalundborg
Andreas Hansen í Andrasstovu. Eiði
Óla Jákup Olsen, í Mirmansstovu, Eiði
Dia á Jákupsstovu, Gjógv
Petur í Jákupsstovu, Gjógv
Jákup Sofus, Gjógv
Andreas í Køk, Sandur
Mikkjal Ørvarodd, Sandur

### Við Arizonu vártúrin 1922

Klæmint Klein, skipari
Tønner úr Skopun, bestimaður
Petur Klein, 2.bestimaður
Niklas Dahl, í Heiðriksstovu, kokkur
Mikkjal Andreasen, í Tarti, pápi Andreas
Andreas Andreasen, í Tarti
Johan Marius Joensen, í Geil
Heini Hansen, "Stóri Heini"
Jógvan Garðshorn, Elduvík
Hans, beiggi Niklas, úr Skopun
Niklas, Skopun
Mourits, Skopun
Jákup Sofus, við Gjógv
Andreas í Køk, Sandur

### Summartúrin í 1922

Klæmint Klein, skipari
Hans Debes av Oyrareingjum, bestimaður
Petur Klein, 2. bestimaður
Niclas Dahl, kokkur
Mikkjal Andreasen
Andreas Andreasen
Johan Marius Joensen
Heini Hansen, Elduvík
Jógvan Garðshorn, Elduvík
Johan Sofus Haraldsen
Sjúrður á Rætt, Gjógv
Jákup í Horni, Gjógv
Jákup Sofus, Gjógv
Andreas Hansen, Eiði
Emil í Króki, Sandur
Andreas í Køk, Sandur
Jóan Fredrik Hansen, Leynar



*Andreas minnist enn, tá Fredag helt útimøti í Fuglafirði í 1922, beint áðrenn hann fór avstað við Norðlýsinum og ikki kom aftur. Her sæst Fredag saman við sínum: Ovast: Elsa Maria (mamma konuna). Miðraðið: Maria, Amalja, kona Fredag, Thomasia. Fremsta rað: Hanna, Tummas, Sedea, Fredag, Alfred og Ingvard. (Keyse, Astrid og Fredag, y, eru ikki á myndini. Av børnunum liva Fredag, sum var føddur eftir at pápin gekk burtur, og Thomasia eftir.*



*Hetta var reiðskapurin. Vaðbein, snøri, 7 punds lodd, teinur og húkar.*



*Hetta var lippukassin, sum var avrokningarskipanin hjá fiskimonnum. Har hann er opin sæst, at tað er tvey rúm. Eitt minni fyri dagsins fong, og lippurnar fyri vikuna verða so savnaðar í størra rúminum, til tær verða endala upptaldur.*

*Har lippukassin er afturlatin sæst eitt hol niður í minni rúmið. Tá slepst undan at opna kassan hvørja ferð. Fyrsta dagin fekk Andreas bert 3 fiskar, men seinni fór at ganga betur.*

**Framhald á síðu 17**

# Nú var hann aftur

Hevði bara bíðað eftir, at oraklið í Vinnuhúsinum kom aftur við einum boðskapi, - og brátt var hann her.

Sum altíð, so er Jan eftir verkafólkunum, ið, um hann hugsar eitt vet, er við til at tryggja honum starvið í Vinnuhúsininum. Um hann ongan regluligan boðskap sendir út til fjølmiðlarnar, hevur Vinnuhúsið ikki tørv á manninum. Tað tykist løgið at loypa á hampamann, ið bara røkir sínar skyldur, sum hann er løntur fyri, men eingin annar háttur er.

Tí er hetta aftursvar, ella **respons**, sum hann sjálvur kallar tað, vent beinleiðis móti Jan Mortensen, manninum og stjóra í Vinnuhúsinum persónliga, - tí í hvørjum einasta boðskapi hansara, hevur hann rakt mann og kvinnu í verkavinnuni í ólukkumát, - ja, hann má vera bláoygdur, sum hann sjálvur tekur til.

### Kapping um arbeiðsmegina

Jan nevnir, at starvsfólk í fiskivinnuni skapa ov smá virðir, men her má Jan skjalprógva pástandin, tí vit á gólvinum eru fullvís í, at okkara avrik gevur væl av sær, annars vóru vit ikki biðin til arbeiðis.

At fáir arbeiðsdagar eru til verkafólkið, er ikki av teirra ávum, men er orsakað av, at arbeiðsgevarin í hvørjum einstøkum føri leggur arbeiðið soleiðis til rættis, at tað gagnar honum best, - í mun til rávørutilgongd, marknaðarprísir og ikki minni avskipingardagar.

Fólkið sjálvt ynskir eina fulla arbeiðsviku, men má sláa seg til tols við stuðulin frá Fiskavirkisskipanini, ið bert er ein blindgøgn hjá Arbeiðsloysisskipanini. Teir fyrstu átta tímarnar, - ein dagur -, ber verkafólkið, kallað sjálvsábyrgd, og fyri restina av avlopstíðini fæst lítið og einki. Hóast lóg og reglugerð ásetur 75%, er úrslitið 40-42%. Tveir partar eiga orsøkina til hendan skeivleika, og eru teir stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina og arbeiðsgevararnir.

Viðmerkjast skal, at verkafólkið í ólukkumát, av síni lítlu løn, **eisini** av stuðlinum, letur pening í skipanina, fær bert lítlan part aftur, meðan kassin hjá ALS bólgnar.

### At flyta millum vinnugreinir

Mong av teim, ið eru innan fiskavirking, eru tilkomið fólk, kvinnur og menn, sum hava drúgvar royndir. Hava verið støðuføst arbeiðsmegi, men nú komin upp í árini, og fáa ikki fótin fyri seg, um so er, at tey skulu leita sær eftir øðrum arbeiði í kappingini um arbeiðsmegi. Hvørji tilboð hevur tú tá til teirra?

Júst hesi fólk eru ein dýrgripur hjá arbeiðsgevaranum, at hann hevur fólk, ið kann leggja nýggjum fólki lag á, læra teim arbeiðssið og hugburð, og menna tey til rættar samfelagsborgarar. - Men slíkum líkar tær neyvan.

### Um hægsta livistøðið fyri føroyska borgaran

Tá tú nevnir, at kappingin til eina og hvørja tíð fæst við tað, ið skapar hægsta livistøðið fyri føroyska borgaran, tá er okkurt gloppið fullkomiliga, tí við tínum nýggjasta postilatið tekur tú tað lítla burtur, ið verkafólkið má húsast við, meðan tú fleirfaldað leggur aftrat hjá teim, ið hava nóg mikið.

Vit vita væl, hvør partur av føroysku borgarunum hava fingið hægri livistøði. Tað sæst best, tá dagliga verður boðað frá risasølum og risakeypum. Onkustaðni kemur peningurin, ikki bert við gandi.

Tað er tann bíliga arbeiðsmegin, føroyska verkafólkið, ið er gandaorðið, tí uttan tey, hvørki keyp ella søla. Um bíligari arbeiðsmegi slapp inn á arbeiðsmarknaðin, ráddu ávísir arbeiðsgevarar einsamallir fyri borgum, og løggevandi og útinnandi vald høvdu verið eitt heiti. Minnir meg ikki sørt um støðuna, sum er og hevur verið í fleiri londum í Suðurameriku, - er **konceptið** haðani ?

### Strategibólkurin í Vinnuhúsinum - og strategiin

Í teim boðskapum, tú Jan ert komin við, nevnir tú, at strategibólkurin er komin ásamt um hetta og hatta, men mær lysti at vita, hvør situr í hesum bólki. Tað er so óhugnaligt at frætta, at tað sita fólk í glæsiligastu húsunum í Havn og leggja ráð um, hvussu sleppast kann av við føroysku verkafólkini.

Eg veit, at tú ert bert boðberin, sum stjóri í Vinnuhúsinum.

### Spurnaðartekin

Í tínum tveimum regluligu boðskapum havi eg givið tær respons, og handað tað persónliga ella í telduposti til Tíðindablaðið Sosialurin, men fyri mær duldum orsøkum, havi eg ikki fingið innivist í blaðnum.

Tískil vil eg nýta FF-blaðið í staðin, hóast fjúrtan dagar ganga, áður enn aftursvar/respons verður alment, tí tað letur til, at FF-blaðið er tað einasta, ið tekur mál í álvara.

*Lars Jespersen*
*Hoyvík*

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

## Sníálvur:
# Nógvur fiskur undir Íslandi



*Sníálvur letur heilsa øllum heima!*

Vit hava fyrr havt tíðindi frá Sniálvi Røvilsberg, sum er ein av okkara álitismonnum á Sandi.

Hann er við einum línubáti á Flateyri uppi á Vestfjarðunum í Íslandi. Hann letur óføra væl at fiskiskapinum. Teir hava beint landað 40 tons, sum teir hava fiskað eftir trimum døgum. Meginparturin er toskur, men hesa ferð høvdu teir eisini fitt av lira, sum teir fáa einar 10-11 føroyskar krónur fyri. Teir hava higartil hendan mánaðin fiskað 170 t, sum vildi verið ein dreymur hjá føroyskum línubátum, sjálvt tá gongst eftir vild við veiðuni.

Annars hevur Sniálvur ein fyrispurning til Bjørn Kalsø, landsstýrismann, og tað er viðvíkjandi trygdarútgerð við teimum smærru bátunum. Hann spyr, um tað ikki ber til at taka tollin av allari bjargingarútgerð. Nú er aftur hend eina bátavanlukka, og tí er tíðin komin at hugsa um tiltøk, so útróðrarmenn og onnur, ið hava áhuga fyri sjóvinnu, fáa tann møguleika at keypa slíka útgerð bíligari. Vit lata henda viðkomandi spurning fara víðari.

Sniálvur letur heilsa øllum heima!



# Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein

4. september
+ 4 stig og stilli. "Polar Amaroq" landar í Nuuk í dag, og tað sama ger "Tasermiut". Sum eg skilji, hevur tað gingið gott hjá teimum báðum hetta tørnið.

"Sisimiut" var eisini inni í Nuuk um vikuskiftið og landaði tosk og svartkalva. "Lómur" hevur landað tvær ferðir í Illulisat, og fríggjadagin var "Polar Natarnaq" og landaði her í Sisimiut.

5. september
Pluss 4 stig og lot av suðri við ælaveðri. "Salleq" kom inn seinnapartin at landa, teir hava fulla last. Teir fara út aftur í morgin, og so er meiningin at fylla skipið, og so fara teir av landinum við skipinum.

6. september
+ 5,2 stig og lot av suðri við regni. "Lómur" kom inn at landa í morgun, teir hava um 70 tons inni.

8. september
Pluss 2,7 stig. Nú er heystið er í nánd, og tað er hvítt í fjøllunum. "Markus" kom inn at landa í morgun, teir hava fulla last.

9. september
+ 2,8 stig. "Polar Timjarmiut" kom inn at landa í morgun, teir hava fulla last inni.

13. september
+ 2,8 stig og stilli, rím á hvørjari tekju. "Newfoundland Martiner" kom inn her í morgun at landa, teir hava gott 50 tons av svartkalva.

Politiið fór í morgun umborð á "Reginu C", og ordrin var at leggja til kai at landa. Har var politi allar staðir, og tað varð víst í sjónvarpinum. Har sóu vit politiið sita á kaiini við stórari skrivstovu og førdi hvørja eskju av rækjum inn á teldu. Teir vóru eisini uppi á brúnni, har teir sóu ógvuliga kønir út við at finna útav, hvar "Regina C" hevði verið, ella um hvar hon var nú. Hetta er eitt mál, sum kriminalpolitiið er blandað uppí, tí ein persónur í Nuuk hevur meldað allan tann grønlendska trolaraflotan til politiið fyri ólógligan fiskiskap.

"Nanok Trawl" bleiv eisini kannaður niðri í Danmark, tá teir komu hagar eftir eldsbrunan í vár.



"Regina C" var inni í Sisimiut í gjár við einum sjúkum manni.

"Akamalik" er á veg til Nuuk at landa í morgin, teir hava eisini fulla last.

14. september
Pluss 2,3 stig og stilli. Skeljabáturin "Anna Kiil" kom inn at landa jákupsskel í morgun, teir hava gott 20 tons inni, og teir hava verið úti í gott 4 vikur.

Fyrrverandi "Gissur Hvíti" nú "Oujukoaq" úr Kanada kom inn at landa svartkalva, sum teir fáa beint vestur úr Sisimiut í kanadiskum sjógvi. Har umborð eru tveir íslendingar, og teir lata væl at fiskiskapinum. Teir hava 450 gørn standandi úti, 50 gørn í hvørjum trossa. Hendan túrin hava teir um 160 tons av avhøvdaðum svartkalva, og prísurin er 6-7 kanandiskar dollarar fyri kilo.

Í morgin kemur ein av teimum smærru kanadiarunum "Newfoundland Tradition" inn at landa, teir skulu leggja 50 tons av svartkalva upp.




## Manningarmyndir

**Vit hava fingið hendur á fleiri gomlum myndum við fiskimonnum. Vit vilja fegin frætta, um nakar kennir menninar á myndunum. Tað er Føroya Fornminnissavn, ið eigur myndirnar.**

3350F03235





3350F03236


Tvær súlur hvørja ferð
Allir ferðaseðlar hjá Atlantic Airways geva tvær súlur
Nú kanst tú fáa ein ókeypis ferðaseðil fyri hvørjar fimm ferðir, tú flýgur við Atlantic Airways. Frá 1. september lata vit tvær súlur, tá ið tú fert við okkum úr Vágum. Sostatt kemur tú skjótari upp á 10 súlur, ið geva eina fría ferð; tú rindar einans ferðaavgjaldið. Atlantic Airways flýgur til øll grannalondini, vit fara tríggjar ferðir dagliga til Keypmannahavnar, og vit eru partur av EuroBonus-skipanini.
SÚLUKORT
Savna saman 10 súlur og fá eina ókeypis ferð
ATLANTIC AIRWAYS
Tilboðið er galdandi frá 1. september á øllum leiðum hjá Atlantic Airways
ATLANTIC AIRWAYS
Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum
www.atlantic.fo



# MÓTTØKULEIÐARI TIL NORRÖNU

## Søkt verður eftir móttøkuleiðara til Norrönu at byrja skjótast gjørligt

Smyril Line bjóðar áhugavert og avbjóðandi starv, sum móttøkuleiðari í einum altjóða umhvørvi, har lyklaorðini eru:

- Ábyrgd
- Personlig avbjóðing
- Dygd
- Faklig menning
- Persónlig menning

Smyril Line sóknast eftir fólki við receptionst útbúgving og gjarna royndir sum leiðari. Tað er krav, at umsøkjararnir duga væl enskt, hava góð samstarvsevni, góðan teldukunnskap og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvir litið.

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst (ikki eldri enn 2 ár).**

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið (ikki eldri enn 5 ár).

Løn og setanartreytir eru smb. galdandi sáttmála undir FAS-skipanini við Føroya Fiskimannafelag. Størvini verða sett skjótast gjørligt.

Umsóknir og CV skulu sendast við telduposti til aðra av hesum tilskriftum:

crew@smyril-line.fo
hotel.manager@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og í dag selja og marknaðarføra vit Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark um allan heimin.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík, Kiel og í Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveits, Benelux, Fraklandi og Italia.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM





# FÁIÐ FF-BLAÐIÐ RESTINA AV ÁRINUM ÓKEYPIS!

Hetta blað verður sent **í hvørt hús í Føroyum**. Hetta verður m.a. gjørt fyri at kunna um støðuna hjá fiskimannafelagnum til tey tilmæli, sum eru komin fram um at avtaka tær almennu skipanirnar fyri fiskimenn.

Hetta verður eisini gjørt fyri at kunna um FF-blaðið. Tað er øðrvísi, og vit hava bert tilfar, sum ikki hevur verið í hinum bløðunum.

Serligur dentur verður lagdur á fiskivinnutíðindi, fakfelagstíðindi, søguligt tilfar og viðgerð av samfelagsviðurskiftum. Her verður serligur dentur lagdur á at viðgera viðurskifti, sum ikki koma í hinar fjølmiðlarnar.

Tey eru nógv sum siga FF-blaðið vera besta blað tey fáa, og fleiri halda ikki onnur bløð. Vit bjóða nýggjum haldarum **at fáa blaðið ókeypis restina av árinum**. Tað er lættast at tekna seg við at ringja til tlf. 311589, eisini á kvøldi, at senda fax til 318769, við at senda teldupost til ff-blad@post.olivant.fo ella við at senda inn haldaraklepan niðanfyri.

Nýggir haldarar fáa eisini seinasta blað sendandi við fyrsta partinum av forvitnisligu lívssøguni til sjós hjá tí knappliga 100 ára gamla Andreas í Tarti í Oyndarfirði. Teir fáa eisini seinastu ársfrágreiðingina hjá Føroya Fiskimannafelag.

Frá postverkinum kemur seinast í árinum krav fyri 2007, sum er kr. 250. Fyri hetta fáast 24 blað.



**Ja takk!**

**Eg ynski at gerast haldari av FF-blaðnum fyri bert 50 krónur um ársfjórðingin**

Verður sent óposteð – vit gjalda postgjald

Navn: ______________

Bústaður: ______________

Bygd / býur: ______________

FF-blaðið · postsmoga 58 · FO-110 Tórshavn

FF blaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA








# Savna 5 sóljur til ókeypis ferð

Nú ber til at savna sóljur til ókeypis ferðir, tá tú flýgur við FaroeJet. Hvørja ferð tú flýgur við FaroeJet úr Vágum, fært tú eina sólju. Hetta er galdandi fyri allar ferðaseðlar - einvegis sum aftur og fram. Tá tú hevur savnað 5 sóljur, geva vit tær eina ókeypis ferð aftur og fram millum Vágar og Keypmannahavn.

**Veksla um til sóljur**
Ert tú frammanundan limur í aðrari líknandi føroyskari avsláttarskipan, kann uppspardi avslátturin brúkast í okkara Sóljuskipan - einfalt og ómakaleyst!

Øll, sum flúgva við FaroeJet, kunnu gerast limir í okkara Sóljuskipan. Limakortið fært tú, tá tú skrivar teg inn við innskrivingardiskin á flogvøllinum í Vágum. **Hjartaliga vælkomin umborð!**

**Ferðaseðilin kann bileggjast á www.faroejet.fo ella á tíni ferðaskrivstovu.**

Gev gætur, at tú mást rinda ferðaavgjald av ókeypis ferðaseðlinum, tí hesum røður FaroeJet ikki fyri.
**Sí limatreytir á www.faroejet.fo**

faroeJet

**Tín trygd fyri lægsta prís!**

faroeJet | 380 sørvágur | tel 35 33 33 | faks 35 33 30 | www.faroejet.fo

**Framhald av síðu 12**

reiðaran og at siga frá sær frábýtisrættin. Hin møguleikin var at fara niður í 27% og verða tryggjaðir tann veruliga prísin fyri fiskin. Hendan seinna møguleikan valdu teir flestu, og hetta loysti seg eisini, tí prísurin fór frá 52 oy/kg í 1917 upp í 72 oy/kg í 1918. Men í 1919 var parturin til fiskimenn komin upp aftur í "reinan triðing".

Eg minnist einaferð, at vit lógu í fínasta veðri á Kolmunnagrunninum, nú kemur ein flokkur av mastrahvalum, og ein royður kemur gnístandi undan. Tá søgdu teir, at mastrarhvalirnir stoyttu seg niður í blástrið á royðrini fyri at fáa tunguna út, so teir kundu bíta hana av royðrinum.

Vit vóru 18 mans, og eg minnist teir allar. Á manningarlistanum var ein við, sum var úr Kalundborg. Hetta var ein stak fittur maður. Hann hevði eisini verið árið fyri við Arizonu. Hann lærdi til stýrimann, og honum manglaði tíð at sigla við seglskipi. Tí var hann við. Eg var á vakt við honum. Hann hjálpti eisini uppá meg. Nú hevði hann so fingið nóg mikið av tíð og fór niður at læra víðari til skipsførara. Ikki smakkaði hann brennivín. Annars minnist eg ikki, at menn drukku, tá teir komu inn í Ísland. Teir mundu ikki hava nakrar pengar at drekka fyri.

Vit fingu væl av fiski, og vit fóru at landa á Seyðisfjørðinum á Eysturlandinum. Vit fingu 58 oyru pr. kg. Vanliga var roknað við, at tað sum fekst pr. kg., so nógv fekst eisini fyri stk. Hetta var góður prísur tá. Eg var ikki á Suðurlandinum, sum var túrin frammanundan. Vit komu ikki heim ímillum, sum vanliga vildi verið á ólavsøku. Tað var vanligt at landa á Seyðisfjørðinum. Har vóru stórreiðarar, sum keyptu fiskin.

### Soltin kokking

Kokkingin var uppá tann máta, at tað vóru bara keks umborð. Skiparin, Klæmint Klein, hevði ført Arizonu árið fyri, minuárið 1920. Men teir komu ikki heim fyri minur, teir lógu túrin út. Nú var so, at tað trongdist í lastini, og teir høvdu verið inni á Seyðisfjørðinum og høvdu lagt keksatunnur upp. Vit skuldu taka tær umborð, nú vit koma inn á Seyðisfjørðin í 1921. Tær høvdu ligið uppí á landi síðan árið frammanundan. Á pílar ískot, nú var mølur í.



*"Vágbingur" TG 332 var í 1937 keypt norður til Havnar og fekk tá navnið "Sea King" TN 37. Tað var Albert A. Joensen, Albert hjá Jakki við Stein, sum keypti hana tá. Undir krígnum ivaðist eingin í, at hon var burturgingin, tá eingin hevði frætt frá skipinum í meira enn ein mánaða. Men teir komu kortini aftur, og tá var sum at manningin reis upp frá deyðum. Í 1945 broyttist navnið til "Norðstein". Hon rendi á eitt sker í Grønlandi 1950 og sakk.*



*Soleiðis lógu sluppirnar á Suðurlandinum.*

Eg hevði ikki lyst at eta hesar keks, so ungur sum eg var. Hinir ótu, hesir garvaðu sjómenninir vóru ikki so kræsnir. Tí kom eg at liva av berum fiski seinna partin av túrinum. Og veitst tú hví, tað var? Arizona hevði ein stóran damm. Hvørja ferð tað fekst ein smáfiskur, sum ikki var stórvegis skaddur, varð hann koyrdur í dammin. Eg kundi tí hvørja deksvakt krøkja ein fisk upp úr damminum, og so steikti eg. Vit fingu so ríkiligt av øðrum provianti umborð frá Lorvíks Jóannes, sum margarin, sukur og saltkjøt. Hesum var ríkiligt av. So eg steikti mær fisk hvørt kvøld. Annars fekst eisini vanligur døgurði. Fiskur annan hvønn dag og kjøt tríggjar ferðir um vikuna. Nátturðin var keks og margarin, einki annað. Umframt fekst te og kaffi.

Til morgunmatar fekst eisini keks, so tað var bert ein rættilig daglig máltíð. Men eg skal siga tær tað, at vit høvdu hetta deiliga amerikanska kjøtið, sum tað var gott! Tað vóru teir sum fingu sær kjøtið rátt sum viðskera, so gott var tað. Tað var so mikið ríkiligt kókað av tí, at tað sum leyp av, var viðskeri um kvøldarnar. Fyrst á túrinum hevði eg tó ikki lyst at eta saltkjøt og ertur. Eg fekk tað illa niður. Men hetta javnði seg. Eg livdi bara av fiski, men tað bar til.

Kokkurin bakaði einki. Eg hevði verið til skips í 10 ár, áðrenn eg smakkaði breyð. Men eitt gjørdu teir sunnudag. Annar av kokkunum, sum var við Arizonu, kókaði buding í einum bommblikki, sum hann setti niður í eina grýtu. Hin kokkurin plagdi at kóka mjølbollar. Kaka var eingin bakað, sum eg minnist til. Vit plagdu at fara inn til bøndur at keypa seyð, men hetta varð ikki gjørt, fyrr enn vit fóru heim. Seyðurin varð so flettur umborð.

### Fiskaðu uppí dammin

Nú koma vit til Langanes. Nú orðnar skiparin, at vit skulu fara at fiska uppí dammin til at fara niður við at selja. Tá bar jú ikki til at skera lippur. Tað bleiv talt á tann hátt, at tað vóru knýttir knútar fyri hvønn fisk. Síðumaðurin knýtti hjá mær, og eg knýtti hjá honum. Eg minnist ikki, hvussu nógvar fiskar vit høvdu, men tað gamla var, at teir kundu hava so nógvar fiskar í damminum, at tá teir settu ein haka niður í fiskin, skuldi hann ikki detta. Eg meini, at teir søgdu, at tann dammurin tók 3.000 fiskar, tí Arizona var eitt stórt skip. Teir fóru so niður við tí. Eg minnist ikki, um teir fóru til Danmarkar ella England. Eg var so ikki við niður.

Eg gjørdi so bert ein túr við Arizonu í 1921. Vit fóru onkuntíð fyrst í juni mánað. Tá skuldi man sleppa at vera heima 14 dagar frá suðurlandstúrin til torvskurð og annað heimaarbeiði.

Hentleikar vóru eingir, bert seglini at líta á. Motorar var bert nakað ein hevði hoyrt um. Við ljósi var tað soleiðis, at á dekkinum vórðu fyrstu árini nýttar "flagermýs", sum vóru innibygdar petroleumslampur. Seinnu árini nýttu vit carbidlampur. Hesar vóru góðar, men kundu eisini vera vandamiklar, sum tað fingust ræðuligar royndir av við "Acorn" í 1928,.

Í lanternunum vóru eisini petroleumslampur. Tær vórðu tendraðar á kvøldi og sløktar um morgunin. Tað vóru bestamenninir sum høvdu ábyrgdina av hesum og eisini av, at lanternurnar lýstu, tá tær skuldu lýsa.

Ravmagn kom ikki umborð fyrr enn seinni, og eftir at skipini høvdu fingið motor.



*Menn standa við snørið.*

### Soleiðis gekk tann túrurin

Annars var fólkateljing í Føroyum hetta árið, og samlaða fólkatalið var 21.352.

Eg minnist annars manningina sum var við fyrstu túrarnar eg var við "Arizonu" í 1921 og 1922.

### 1922

So er tað í 1922. Nú fari eg á Suðurlandið aftur við Arizonu. Og nú er pápi við, hann var ikki við summartúrin fyrra árið. Vit høvdu koyggju saman í kahúttini. Men vit vóru alt ov illa mannaðir, vit vóru bara 14 mans, ella nærri 14 tøl, tí eg var jú framvegis ein smádrongur, 15 ára gamal.

Tað var forferdiliga ringt veður á Suðurlandinum. Men tað man hava verið væl av fiski hendan túrin, tí vit fingu 11.500 fiskar, 14 mans. Tað var stórur fiskur á Suðurlandinum. Teir roknaðu 60 fiskar til skippundið (160 kg.). Hetta var ikki so tungt sum á Eysturlandinum, tí her var bert 60 favna vatn. Nú fortjenti eg nógv, tí fiskaprísurin var so góður. Vit fingu 56 oyru kg á Seyðisfjørðinum, men bara 50 oyru, um vit landaðu í Føroyum.

### Øll vaktin mundi farið fyri borð

Men eg kann minnast eitt trekk. Vit vóru 4 mans á vakt, ein var sjúkur. Vit lógu á stýriborðsháls, t.v.s. at vindurin kom inn á stýriborð. Vit høvdu fingið lítið av fiski, sum vit reinsaðu. Jógvan Garðshorn í Elduvík flakti, eg kruvdi og Tønner, bestimaðurin úr Skopun, hann avhøvdaði í fiskakassan. Nú fáa vit ein sjógv, og tú skal trúgva mær, at vit allir tríggir fóru. Eg minnist ikki, um eg fór millum skylettið og mesanmastrina, Jógvan fór aftur undir hekkubonkin, og Tønner lá á lúnningini beint til at fara yvirborð. Heini, Stóriheini, teir kallaðu, hann steikti í lugarinum. So har kundi øll vaktin farið yvir borð. Eg havi undrað meg yvir tað aftaná aftur, at man ikki skar seg við knívinum í hond.

Tað gekk bara gott við fiskarínum. Nú er tað, at vit koma av Suðurlandinum.

### Býttu frá

Hendan túrin býtti manningin sín part frá. Hetta var ein rættur, sum fiskimenn høvdu, og sum teir løgdu sera stóran dent á. Poul Klein, pápi skiparan, keypti partin hjá manningini, og hann turkaði hann. Ofta kundi bjóðast eini 2 oyru meira fyri kg fyri frábýttan fisk. Prísurin var góður, eg haldi, hann mundi liggja um 50 oyru kg.

So fara vit yvir aftur til Íslands, men nú er tað nýtt mannskap, men eg og pápi vóru við. Tað var eitt sindur ymiskt, hvussu menn bundu seg við skipinum. Viðhvørt mynstraði manningin fyri alt árið, soleiðis var tað ikki hjá okkum. Men vit blivu væl mannaðir, nú vit fóru avstað aftur. Vit vóru 18 mans, men ein maður, Jóan Fredrik Helmsdal, fór heim sjúkur. Vit gjørdu eitt gott ár.

### Síðsti vitnisburður hjá Fredag

Eg minnist í 1922, áðrenn "Norðlýsið" fór av Fuglafirði, nú hevur Fredag Petersen møti við handilin hjá gamla Sámal Petur. Fredag var kokkur. Eg minnist so væl, at eg stóð og lurtaði 15 ára gamal omanfyri trappuna norð-

**Framhald á næstu síðu**

an fyri forrætningina. Ljósið var ein flagurmús, ein lykt sum varð nýtt tá í tíðini. Eg meini, at eg fekk eitt lítið hefti við nøkrum sangum, og eg behelt tað. Men eg kann tó ikki minnast, hvørjir sangir, ið vórðu sungnir. Spurningurin er, um hetta hefti kann hava verið týðingar hjá Victor Danielsen. Hann gav fyrsta heftið við føroyskum sangum út í 1920, og tað næsta í 1922. Tað hevur verið fyrsta møti, eg havi verið á. Fredag, hann kom ikki aftur.

Teir skuldu til Grimsby við eini fiskalast og mynstraðu 6. oktober. Hildið var, at teir vóru farnir á land við Spurnhead í Onglandi náttina til 18. oktober. Sagt verður í eini frásøgn, at bjargingarbátur skuldi fara teimum til hjálpar. Men tað var ódnarveður, og tá so flóðin kom, blivu aldurnar sum hús. Manningin var farin upp í mastrina, og teir á bjargingarbátinum sóu menninar og hoyrdi teirra neyðarróp. Teir kundi bert hjálparleysir hyggja at. Men knappliga brotnaði masturin, og menninir hvurvu. Við vóru, umframt Fredag, Tummas Sigvald Thomsen úr Norðragøtu, Óla Jákup Jacobsen og Martin Johannesen úr Fuglafirði, Óli Andreas Hansen og Sámal Martin Samuelsen við Keldu úr Lorvík.

Einasta, sum kom aftur, vóru nakrar skipskistur, sum róku á land, og ein av teimum kom til Leirvíkar.

Fredag var 39 ára gamal. Kona hansara, Amalja, gekk við tí 10-unda barninum, tá Fredag fórst.

Fredag var annars kendur sum sera íðin prædikumaður, sum nýttu hvørt høvi til at vitna um sína trúgv. Hann var innlagdur á sanatoriinum og vildi fegin kunna seg um tað, sum stóð í Bíbliuni, men hann hevði ikki lært at lesa. Tískil útvegaði hann sær eina stavingarbók, og hjálptur av øðrum sjúklingum lærdi hann at lesa.

Hetta ár kemur fyrsti bilurin til Føroyar.

## 1923 við Vágbinginum

Men nú fer Klæmint at føra eitt annað skip, eitt vestmannaskip. Tað var "Ørvur", sum Funnings-Pól átti. Eg fór so í 1923 við einum suðuroyarskipi, "Vágbinginum", sum var ein lítil slupp. Teir á Tjørn áttu hana. Skipari var Julius í Smillum í Vági. Vit vóru 12 mans norðanfjørðs við, so hann sendi ein motorbát eftir okkum. Her vóru menn úr

**Fiskiveiðin við Ísland 1901-38**

| Ár | Skipatal | Manning | | Veiði í saltfiski tons | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Í alt | Pr. skip | Í alt | Pr. skip | Pr. mann |
| 1901 | 83 | 1122 | 13,5 | 2866 | 34,5 | 2,6 |
| 1902 | 82 | 1127 | 13,7 | 3166 | 38,6 | 2,8 |
| 1903 | 91 | 1287 | 14,1 | 3332 | 36,6 | 2,6 |
| 1904 | 101 | 1369 | 13,6 | 4339 | 43,0 | 3,2 |
| 1905 | 114 | 1533 | 13,4 | 3282 | 28,8 | 2,1 |
| 1906 | 111 | 1434 | 12,9 | 2351 | 21,2 | 1,6 |
| 1907 | 120 | 1455 | 12,1 | 3076 | 25,6 | 2,1 |
| 1908 | 121 | 1491 | 12,3 | 3139 | 25,9 | 2,1 |
| 1909 | 124 | 1600 | 12,9 | 4982 | 40,2 | 3,1 |
| 1910 | 129 | 1786 | 13,8 | 4023 | 31,2 | 2,3 |
| 1911 | 120 | 1600 | 13,3 | 3859 | 32,2 | 2,4 |
| 1912 | 117 | 1582 | 13,5 | 4003 | 34,2 | 2,5 |
| 1913 | 125 | 1775 | 14,2 | 4499 | 36,0 | 2,5 |
| 1914 | 139 | 1838 | 13,2 | 3543 | 25,5 | 1,9 |
| 1915 | 146 | 2028 | 13,9 | 4850 | 33,2 | 2,4 |
| 1916 | 142 | 2008 | 14,1 | 6347 | 44,7 | 3,2 |
| 1917 | 83 | 1221 | 14,7 | 3484 | 42,0 | 2,9 |
| 1918 | 113 | 1891 | 16,7 | 6689 | 59,2 | 3,5 |
| 1919 | 122 | 2005 | 16,4 | 7377 | 60,5 | 3,7 |
| 1920 | 141 | 2239 | 15,9 | 6654 | 47,2 | 3,0 |
| 1921 | 136 | 2209 | 16,2 | 11678 | 85,9 | 5,3 |
| 1922 | 145 | 2435 | 16,8 | 15572 | 107,4 | 6,4 |
| 1923 | 149 | 2539 | 17,0 | 13453 | 90,3 | 5,3 |
| 1924 | 146 | 2583 | 17,7 | 11398 | 78,1 | 4,4 |
| 1925 | 142 | 2556 | 18,0 | 10163 | 71,6 | 4,0 |
| 1926 | 154 | 2803 | 18,2 | 14013 | 91,0 | 5,0 |
| 1927 | 151 | 2732 | 18,1 | 14211 | 94,1 | 5,2 |
| 1928 | 155 | 2849 | 18,4 | 19225 | 124,0 | 6,7 |
| 1929 | 158 | 3120 | 19,7 | 21089 | 133,5 | 6,8 |
| 1930 | 158 | 3211 | 20,3 | 20607 | 130,4 | 6,4 |
| 1931 | 150 | 3045 | 20,3 | 21396 | 142,6 | 7,0 |
| 1932 | 144 | 3040 | 21,1 | 19189 | 133,3 | 6,3 |
| 1933 | 150 | 3195 | 21,3 | 18402 | 122,7 | 5,8 |
| 1934 | 155 | 3503 | 22,6 | 11068 | 71,4 | 3,2 |
| 1935 | 155 | 3420 | 22,1 | 11149 | 71,9 | 3,3 |
| 1936 | 151 | 3346 | 22,5 | 5244 | 34,7 | 1,6 |
| 1937 | 143 | 3157 | 22,1 | 7308 | 51,1 | 2,3 |
| 1938 | 145 | 3174 | 22,0 | 8140 | 56,1 | 2,6 |

*Hendan talvan vísir gongdina í okkara veiðu undir Íslandi. Sum tað sæst, hevur veiðan verið sera skiftandi ár fyri ár.*

Oyndarfirði, av Hellunum og úr Fuglafirði. Hon var eisini deyðsiglari, sum tey flestu skipini tá. Eg haldi, at vit vóru 18 mans við. Hetta var eitt púra mislukkað ár. Tað var lítið av fiski og ringur prísur. Eg fekk ikki meira enn 350 kr. hetta árið, og var hetta minni enn fyrsta túrin, eg var til skips.

Størsti munurin millum suðuroyaskip og skip norðanfjørs var, at við flestu suðuroyðaskipum varð provianturin býttur millum menninar. Men hetta var ikki galdandi fyri skipini á Tjørn. Sigast skal tó, at turt kjøt varð býtt millum manningina á skipum yvirhøvur. Tað varð goymt í lastini. Men annars riggaði illa at hava turt kjøt umborð á sluppunum.

## Í 1924 við "William Cloves"

Nú koma vit til 1924, og nú fari eg við William Clowes. Hon var bygd í 1884 og var 87,49 br. tons. Hon upprunaliga keypt í 1894 til Tvøroyri. Hon var keypt vestur í Vágar í 1913. Hon var seinni kend sum "Brimnes" hjá Hans Jacobsen á Toftum.

Nú eri eg nóg royndur til at sleppa við til at rigga til, áðrenn farið verður.

Eigari nú var Petur Hans hjá Nellu í Syðrugøtu. Tann, sum reiddi hana út, var Alex Petersen í Klaksvík. Hann var sonur Petur bakarin, og hann hevði Hvíthús, sum seglhúsmenninir høvdu seinni. Har handlaði hann. Pápi var við fyrsta árið, eg var við her, og Jóan Magnus har Niðri í Syðrugøtu førdi hana. Hon var eisini deyðsiglari, men var eitt so deiligt skip. Hon kom fram, um tað bert var ein grái á sjónum. Tað skuldu vera hon og "Elin", sum vóru bestu siglarar í Føroyum. Tað var nevniliga sera ymiskt, sum skipini sigldu. Eg minnist einaferð, at vit kappsigldu við "Elina" á Kolmunnagrunninum, eina ferð vit sigldu afturáaftur. Tað valdast sjálvsagt eisini eitt sindur, hvussu tað verður stýrt, men vit gingu heldur skjótari. Vit sigldu einaferð 11 míl við henni, tá vit komu av Suðurlandinum. Vit høvdu toppsegl og breiðfokku, og tað var vesturætt. Jóan Magnus var ein góður skipari, og eg skal bert rósa honum.

Tummas har Niðri, beiggi Jóan Magnus, var eisini við. Tummas var pápi Nikael Thomsen, hvørs søgu vit høvdu fyrr í ár her í blaðnum. Per og Niclas, synir Tummas, vóru eisini við. Eg haldi at Karl, beiggi teirra, var við ein túr eisini. "William Clowes" tók eini 400 skippund.

Tað gekk gott við "William Clowes". Tað var eisini so, at har tað gekk gott, har behelt skiparin eisini fólkið. Hetta var eisini nógv ungt fólk, um 18 ára aldur, og hesir mentust eisini, sum tíðin gekk.




*Hetta er eitt dømi um eina avrokning frá slupptíðini, sum vit hava fingið frá Arngrim Petersen í Kollafirði. Avrokningin er frá 1912, sum er árið, fiskimenn fyrstu ferð fingu sáttmála. Fyrst er at leggja til merkis upphæddirnar. Prísurin fyri stóran tosk er 22 oyru/kg. Í dag hevði hann verið einar 200 ferðir hægri. Manningin fær 1/3 av veiðuvirðinum at býta eftir fiskatalinum hjá hvørjum einstøkum. Parturin hjá manningini er kr. 1.367,31. Fiskatalið er 8.501, og gevur hetta 16,0841 oyru pr. stk. So neyvt varð gjørt upp, at her er nýttir fýra desimalir, hóast tað neyvan hevði broytt eitt oyra, um tað so vóru 3 desimalir. Sum tað sæst, er tað sera ymiskt, sum tað hevur vignast hjá hvørjum manni. Onkur serlig orsøk er til tølini hjá trimum teimum niðastu, men annars liggur talið millum 290 og 1061 og inntøkan var hareftir.*



*Systkini í Tarti í 1937. f.v. Andrias, Maria og Óskar, Katrina, Poli, Sigfried, Mikkjal við Alicu, Hans, Lina, Arne*

# Heilt nýggj skattaskipan?

**Edgar L. Feige professari, er føddur í 1937 og er ein av teimum kendastu búskaparfrøðingunum í USA. Hann hevur verið ráðgevi hjá útlendskum stjórnum og hevur skrivað nógv um skattaviðurskifti. Serliga hevur hann undrast yvir, at vit sum gera so nógv fyri at berjast ímóti kriminaliteti, lata narkotikahandil sleppa undan skatti! Hann hevur lagt uppskot um tann her umrødda transaktiónsskatt (APT) fram fyri ta nevnd, sum George W. Bush, forseti, hevur sett til at endurskoða skattalóggávuna í USA.**

Grundarsteinarnir í APT skattauppskotinum umfata einfaldgering, víðkan av skattagrundarlagi, minkingar í marginala skattinum, avtøku av inntøkuskatti og skattuppgerðum, og innkrevjing av skatti við gjaldskelduna. APT skattaskipanin er eitt uppskot, har skattagrundarlagið verður víðkað frá inntøku og nýtslu til allar pengatransaktiónir ella flytingar, fyri at allur kostnaður við innkrevjing verður burturbeindur, til frama fyri at innkravdi peningurin fer beinleiðis til almennan rakstur, og fyri at dúva uppá skeivleikan í skattagrundarlagnum, heldur enn uppá progressivitet í skattastiganum, fyri at tryggja rættvísi. APT skatturin kann samanberast við eitt alment meklaragjald, sum landið fær afturfyri veiting og viðlíkahald av fíggjarligum, juridiskum og politiskum stovnum sum skapa karmar og verja vinnu og handli.

Nýggja skattaskipanin hevur eittans endamál, at tryggja inntøkur til landið. Vit ganga við vilja uttanum spurningin um, hvussu stórur almenni bygnaðurin “skal verða” við at tosa um ein inntøkuneutralan skatt, sum fær somu upphædd inn í skatti, sum tann skipanin, APT skatturin er ætlaður at avloysa. Einfaldni verður tryggjað við at krevja, at allar endatransaktiónir verða skattaðar við sama ad valorem satsi. Eftirsum hvør transaktión má verða avroknað við onkrum endagjaldi, so verður skattur mettur og innkravdur leypandi við kelduna við elektroniskari tøkni gjøgnum eina automatiska banka- ella avrokningarskipan, í tí løtu handilsliga transaktiónin er gjørd galdandi við einum endagjaldi. Hendan sjálvvirkandi skipan avlívar tørvin hjá einstaklingum og feløgum at gera sjálvuppgávu og skattaroknskap. Leypandi skattainnkrevjing við gjaldskelduna ger seg galdandi fyri øll sløg av transaktiónum, og harvið gerst umsitingarkostnaðurin hjá øllum pørtum minni, og møguleikarnir fyri skattaundandrátti gerast minni.

Tað sum ger henda beinrakna skatt so einfaldan, er tann flati satsurin, sum verður lagdur á allar endatransaktiónir við einari endaligari flyting av valuta ella ein debet ella kredit á einari transaktiónskonto. Við tað, at skipanin kemur øllum frádráttum, undantøkum og tí skattainnkrevjingarkostnaði, sum býr undir núverandi skipan, til lívs, so vil APT skipanin seta gjøgnumskygni og eina lætt skilliga skipan ístaðin fyri fløktu og óskygnu skipanina, vit hava í dag. Burturbeining av skattaumsitingarkostnaði og skattahol fyri seráhugamál, hevði minkað um eggjanina til, í tráð við egináhugamál, at royna at fáa til vega skattafyrimunir, alt meðan skattabýtið gjørdist klárari. Politiska byrðan at fastleggja, hvussu almennar inntøkur skulu fáast til vega, og hvussu almennir pengar skulu brúkast, vildi við hesum verið flutt fullkomuligani til ta meiri gjøgnumskygdu uppgávuna at gera útreiðslusíðuna á fíggjarlógini.

Fjøldin av verandi skattaamboðum, innkrevjingarhættum og torgreidda lóggávan á økinum, hava skapt eina óskygda skattaskipan, har tað gerst nærum ómøguligt at staðfesta, hvussu skattabýtið er. Stiglitz (1986) vísir á møguleikan, at politikarum dámar slíka óklárheit “júst tí, at tað ikki er greitt, hvør betalir skattin”. Vælupplýstar avgerðir hjá einstaklingum og tí almennu skipanini, viðvíkjandi býtinum og støddini av almennum útreiðslum, krevja eina gjøgnumskygda skattaskipan, sum staðfestir skattabyrðu hins einstaka á ein rættvísan hátt. APT skattainnkrevjingin gevur av sær sjálvum størri gjøgnumskygni, tí at einstaklingum og fyritøkum nýtast bert at hyggja at samlað debet á teirra skattgjaldskonto fyri at vita, hvussu nógv tey gjalda í skatti.

Við einari stórari víðkan av verandi skattagrundarlagi, so loyvir APT skatturin eina munandi lækkan av marginala skattasatsinum í mun til núverandi inntøkuskatt og brúksskatt. Tí fangar hesin skatturin nógvar av effektivitetsfeilunum í núverandi skattaskipan. Tann mest týdningarmikli av hesum er lækkanin av marginala skattinum av lønarinntøku, sum í løtuni er á leið 75% av landsinntøkuni. Kravið um inntøkuneutralitet viðvíkjandi skattainntøkum hjá landinum inniber, at nógvar frívilligar nyttuframleiðandi transaktiónir (fyrst og fremst umbýti av fíggjarligum ognarrættindum), sum í løtuni eru óskattaðar, vildu verið skattaðar við hesi skipan. Hesi nýggju skattaøkini vilja vera atvold til nýggjar skjótingar í skattabýtinum og vildu havt avleiðingar fyri skiftinum, sum krevja meiri umhugsan.

Rættlætið og rímiligheitin í APT skattaskipanini hava sín uppruna í skattagrundarlagnum, sum er skeivari enn grundarlagið undir vanliga inntøku- og brúksskattinum. Tann ríkasti parturin av fólkinum fremur ein ósamsvarandi stóran part av samlaðu transaktiónunum, meðan parturin av transaktiónum, ið verður framdur av fátækasta partinum av fólkinum, er sera lítil, í mun til hvussu mong tey eru. Rættvísið í APT skattinum er grundað í skeivleikanum í skattagrundarlagnum, heldur enn gjøgnum progressivitet í skattastiganum.

Sum inntøkuneutralur skattur, so má APT skatturin per definitión yvirføra sama tilfeingi frá almenninginum til landið, sum verandi skattaskipan ger.

Um yvirføringin av tilfeingi kann fara fram við munandi lægri kostnaði, uttan at elva til størri nettoeffektivitetstap, so vil tað økja um vælferðina. Vit vilja føra fram, at burturbeiningin av núverandi skattaskipan til frama fyri nýggju APT skipanina, vil burturbeina størri skeiklingar, enn nýggja APT skipanin førir við sær. Hugskygnið aftanfyri hetta er, at víðkanin av skattagrundarlagnum loyvir eina tilsvarandi lækkan av marginalskatti á transaktiónir, ið verða skattaðar undir núverandi skattaskipan. Avlopsbyrðarnar fella ikki linjurætt við minkingunum í marginala skattasatsinum á hesar transaktiónir, ið í dag verða hart skattaðar. Hetta gagn verður sjálvandi partvíst vunnið við at innføra skatt á transaktiónir, ið ikki hava verið skattaðar frammanundan. APT skattur kollveltir samansetingina av transaktiónunum, ið mynda skattagrundarlagið.

Núverandi skipan skattar fyrst og fremst transaktiónir í samband við inntøku, framleiðslu og nýtslu. Størsti parturin av APT skattagrundarlagnum er yvirføring av ríkidømi og transaktiónir til umskipan av ríkidømi. Innføringin av einum marginalum skatti á hetta seinna nevnda virksemið, vil púra vist hava avleiðingar fyri býtið. Tá ein skattakíli verður gjørdur millum keyps- og søluprísin av fíggjarligum aktivum, so vil APT skatturin

stimbra undir, at fíggjarlig amboð verða hildin í longri tíðarskeið, enn tey verða hildin í dag. Skatturin vil eisini hækka kostnaðin av at baktryggja váða, at arbeiða við arbitrasju og at spekulera í fíggjarmarknaðum. Sum eg útdýpi seinni, so kunnu í hvussu so er summi av hesum skiftunum verða sosialt ynskilig, serliga har onkrir av hesum nýskattaðu aktivitetunum ávísiligani framleiða negativar eksternalitetir, sum skyldast ov nógvan óstøðugleika.

Netto virknaðurin av APT skattauppskotinum má verða mett við at samanbera relativu ágóðarnar og kostnaðirnar. Ballard, Shoven og Whalley (1985), ið brúktu roknaðar generellar javnstøðu myndlar at áseta vælferðarvirknaðin av øllum skattum í USA, mettu at marginalu deyðvektskostnaðirnir lógu frá 17% til 56% av inntøkuni frá skatti. Jorgensen og Yun (1991) mettu, at skipanin eftir skattaumskipanina í 1986 hevði ein marginalan effektivitetskostnað uppá 38% av skattainntøkuni og ein meðal effektivitetskostnað uppá 18% av skattainntøkuni. Tann størsti effektivitetságóðin av einum inntøkuneutralum APT skatti, er at hann kemur skeiklingum í skattaskipanini, sum hann skal avloysa, til lívs. Aðrir ágóðar eru stóru sparingarnar, ið verða tryggjaðar við betraða effektivitetinum av meting og innkrevjing av APT skatti, og útinningarhættum, sum minka um umsitingarkostnað hjá bæði gjaldara og innkrevjara.

APT skatturin førir við sær sínar egnu kostnaðir og skeiklingar. Millum møguligu skeiklingarnar, ið kunnu hugsast eru ein ífestingarávirkan, ið kann føra til vertikala integratión, eitt likviditetstap í fíggjarmarknaðunum, ein minking í stuttíðar arbitrasjutransaktiónum, ein leinging av tíðarbygnaðinum viðvíkjandi skuld og hvussu leingi fíggjarlig aktiv verða hildin, ein minking í mettum virði av aktivum vegna kapitalisering av framtíðar APT skattskyldu, ein skundan undir at søkja gjaldsalternativ og skattaból uttanlands, og seinast kostnaðurin av at umskipa skattaskipanina.

Summir búskaparfrøðingar hava framført, at lættleikin at innkrevja APT skatt eisini kundi minkað um mótstøðu í almenninginum móti, at tað almenna veksur - sokallaði “Leviathan” spurningurin í public Choice ástøðinum.

APT skattaumskipanin vil skapa vinnarar og taparar. Størsta ágoðan fáa tey, hvørs núverandi skattatrýst verður minkað munandi, fyrst og fremst løntakarar við sámiligari virðisbrævaogn. Tey, sum mest sannlíkt fara at síggja seg sjálvan sum taparar, eru einstaklingar og fíggjarstovnar sum hanga tætt saman við tí vinnuvegnum, tað er at handla við ognarrætti til fíggjaraktiv, og tey, ið selja ráðgeving í, hvussu ein juridiskt kann umganga verandi skattaskipan.

Ein flatur satsur loyvir Fíggjarmálaráðnum at brúka grundleggjandi diskontinuitetin í funktiónini fyri skattaumsitingarkostnaðin á báðum síðum, har sum alt búskaparligt býti verður skattað við sama lága satsi uttan frádráttir og undantøk. Slemrod (1990), Bird (1992), Alm (1996) og Kaplow (1996) gera greitt, at skipanin av tí best hóskandi skattaskipanini, veldst í høvuðsheitinum um umsitingarkostnað á báðum síðum, innkrevjingarkostnað og hvat tað kostar at umganga skipanina. Ein skattaskipan, sum lovar eina munandi minking í hesum kostnaðum, gevur orsøk til nærri kanning.

## FF-blaðið kemur út aftur 26. oktober

FF-blaðið fer nú í seinkaða summarfrí, og tað kemur út aftur 26. oktober. Tá verður framvegis nógv spennandi tilfar, og millum hetta verða eisini ferðafrágreiðingar frá Ísrael. Umframt vanligu ferðamálini er ætlanin at hyggja at fiskivinnuni í landinum, at vitja stóra fakfelagið Histradut, og at vitja Nomi Yeshua, sum er skrivari hjá fyrrverandi borgmeistaranum í Jesrusalem, Teddy Kollek, sum vit hava umrøtt fleiri ferðir her í blaðnum m.a. vegna hansara samband við so ymiskar persónar sum Jóhan Niclassen í Hesti og Adolf Eichmann! Vitjað verður eisini heima hjá teimum í Føroyum sera kendur hjúnum Honnu og Menakhem Ben-Yami.

Vit hava tá eisini 3. part av Andreas í Tarti, sum gevur okkum enn eitt íkast til søguna hjá føroyskum fiskimonnum.

Hetta blaðið, tygum hava í hondini, kemur í hvørt hús, og nýggir haldarar fáa tað ókeypis restina av árinum sum lýst aðra staðni í blaðnum.

## Fiskivinnustudningar eru minkaðir við 95%:

# Eisini takkað verið Fiskimannafelagnum

Í samband við ta herferð, sum í hesum døgum hevur verið móti fiskivinnu og fiskimonnum sum “studningsnassarar”, kunnu vit ásanna, hvussu skjótt fólk gloyma tað, sum annars hevur gingið fyri seg.

Tí fara vit at tríva eitt sindur aftur í søguna á hesum øki. Fyrst skal sigast, at tað er sera lætt at vera bakklókur. Viðurskiftini síggja heilt annarleiðis út, tá ein er mitt í teimum, enn tá hugt verður aftur um bak. Tá kundi nógv verið skrivað um hetta mál, men hendan greinin skal mest metast sum ein stuttur samandráttur.

Søgan byrjar mitt í 70-unum, tá vit fara at leggja um frá fjarfiskiveiðu til veiðu undir Føroyum. Tey botnfiskasløg, sum vóru tey avgerandi á okkara leiðum, vóru toskur, hýsa og upsi. Tey fyrru fiskasløgini vóru dýr, meðan upsi var bíligur. Fyri at spara tey dýru fiskasløgini, varð tað mett rætt at stuðul varð latin til at fiska upsa. Hetta eydnaðist eisini sera væl.

Skipanin tá var tann, at vit høvdu ein ráfiskagrunn, og tað var gjøgnum hann, at stórur partur av stuðlinum varð latin.

Skipanin við ráfiskagrunninum var, at hann fyrst tryggjaði virkjunum, og teimum varð tryggjað sama úrtøka pr. kg. fisk, uttan mun til inntøkur og útreiðslur. Hetta gekk væl, tá prísirnir fóru upp, men var ein vanlukka, tá prísirnir fóru niður og útreiðslurnar fóru upp. Tá fór ein størri og størri partur av marknaðarvirðinum á fiskinum til virkini,

Tabel 4.14. Fiskeristøtten fordelt på støtteordninger 1984/85 - 1989.

| | 1984/85 | 1985[1] | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | - mill. kr. - | | | |
| Mindsteløn | 12,0 | 5,5 | 12,2 | 10,4 | 42,5 | 43,5 |
| Udroerstøtte | 23,4 | 18,8 | 22,1 | 18,8 | 17,6 | 26,2 |
| Landingstilskud, ferske fisk | 29,3 | 17,5 | 22,1 | 19,6 | 21,7 | 23,9 |
| Industrifisketilskud | 8,6 | 10,3 | 19,3 | 25,9 | 2,0 | 2,7 |
| Olietilskud | 43,1 | 10,4 | 3,8 | 0 | 0 | 0 |
| Tilskud fra råfiskefonden | 98,9 | 37,7 | 85,7 | 61,4 | 199,4 | 232,0 |
| Agntilskud | 7,5 | 8,0 | 4,7 | 7,7 | 0 | 0 |
| Driftstilskud | 148,9 | 83,5 | 87,0 | 66,4 | 88,4 | 94,8 |
| Andre tilskud | 34,0 | 14,3 | 33,6 | 56,2 | 35,4 | 39,9 |
| Ialt | 405,7 | 205,5 | 294,4 | 266,4 | 407,0 | 462,8 |
| I pct. af landskassens indtægter[2] | 28,7 | 16,8 | 15,9 | 11,9 | 17,4 | 20,3 |
| I pct. af eksportværdien af fiskevarer | 24,8 | 15,0 | 15,7 | 14,1 | 20,4 | 19,9 |

*Hendan talvan vísir játtanina á fíggjarlógini seinna partin av 80-unum. Taka vit tølini fyri 2005 er talan um 30 mill, og prosentparturin av fíggjarlóg og fiskaútflutning liggur um 1%. Talan er tískil um eina minking uppá 95% ella meira. Hetta skuldi glett Vinnuhúsið! Men...*

meðan tilsvarandi minni var eftir til prís at gjalda skipum og fiskimonnum. Tá gjørdist trýst á politisku skipanina at hækka studningin, og hetta gjørdu vit eisini, og var hetta ikki so løgið sum skipanin var.

### Vit komu við fyrsta ítøkiliga uppskoti um marknaðarbúskap

Men í 1985 gjørdu vit vart við í okkara ársfrágreiðing, at tað kundi ikki vera rætt, at fiskaprísir skuldu vera heftir at játtan á fíggjarlógini. Vit fóru síðan at arbeiða við einum uppskoti um, hvussu vit kundu sleppa burtur úr hesum.

Í 1986 høvdu vit á Fiskivinnutingi eina framløgu, sum viðgjørdi hetta mál um prísáseting. Tá løgdu vit fram eitt uppskot um marknaðarbúskap fyri flakavirkini. Heldur enn at fáa tryggjað eitt ávíst krónutal pr. kg. fisk, tey tóku ímóti, at gjalda teirra útreiðslur við, skuldu tey fáa ein prosentpart av tí virði, tey framleiddu í sín part. Hetta vildi geva teimum ein heilt annan áhuga í at økja um inntøkurnar við hægri prísum og eisini at minka um útreiðslurnar, tí tá kom hetta teimum tilgóðar. Samstundis varð lagt fram ítøkilig ætlan um, hvussu stuðulin gjøgnum ráfiskagrunnin við hesi skipan kundi verða avtrappaður.

### Var kollveltandi tá

Okkara uppskot um marknaðarbúskap ljóðar ikki serliga kollveltandi í dag, men í 1986 var hetta ein nýhugsan.

Sett varð nevnd at arbeiða víðari við hesum. Her komu ymsir tvørleikar inn, sum seinkaðu málinum, men í 1988 varð okkara uppskot samtykt orðarætt í tinginum.

Tá vóru vit mitt í eini marknaðarkreppu, sum seinkaði íverksetan av skipanini. Hon kravdi eisini eina hugburðsbroyting hjá flakavirkjunum, sum í fyrstuni høvdu hug at andøva ímóti hesi broyting.

Men ársskiftið 1989/-2000 varð okkara uppskot eftir drúgvar fyrireikingar sett í verk. Og marknaðarskipanin fór at virka beinanvegin, tá virkini so smátt fóru at kappast um fiskin við hægri prísum.

Hvussu ringt tað var at fáa menn at góðkenna hugskotið við marknaðarbúskap fyri flakavirkini, sást tá tað sokallaða “fiskivinnuuppritið” varð sett í verk í 1991. Tá samtykti løgtingið at seta í verk aftur ta koddaskipan og planbúskap fyri flakavirkini, sum júst var orsøkin til búskaparligu vanlukkuna í 1980-unum, og sum vit beint vóru sloppin av við.

Tískil samtykti tingið, at nevnd skuldi aftur setast, sum grundað á staðfestar inntøkur og útreiðslur hjá virkjunum skuldi áseta fiskaprísirnar. Samb. hesi lóg skuldi FF velja lim í slíkari nevnd. Men vit mettu hetta vera slíkan ørskap, at vit noktaðu at velja nevndarlim, og tí kom nevndin als ikki at virka.

Hetta var beinleiðis orsøkin til, at vit fingu eina heilt fría kapping um fiskin. Stuðlað varð uppundir hesa kapping við Fiskamarknaðinum, sum greitt er frá í aðrari grein í blaðnum. Úrslitið varð, at tað nú fekst munandi meira fyri fiskin uttan studning enn tað fyrr fekst við studninginum. Vit hava fyrr kallað hetta eitt búskaparligt undur.

### Studningurin mestsum burtur

Vit endurgeva eina talvu úr ársfrágreiðingini hjá ríkisumboðsmanninum, sum vísir hvat varð goldið á fíggjarlógini til fiskivinnuna seinnapartin í 1980-unum. Sum tað sæst, vóru upphæddirnar fleiri hundrað milliónir, og hægst vóru tær í 1989 við 463 mill. krónum.

Síðan er gongdin broytt munandi, og tann upphædd á hesi uppgerð, sum Vinnuhúsið hevur so ilt í reyvina av, liggur um 30 mill kr.

Vit kunnu eisini sammeta við gongdina á fíggjarlógini og í mun til útflutningin av fiskavørum.

Her síggja vit, at í 1984/-85 fóru um 29% av fíggjarlógini til fiskivinnuna. Í mun til fiskaútflutningin var tað 25%. Í 2005 er talan um ca. 1% í báðum hesum førum. Verður sammett við árini fram til 1989, kann sigast, at stuðulsskipanir eru minkaðar á fíggjarlógini og eru minkaðar við 95-97%.

Tað eru sjálvsagt nógvir ymiskir faktorar, sum hava spælt inn í hesi gongd. Men tann týdningarmesti er hóast alt “umvendingin” frá planbúskapi til marknaðarbúskap.

Her átti Fiskimannafelagið sín virkna leiklut, og eiga vit tí eisini okkara part í hesi “successøgu”.

Vit arbeiða nevniliga seriøst fyri at gera vinnuna so burðardygga sum møguligt, tó við atliti til tær serligu umstøðurnar sum eru í hesi vinnu.

Hetta gera vit á einum sakligum grundarlagi. Men vit lata okkum ikki renna um koll av kreftum, sum telgja sær ein veruleika, sum júst hóvar til teirra endamál, sum vit fyrr hava sæð hjá Búskaparráðnum og nú við Vinnuhúsinum.

So er tað sagt!

# Viðvíkjandi myndini ovast á síðu 16 í seinasta blaði - nr. 375



Tað er nú einaferð soleiðis, at tá ið ein mynd kemur “skeivt fyri”, er ofta ringt at fáa hetta rættað. Henda myndin er <u>ikki</u> av Skoratindsrættini í Oyndarfirði. Henda myndin er tikin í 1898 ella 1899 av **<u>Kálvmannarætt</u>** á Sandi.

Henda mynd stendur í bókini hjá fólkalívsfrøðinginum Holger Rasmussen: *Færøske kulturbilleder*, sum kom í 1950, men einki stendur hvaðani hon er. Tá ið Edward Mitens skrivaði sínar bøkur “Eg minnist”, var tann eina um hansara skeið sum sýslumaður, fólkatingsmaður og sakførari. Hann var nevniliga settur sýslumaður í Eysturoy fyri Andrass Samuelsen, tá hesin møtti á ríkisdegi. Í hesi bókini, sum kom út í 1964, hevur hann sett 92 myndir millum síðu 80 og 81. Tær allar flestu eru úr Eysturoy, og í flestu førum stendur í myndatekstinum, hvar myndin er tikin. Ein av hesum 92 myndum er hon av Kálvmannarætt, og undir henni stendur bara: *Á rættini*. Hesa og onkra aðra hevur Mitens helst fingið úr omanfyri nevndu bók.

Hetta man vera orsøkin til, at eysturoyingar hava hildið myndina vera tiknað onkustaðni í Eysturoy. Tá ið so *Oyndarfjarðar søga* hjá Freydis Poulsen kom út í 2004, er myndin endurgivin har á síðu 16, og nú eru menninir navngivnir. Maðurin í miðjuni stendur at vera Jógvan í Billustovu. Á síðu 14 er mynd av sama Jógvani í Billustovu. Tað er ikki trupult at síggja, at myndirnar eru <u>ikki</u> av sama manni.

Ein av soldátunum, ið var við at máta upp í Sandoynni í 1898, skrivaði dagbók, og henda dagbók er komin til Føroya. Saman við dagbókini eru eisini fleiri myndir úr Sandoy, Dímun og Suðuroy. Teirra millum er henda myndin, og undir stendur: *Fåreklipning paa Sand.*

Eg vóni, at hetta greiðir ivaspurningarnar um hesa mynd. Vit hava endurgivið hana í Kvørnini nr. 7 á síðu 47.

*Ólavur Clementsen*

# "Ran" gjørt góðan túr á nýggjari leið

Tað var tíðliga í fjør at nakrir ungir mans keyptu "Ljósafelli". Millum hesar er tann 30 ára gamli Heri Godtfred og brøður hansara. Heri hevur verið skipari á "Roc Amadour", og gekk tað stak væl. Teir veiddu búrfisk, og royndist hetta so væl, at teir fingu hug til at fáa sær størri og betri skip og harvið fáa øktar møguleikar.

"Ljósafelli" skifti navn og eitur nú "Ran". Hann fekk fiskiloyvini, sum "Ljósafelli" hevði, men afturat hesum er tørvur á fleiri veiðumøguleikum í altjóða sjógvi. Her kom búrfiskurin í fremstu røð, sum eisini framvegis hevur givið fitt av sær. Men tað eru eisini aðrir møguleikar í altjóða øki sum t.d. at royna eftir kongafiski, hóast hann eisini verður meira og meira avmarkaður vegna kvotuásetingar.

Ætlanin var bæði at frysta veiðuna og at landa feskt, men vegna høgu oljuprísirnar sleptu teir ætlanini við festfiskaveiðu og hava ístaðin fryst alla veiðuna umborð.

Sum nýhugsan hava teir ísmaskinu umborð, og gevur hetta møguleika at ísa fiskin beinanvegin, hann kemur á dekkið, so hann kann varðveita góðskuna, til hann verður frystur.

Reiðari er Hans Andreas Joensen í Hósvík, sum eisini er ein framburðsmaður innan fiskiskap.

### "Ran" gjørt góðan túr á nýggjum leiðum

"Ran" hevur eisini roynt heilt nýggjar veiðumøguleikar. Seinasta heyst komu teir heim við einum hampiliga góðum túri. Teir høvdu 370 tons av skráskornum kongafiski eftir at hava verið burtur í 6 vikur. Tað spennandi í hesum var, at teir høvdu roynt á nýggjum leiðum hendan túrin. Teir vóru í altjóða sjógvi millum Jan Mayen, Bjarnoynna og Svalbard, og eingin veit um, at fiskiskip frá okkara parti av Norðuratlantshavinum hava roynt har áður.

Mikudagin í seinastu viku komu teir heim aftur av einum góðum túri í sama øki. Túrurin vardi í knappar tveir mánaðir. Teir royndu í fyrsta umfari vestanfyri á einum NAFO-øki, men hetta gav ikki ta stóra. So fóru teir aftur á ta leiðina, teir funnu í fjør.

Her var rokfiskiskapur. Teir fingu um 20 t av lidnari vøru um samdøgrið, so tað tók ikki langa tíð at fylla lastina, umleið 453 t, sum verða landað í Kollafirði. Samanumtikið er hetta ein góður túrur, hóast kongafiskurin, sum fæst her, er eitt sindur smærri enn vestanfyri, og prísurin er eitt sindur lægri. Fiskurin verður skráskorin og frystur.

Teir hava roynt norðuri á 73 stigum. Meðan teir vóru einsamallir í fjør, var nú fult av skipum, tó vóru bert 3 teirra føroysk. Her var fult av "sjórænaraskipum" og minst 15 íslendskir trolarar.

Tað er lætt at rokna út, at tað verður ikki leingi afturat, at tað verður frítt at fiska her og at kvotur verða ásettar. Fiskifrøðingar eru eisini stúrnir. Hetta er eisini væl skiljandi. Men við trimum føroyskum og 15 íslendskum trolarum er ikki ringt at rokna seg fram til, hvør ið hevur tey størstu søguligu rættindini at vísa á til ta tíð.

Spurningurin er so, um vit enn einaferð hava ligið sjóvarfallið av okkum. Ein virkin fiskivinnupolitikkur átti at eggjað teimum skipum, sum hava møguleika fyri tí, at farið á hesar leiðir og fiskað so nógv sum gjørligt. Hetta kundi eisini komið hesum skipum til góðar seinni við teimum rættindum, sum hetta hevði havt við sær.

Viit kunnu bert fegnast um, at vit hava dugnaligar og raskar fiskimenn, sum ikki bakka fyri at royna nýggjar leiðir, og vit ynskja teimum góða eydnu, nú teir fara avstað aftur.

Vit vóru á keiuni, tá "Ran" kom aftur. Tað var stuttligt at síggja hesa hugaligu manning, har fleiri eru blaðungir dreingir. Hetta gevur vónir um, at tað skal kunna bera til at seta nýtt ættarlið av fiskimonnum við.



*"Ran" søkklaðin at bryggju.*



*Gott er at hava fingið fast undir føti aftur.*



*Skiparin John Mikkjal Godtfred t.v. saman við Símun Einarsson, sum er stýrimaður.*



*Nú verður stuttligt at sleppa í land.*



*"Ran" er farin avstað aftur, og skipari nú er Heri. Her sæst hann saman við gentunu Rannvá.*



*Mamman og systrar komnar at taka ímóti*

# Løgmaður: Inntøkutrygdin er ikki stuðul



*Strategibólkurin hjá løgmanni*

Á visiónstorginum tann 11. september var eitt av evnunum "studningsskipanir". Her var skotið upp at avtaka alt tað, sum kann kallast studningur.

Millum hetta eru skipanir hjá fiskimonnum viðvíkjandi skatting og inntøkutrygd. Vit hava greitt frá hesum málum aðra staðni í blaðnum. Her kann fáast ein ábending um, at hesi mál ikki eru so einføld, sum tað kann skiljast á framløguni hjá strategibólkinum, har hvørt av uppskotunum fyltu eina reglu.

Fyrst skal nevnast, at tað tykist at vera komin ein hugburður hjá eini akademiskari kliku, at alt, sum eitur studningur, er av tí illa. Tí ræður um at fáa beint allar studningar av vegnum, og her vanda menn sær ikki um mannagongdina, sum vit hava so mong dømi um.

Hesi sjónarmið verða heldur ikki nakað serliga væl undirbygd. Her er talan um eina religión, har ein antin er frelstur ella vantrúgvandi. Hetta kann vera rættiliga vandamikið, í hvussu er í verðsligum viðurskiftum.

## Studningur er politikkur

Veruleikin er tann, at studningur er ein háttur at reka politikk, og tað er upp til politisku skipanina at avgera, hvussu hetta verður gjørt mest skilagott, og so noyðist umsitingin at laga seg eftir tí.

Tað kann væl ásannast, at tað hava verið studningar, sum hava verið skaðiligir, men hesum skulu vit bert læra av, og tað hava vit eisini gjørt. Her liggur parturin hjá Fiskimannafelagnum heldur ikki eftir.

Tað vísir seg, sum at henda klikan hevur fingið eitt "gott" eyga til fiskimenn. Tær sømdir, sum hesir hava fingið av samfelagnum, eru fyri støðugum álopi, meðan tað als ikki verður hugt eftir nøkrum sum helst øðrum skeivleikum í samfelagnum.

Eitt dømi um hetta er FAS. Vit skulu fyrst siga, at vit taka undir við hesi skipan sum eitt skilagott stig fyri at stimbra eina vinnu, sum kann geva arbeiðspláss og inntøkur til samfelagið.

Men júst somu grundgevingar, sum verða nýttar móti fiskimonnum, kunnu nýtast ímóti FAS skipanini. Tað kann í hvussu er sigast, at her er talan um ein beinleiðis stuðul til arbeiðsgevarar. Men hetta verður ikki tikið uppá tungu í framlagda tilfarinum, tí nú er skeggið ov nær høkuni.

Strategibólkurin hevði eisini á fundinum sera ringt við at finna grundgevingar fyri ikki at taka FAS við í sínum tilmæli um avtøku. Víst varð til, at hetta var meira kompliserað, tí onnur lond høvdu líknandi skipanir, og so var ikki bert sum at siga tað at avtaka skipanina. Tað sama sjónarmið kundi annars verið brúkt um sjómannaskattin, sum vit eisini hava útgreinað aðra staðni í blaðnum.

Fatanin av fundinum 13. september er, at viðgerðin í visjónsbólkinum hevur verið ótrúliga lættisoppakend. Uppskotið er at kuta, har sum tað var lættast, sum landbúnaðarstuðul, undantak frá MVG, rentustuðul. Ein hevði væntað grundgevingar og konsekvensmetingar. Her er ikki eitt orð á skrift og nærum einki munnligt. Talan er fyri okkara øki bert um eina kopiering av Vinnuhúsinum, har ein av ideologunum er Milton Friedman, sum er kendur sum ein náðileysur búskaparfrøðingur, sum ikki tekur minsta atlit til avleiðingarnar.

Í hesum førinum valdast tilmælini, hvønn tað snýr seg um. Tað er meira takksamt at leggja eftir fiskimonnum enn eftir reiðarum. Tí kunnu hesi tilmæli ikki takast fyri fult.

Bjarni Djurholm segði eisini á fundinum, at tað kom ikki uppá tal at avtaka FAS. Um nakað skuldi hon útbyggjast. Hann tosaði eisini um at gera eina skipan við stuðli til skipasmiðjur at byggja skip, og hetta ljóðaði sum eitt sera gott hugskot.

## Løgmaður greiður

Tað skal sigast, at løgmaður var sera greiður á visjónsfundinum. Hann segði seg als ikki vera ósamdan við sjónarmiðini hjá FF, sum tey vóru sett fram. Hann metti heldur ikki t.d. inntøkutrygdina sum ein "stuðul". Hetta var ein "trygging", sum á ein ávísan mun skuldi líkastilla fiskimenn við aðrar inntøkubólkar. Tað tyktist ikki, sum at tað lá í kortunum hjá honum at fylgja strategibólkinum. Tað sama førdu Bárður Nielsen og Bjørn Kalsø fram.

Tí er fyri so vítt eingin vandi á ferð, sum er. Tað, sum undrar okkum, er, at fólk í almennu umsitingini nýta sínar kreftir uppá viðurskifti, sum tað er trupult at finna grundgevingar fyri, og sum tey vita ongan møguleika hava fyri at vinna frama.

Vit kundu nevnt ein hóp av meira nærliggjandi málum, sum hesi fólk kundu nýtt sínar kreftir uppá. Nevniliga at fáa egnu fyrisiting at virka samsvarandi teimum krøvum, sum borgarin má hava loyvi at seta í 2006. Vit hava ovmikið av dømum um, hvussu illa tað stendur til her. Men hesin spurningur verður als ikki so mikið sum tikin uppá tungu. Einasta uppskot á hesum økinum er at savna alla umsiting á einum stað. Hetta er so sanniliga at stinga høvdið í sandin.

Aðra staðni eru tey ymsu aðalráðini spjadd umkring, men hetta er eingin forðing fyri at hava eina í mun til Føroyar vælvirkandi umsiting. Í Danmark hava teir skipaðar mannagongdir fyri málsviðgerðir. Nakað sum ikki eksisterar í føroysku umsitingini.

## Tá er tað so nógv lættari at leggja eftir fiskimonnum!

Hetta ger eisini, at fiskimenn føla seg ótryggar, og tað skilja vit væl serstakliga, tá vit hyggja at mannagongdunum, sum verða nýttar. Men vit vilja berjast sum úlvur á skóg móti hesum ágangi móti fiskimonnum.

K. NR. 6 FRÁ 15.02.1996 UM ÁSETAN AV AFTURBERINGARPROSENTINUM TIL REIÐARAVIRKIR, SUM HAVA SKIP, IÐ ERU SKRÁSETT Í FØROYA ALTJÓÐA SKIPASKRÁNNI FAS.

Við heimild í § 63 a, stk. 3 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum hevur landsstýrið fyriskett:

**§ 1.** Reiðaravirkir, sum lúka treytirnar í § 63 a í samtíðarskattalógini, og sum rinda persónum skattskyldugum í Føroyum løn, samsýning v.m. fyri tænastu umborð á skipum, ið eru skrásett í FAS, fáa afturborið ein part av útgoldnu lønunum, samsýningunum v.m.

*Stk. 3.* Landsstýrið hevur ásett afturberingarprosentið til at verða 28% árliga.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er galdandi frá 1. januar 1995.

*Her síggja vit prógvið fyri dupultmoralin og samanspælið millum Vinnuhúsið og visjónsbólkin hjá løgmanni. Her er talan um kunngerðina fyri FAS, sum er ein heilt greið studningsskipan. Men hon er til limir í Vinnuhúsinum, og tí verður hon ikki tikin uppá tungu hjá hvørgum av strategibólkunum. Hetta sigur alt um trúvirðið hjá pørtunum í hesum málinum. Hjá okkum er støðan greið. Vit taka undir við FAS, og tí kunnu vit eisini taka undir við verandi fiskimannaskipanum. Vinnuhúsið vísir til at teir eins væl kundu farið undir DIS, men hetta er ein enn størri studningsskipan, har ikki eitt oyra hevði komið í landskassan.*

DEKKMASTER.FO
Fastir, lágir prísir
Bílig og góð dekk til persónbilar, vøruvognar & jeepar ...eisini øll tey kendu
...tá ið prísurin eisini er avgerandi!




Prísdømi – summardekk

| | |
|---|---|
| 175/70-13 | úr 540,- |
| 175/65-14 | úr 620,- |
| 185/65-14 | úr 650,- |
| 195/50-15 | úr 675,- |
| 195/65-15 | úr 695,- |
| 205/40-17 | úr 965,- |
| 225/45-17 | úr 995,- |
| 225/40-18 | úr 1.290,- |

Um tú ikki hevur hug at brúka uppsparingina uppá dekk, ber til at vitja inn á dekkmaster.fo og bíleggja bílig dekk beinleiðis á alnetinum.

Sum nakað serstakt bjóða vit eisini kundum okkara eina heildarloysn, har bilurin verður avheintaður og koyrdur uppá pláss aftur tá dekkini eru ásett.

DM DEKKMASTER
www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000

## Visjón 2015:

# Avtøkan av trygdini hjá fiskimonnum

**Sum umrøtt í fjølmiðlunum var í seinasta viku fundur í visjónstorginum, har skotið varð upp at avtaka sjómannaskattin og inntøkutrygd fiskimanna. Í hesum sambandi sendu vit løgmanni skriv, har m.a. varð sagt:**

Í arbeiðssetninginum hjá bólkinum "samfelagsbygningur" er "ávísar studningsskipanir" ein partur av arbeiðsøkinum. Vit hava ikki fingið nakra ábending um, hvat ið kann liggja í hesum. Men í tann mun talan er um øki, sum viðvíkja áhugamálum hjá fiskimonnum, meta vit tað sum eina sjálvfylgju, at vit eru fullgyldigir partar av viðgerðini.

### Kollveltandi uppskot í einari reglu seinasta arbeiðsdag undan fundinum

Ikki fyrr enn fríggjadagin 8. september fingu vit framløguna hjá strategibólkinum. Viðvíkjandi okkara áhugamálum var framløgan soljóðandi:

### Kollveltandi broytingar

Her er talan um tilmæli, sum vilja hava sera kollveltandi ávirkan á viðurskiftini hjá fiskimonnum. Eftir okkara tykki er talan um uppskot, sum er beint í stríð við ta stóru visiónsætlanina at tryggja og útbyggja vælferðina hjá borgarunum.

Skal nakað inntriv gerast, kann hetta ikki verða gjørt við bert at grunda seg á sjónarmið frá einum parti í málinum.

Tað mest inngrípandi er uppskotið um at avtaka inntøkutrygdina hjá fiskimonnum. Henda hevur verið ein avgerandi partur av trygdini hjá fiskimonnum og eisini hjá fiskiflotanum í meira enn 50 ár. Hjá fiskiflotanum hevur henda skipan gjørt, at tað yvirhøvur hevur verið møguligt at fáa støðuga manning.

Og nú verður í einari reglu í framlagda skjalinum mælt til at taka hesa skipan av, og tað finst ikki minsta vet av grundgeving. Hetta fáa vit fyrilagt seinasta arbeiðsdagin undan, at hetta skal koma til umrøðu á visjónstorginum saman við 30 øðrum málum!

### Framlagda uppskotið identiskt við tað hjá Vinnuhúsinum

Tað, sum vit tó meta sum tað mest merkisverda við hesum tilmæli hjá visjónsbólkinum, er, at tað á hesum økinum er í høvuðsheitum identiskt við tilmælið hjá strategibólkinum hjá Vinnuhúsinum, sum eisini kom fram í seinastu viku.

Tað, sum er felags fyri bæði tilmælini, er:

1. Uppskotið um at avtaka sjómannafrádráttin
2. Uppskotið um at avtaka inntøkutrygd fiskimanna.
3. Tilmælið um at tann hervið spardi peningur skal minka um tann generella skattastigan.
4. Í báðum førum verða studningsskipanir til arbeiðsgevarar slettis ikki tiknir uppá tunguna, hóast teir falla væl innanfyri arbeiðssetningin hjá bólkinum. Hetta er serstakliga galdandi fyri FAS-skipanina, sum er ein beinleiðis stuðul til limir í Vinnuhúsinum.

### Hvat gongur fyri seg í loyndum?

Hetta samanfall millum frágreiðingarnar hjá hesum báðum strategibólkum kann ikki vera av tilvild. Her er talan um okkurt slag av samanspæli og samskifti, sum vit onnur ikki vita um.

Tað eru tveir møguleikar. Annar er, at strategibólkurin hjá visjón 2015 síðan mánadagin hevur kopierað útspælið hjá Vinnuhúsinum og nú leggur tað fram sum sítt egna. Hetta má so vera hent uttan nakra viðgerð, tí til tess hevur ikki verið nøkur tíð. Um hetta er galdandi, so sigur hetta nógv um, hvussu seriøst arbeiðið hjá visjón2015 bólkinum er.

Tað, sum vit meta at vera eins sannlíkt, er, at tað hevur verið eitt loypandi samskifti millum báðar strategibólkarnar, og at teir hava samskipað síni sjónarmið, sum tey nú verða kunngjørd í somu viku.

Hetta setir tann sera viðkomandi spurning, hvat tað er, sum gongur fyri seg aftan leiktjøldini, og hvat samanspæl ið hevur verið millum bólkarnar.

Uttan mun til hvør frágreiðingin er, meta vit tað at vera sera álvarsligt, at ein uttanfyristandandi áhugabólkur á hendan hátt kann ávirka niðurstøðurnar hjá einum sokallaðum serfrøðingabólki, sum skuldi verið óheftur av sersjónarmiðum uttanfyri bólkin. Í hvussu er tá talan er um slík einvís sjónarmið, sum tað her er talan um.

Her eru mál, sum serstakliga viðvíkja áhugamálunum hjá fiskimonnum. Talan er um skipanir, sum eru væl grundaðar og undirbygdar við tí endamálinum at geva fiskimonnum eina trygd. Tað er eingin frá visjónsbólkinum, sum hevur kontaktað okkum hvørki eftir upplýsingum ella grundgevingum í teirra viðgerð.

Tað sæst eisini í keldunum til framløguna hjá Vinnuhúsinum, at okkara sjónarmið um hesi mál hava als ikki verið við í viðgerðini.

### Er visjónsbólkurin stýrdur av Vinnuhúsinum?

Hinvegin hevur strategibólkurin hjá Visjón 2015 "slúkt" sjónarmiðini hjá Vinnuhúsinum. Hetta er tískil gjørt uttan nakra sum helst sjálvstøðuga grundgeving. Tær einastu grundgevingarnar, sum finnast, eru tær hjá Vinnuhúsinum. Teir hava kopierað sínar grundgevingarnar frá Búskaparráðnum í samband við sjómansskattin. Ein stórur partur av teimum eru skeivar og aðrar villleiðandi, sum vit áður hava víst á.

Hugburðurin hjá Vinnuhúsinum sæst annars í teirra fráboðan, at teir meta tað ikki vera nakran trupulleika, at okkara fiskiskip verða mannað við útlendskum fiskimonnum heldur enn føroyskum!

Nakað tað sama, sum er sagt um uppskotið at strika alla inntøkutrygd, kann sigast um uppskotið um at strika sjómannaskattin.

### Vilja hava greiðu á, hvat er hent

Hetta merkir, at málið longu við framløguni hevur eina slíka slagsíðu, at tað slettis ikki ber til at viðgera tað á óheftum grundarlagi.

Tað er klárt, at Fiskimannafelagið til eina og hvørja tíð er til reiðar sakliga at viðgera mál sum hesi. Tað er við hesum sum flestu øðrum málum, at tað kann sigast bæði fyri og ímóti. Men hetta er als ikki mál, har viðgerðin ella lýsingin av tí kann avmarkast til eina reglu, sum vit síggja í framlagda skjalinum. Men sum málið her er lagt fram, kann tað ikki viðgerast.

Áðrenn nøkur sum helst viðgerð fer fram av málum viðvíkjandi fiskimonnum á visjónstorginum, vilja vit hava greiðu á, hvussu tað er komið fyri, at strategibólkarnir á fleiri økjum eru komnir við identiskum niðurstøðum. Var tað bert eitt dømi um samanfall kundi tað verið av tilvild, men tá felags niðurstøðan á hesum avmarkaða øki umfatar heili 4 punkt, kann tað ikki vera tilvild.

Hetta er fyrstu ferð, vit vita um, at uppskot er komið fram um heilt at avtaka inntøkutrygdina hjá fiskimonnum. At tað koma tvinni uppskot um hetta í somu viku, er upplagt eitt úrslit av einum samanspæli millum visjónsbólkin á økinum og hesar kreftir uttanfyri. Spurningurin er í stuttum, hvør bólkur ið rennur ørindi fyri hvønn.

Vit føla okkum annars sera ótryggar við tí, sum gongur fyri seg aftanfyri leiktjøldini, og hetta mál styrkir hendan ótryggleikan. Tí er neyðugt at fáa fullkomiliga greiðu á, hvat er gingið fyri seg í hesum máli, áðrenn vit kunnu vera við til at viðgera slík uppskot. Skulu vit luttaka í viðgerðini, skal tað vera uttan, at annar parturin í málunum hevur fingið sær eitt slíkt forspring, sum her er talan um, og sum ger tað ómøguligt við eini viðgerð á jøvnum føti.

*Óli Jacobsen*
*felagsformaður*

## Studningsskipanir

**Visjón:**
Tað almenna eigur at taka av studningsskipanir, ið virka avlagandi og darva framburði. Vinnulívspolitikkurin skal skapa greiðar og eins treytir fyri vinnulívið.

**Mál:**

1. Almennar inntøkur, ið stava frá avtøku av studningsskipanum, skulu nýtast til at lækka inntøkuskattin.
2. MVG-frítøkur til endamál, ið ávirka vinnubýtið í landinum (húsabygging og -umvæling o.s.fr.) skulu takast av.
3. Stuðul skal setast á fíggjarlóg heldur enn veitast sum frádráttir ella frítøkur.
4. **Stuðulsskipanir so sum minstaløn og dagstudningur skulu takast av stigvíst.**
5. **Sjómannafrádrátturin skal stigvíst takast av og vera heilt burtur áðrenn 2015.**
6. Rentustuðulin skal takast av stigvíst.
7. Landbúnaðarstudningurin skal takast av stigvíst.

*Luttakarar á Visjónstorginum*



## Eyðstein Poulsen, skrivar:

# Ein seriøs viðmerking til Jan Mortensen



Tað vísir seg, at serfrøðingar ferð eftir ferð koma við teorium, sum bert bera hálvan sannleika, tí hesar teoriir byggja á einoygdan vinkul á veruleikan.

Eg havi stórar trupulleikar at taka Jan Mortensen fyri fult eftir tilmælið, sum hansara strategibólkur legði fram um stuðul til fiskivinnuna. Hetta innibar bæði feilir og uppspunnar veruleikar, og endaði Jan við at úttala seg um, at hann væntaði ikki nakað seriøst ískoyti til málið, men harafturímóti væntaði hann persónlig álop.

Fyrst kundi eg hugsað mær at fingið at vita, hvat Jan kallar seriøst, og nær tað er persónligt. Eg havi valt at skriva fyri tann arbeiðandi og kroysta bólkin í landinum, og vóni eg, at eg verði tikin seriøst. Síðan kann eg ikki annað, enn rætta mítt svar móti Jan Mortensen hesum viðvíkjandi av teirri einfaldu grund, at tað er hann, sum kemur við hesu veruleikafjaru teori. So má Jan sjálvur avgera, um eg eri persónligur ella óseriøsur.

### Manglandi vitan í strategibólkinum og illa upplýst avleiðing

Tað er gaman í at upplýsa fyri Føroya fólki, at stuðul er eitt ókvæmisorð. Eg vil fara so langt sum at siga, at hetta er uttan iva tað lættasta at fáa undirtøku fyri frá fólki, sum ikki føla seg beinleiðis tengd at stuðlinum. Serfrøðingarnir bera teirra veruleikafjaru teoriir fram, sum um, at ein og hvør stuðulsskipan ikki hoyrir nútíðini til. Fara vit at hyggja eftir øllum stuðulsskipanunum, sum eru í Føroyum í dag, kemur ein á fleiri skipanir, sum beinleiðis ella óbeinleiðis halda lív í samfelagnum. Góðu føroyingar, tað er kanska bara spurningur um tíð, til serfrøðin hevur samansett ein setning, sum vit øll svølgja, soleiðis at hesar neyðugu stuðulsskipanir verða niðurlagdar.

Eg kann ikki lata vera við at sláa Jan á fingrarnar, eftir at hann frustreraður legði Óla Jacobsen undir at siga ósatt. Í sama innslagi velur Jan sjálvur at siga ósatt, tá ið hann sigur seg umboða vinnuna, sum er beinleiðis ósatt. Jan umboðar bert tann pengagramma partin av vinnuni.

Jan sigur, at tað eru ov nógv fólk í fiskivinnuni. Kann strategibólkurin upplýsa mær eitt einasta skip, sum siglir yvirmannað í flotanum?

Fyri at vit skulu vera færri fólk í fiskivinnuni, má skipatalið eisini minka. Tað løgna við hesum er, at serfrøðin heldur, at um vit hava færri skip, sum fiska minni, so fáa vit størri úrtøku. Eg má flenna at hesum uppspunnu teori. Tað, ið eftir míni bestu sannføring hendir, tá ið føroyski fiskiflotin verður skerdur, er, at tá fjarðar í landskassanum.

Um vit skerja meir av flotanum, koma vit eisini at skerja meir av okkara inntøku. Hetta tí, at Føroyar bert eru ein evarska lítil partur av heimsmarknaðinum. Eitt dømi: um vit valdu at fiska 20.000 tons minni komandi ár, hevði tað ikki á nakran hátt rakt heimsmarknaðin, og tískil hevði prísurin ikki á nakran hátt tillagað seg eftir hesum. Tað vil siga, at vit høvdu havt eina munandi minnu inntøku til Føroya land

Tað áhugaverda við hesum er, at verður tað, sum onkur kallar stuðul til fiskivinnuna, tikin av, kemur hetta at verða bani teirra smáu. Ein og hvør veit, at er ein lítil í Føroyum í dag, so er tað at rokna fyri at vera veikur, og er ein veikur, so skal ein fara natúrliga úr vinnuni, sum serfrøðin so ørvitisliga kallar tað. Trupulleikin, sum eg síggi, er, at vit hava serfrøðingar, sum ikki síggja virðið í teimum smáu, sum klára seg. Heldur velja teir at spenna bein fyri hesar, og kemur hetta at hava álvarligar avleiðingar. Eftir koma at sita nakrir tungir dreingir við øllum tilfeinginum í Føroyum, og koma hesir beinleiðis at stýra Føroya landi. Tá hava Føroyar ikki ráð at missa hesar stóru fyritøkur, tí um tað tá gongur galið, eru vit í fríum falli...

Samstundis haldi eg ikki, at tað kann vera til fyrimuns fyri nakran arbeiðandi á landi, um vit fáa eina innrás av sjófólki, sum tekur arbeiði frá verkafólkinum á landi, tí tá er arbeiðandi fjøldin á landi ikki ein virðismikil vøra fyri arbeiðsgevaran longur. Hetta roknistykkið nýtist ikki at skerast út úr pappi. Tað er einfalt at hugsa sær, hvør fær ágóðan av tí, tað er nevniliga arbeiðsgevarin.

Tað mest álvarsama er, at serfrøðin hevur livað sum eitt heilagt og lýtaleyst fyribrigdi í Føroyum í alt ov langa tíð. At hava prógv innan eina ella aðra serfrøði er ikki nokk til at melda seg fullkomnan. Vit hava nógv av útbúnum fólki í Føroyum, men tað merkir ikki at øll eru feilfrí. Vit kunnu hava ein útbúnan handverkara, sum ikki kann nýtast til nakað. Vit kunnu hava ein við skiparaprógvi, sum ikki kann brúkast. Vit kunnu eisini hava lærarar, sum eru minni dugnaligir. Soleiðis kundi eg hildið fram. Eingin hevur reist spurningin, um vit eiga óbrúkiligar búskapar- ella fiskifrøðingar. Fyri meg er hesin spurningur sera hugvekjandi.

FF bladið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Ring um lýsingar á tlf. 31 15 69
ella send eitt fax á 31 87 69
gevur
MEIRI
fyri
MINNI

## Til minnis um
# Kristian Rókstein



Í farnu viku doyði Kristian Rókstein úr Fuglafirði, 85 ára gamal.

Foreldur hansara vóru Símun Jacob Johannesen, av Hellunum og Josefina, f. Justinussen, ættað úr Leirvík.

Kristian vaks upp á Hellunum, men var tó nøkur ár sum smádrongur hjá ommuni í Leirvík, við tað at mamman var sjúk; men hann kom aftur til Hellurnar, tá ið hann var 12 ára gamal.

Tey vóru trý systkin: Kristian var elstur, Jógvan, sum doyði í 1990, og Karin, sum nú er einsamøll eftir.

Kristian fór, sum flestu ungu menn tá, til skips og var við ymiskum skipum.Hann var t.d. við "Godthaab" í 30-unum. Í 50-unum var hann við "Brimnes", har Hellu-Meinhard var skipari. sum eisini var fyrsti skiparin hjá tí, sum skrivar hesar reglur. Hann var eisini við "Bearnaise" og síðsta skipið, hann var við, var "Karl", sum hann var við á sild í 1962.Hesi bæði seinastu skipini átti S.P. Petersen í Fuglafirði.

So legðist Kristian upp á landi og fór at arbeiða á Ísvirkinum, sum var flakavirkið hjá Haraldsen. Har arbeiddi hann restina av sínum arbeiðslívi. Sagt verður, at hann var av allar skjótastu skerarum.

Kristian giftist við Thalu í 1951. Thala er eisini fødd og uppvaksin á Hellunum. Tey búðu næstan beint yvir av hvørjum øðrum og hava so statt kenst heilt frá beinsbeini.

Thala fór sum ung genta til Havnar at tæna hjá Sigurd Berghamar. Og tað var, meðan hon var í Havn, at hon og Kristian vórðu trúlovað.

Tey giftust í 1951, og fluttu tá inn í húsini, sum Kristian hevði bygt, og sum tey hava búð í síðani. Tað kann verða nevnt, at Thala eins og Kristian arbeiddi stóran part av sínum arbeiðslívi hjá Haraldsen, nevniliga í handlinum.

Thala og Kristian fingu eingi børn. Maria, sum Thala er mostir til, kom til Fuglafjarðar sum ung genta og giftist har. Hon sigur, at Thala og Kristian hava verið sum mamma og pápi fyri hana - og nú seinnu árini hava tey verið sum abbi og omma fyri hennara børn.

Maria og hennara familja hava so ómetaliga nógv gott at siga um Kristian. Um hvussu nógv hann altíð hevur hjálpt teimum, og hvussu nógva umsorgan hann altíð hevur havt fyri børnunum.

Kristian var ein bygdamynd. Hann var ofta at síggja, tí hann gekk nógv. Honum dámdi væl at vera millum fólk og práta við tey, og hann var altíð blíður og vinsælur. Hann hevði áhuga í tí sum fyrifórst.

Thala og Kristian hava verið sera trúføst í samkomuni í Siloa í Fuglafirði.

Tey høvdu eitt gott hjúnarband.Tey vóru altíð saman - og sást annað av teimum, sóust bæði!

Sjálvur kom eg at kenna Kristian í føðingardøgum hjá granna, sum er systirdóttir Thalu. Her sóu vit eisini tað trúfesti, sum tey vísti síni familju. Tað var neyvan føðingardagur sum fór burtur ímillum, og Kristian var miðdepil, har hann var. Hann var altíð kátur og dugdi væl at greiða frá.

Hann var sannførdur javnaðarmaður og duldi ikki fyri tí. Við í omanfyrinevndu føðingardøgum plagdi Ronald Poulsen eisini at vera. Hann var eitt skifti í fremstu røð í Sjálvstýrisflokkinum. Kristian kundi ikki gloyma Sjálvstýrisflokkinum, at Helena Dam á Neystabø í 1998 hevði sett javnaðarflokkin uttan fyri samgonguna, sum tá var gjørd, og hetta fekk Ronald eisini at hoyra fyri!

Men knappliga ein dagin varð Helena blivin floksfelagi hjá Kristiani, og nú var tað Ronald, sum kundi stinga Kristian! Sum tað skilst vóru hetta undirhaldandi føðingardagar. Teir verða ongantíð tað sama aftur!

Tað verður saknur í Kristian!

*ó*

# Vit øtast um Vinnuhúsið!

**Vinnuhúsið hevur lagt eitt nýtt skjal út á sína heimasíðu, sum vit halda eigur at fáa nakrar viðmerkingar. Vit hava tikið nøkur brot burtur úr hesum skjali og seta okkara viðmerkingar niðri undir hvørjum broti.**

Vinnuhúsið:
*Partar av frágreiðingini hjá strategibólkinum hjá arbeiðsgevarafelagnum um arbeiðsmarknaðin hava elvt til nógv kjak. Serliga um stuðulsskipanirnar innan fiskivinnuna. Kjakið bendir á, at summi halda, at bert sjómenn skapa virðir í samfelagnum og øll hini - meira enn 20.000 fólk - sum arbeiða á landi, bert eru ein útreiðsla fyri samfelagið. Slík tankagongd er beinleiðis skaðilig fyri samfelagið og krevur eina viðmerking*

Okkara viðmerking:
Hetta er ein stak ósaklig og lættisoppakend viðmerking, sum bert kann tæna tí endamáli at seta kílar millum fiskimenn og restina av fólkinum í landinum. Vit, sum eru ein høvuðspartur í hesum máli, hava ikki so mikið sum grett umrødda sjónarmið, og vit kundu ikki droymt um at sagt, at "bert fiskimenn skapa virði í samfelagnum". Hetta er ein snaring, sum er beinleiðis villleiðandi.

Tað eru nógv onnur sum framleiða. Halda vit okkum til fiskivinnuna, so eru flakavirkini í fremstu røð, og síðani koma allar tær tænastur, sum eru knýttur afturat hesum, so sum skipasmíð og tilvirking av reiðskapi - fyri bert at nevna tvey dømi.

Nógv annað framleiðsluvirksemi fer eisini fram í landinum, har vørur, sum annars høvdu verið innfluttar, verða framleiddar. At minka um innflutningin er eins týdningarmikið og at økja um útflutningin.

Vit hava eisini eina tænastuvinnu, sum er neyðug fyri at samfelagið skal virka. Her kann spurningur verða settur um lutfallið millum framleiðsluvinnu og tænastuvinnu, men her kunnu eisini vera ymiskar meiningar.

Hinvegin er tað ein veruleiki, at gongdin í fiskiveiðuni er avgerandi fyri, hvussu tað annars gongst í samfelagnum. Tað er hon, sum ger av, hvussu nógv er at gera á flakavirkjunum og hvussu ráðini eru at lata skipini fara á skipasmiðju o.s.fr. Hetta virkar síðani eisini upp á, hvørji ráðini eru hjá teimum, sum eru heft at fiskivinnuni at nýta handverkarar og at fara at klippa sær - fyri at nevna nøkur dømi.

Allar royndir vísa, at gongst tað væl við fiskiveiðuni, so gongst eisini væl hjá samfelagnum og øvugt. Tað sama er galdandi t.d. í fiskivinnukommunum í Danmark. Bornholm er eitt dømi um tað.

Tað sum vit hin vegin vilja avvísa av øllum alvi, eru tær royndir sum verða gjørdar fyri at lýsa fiskimenn sum "nassarar" á restina av samfelagnum. Tað er henda hugburð sum Vinnuhúsið meira ella minni tilvitað rør uppundir, sum vit vilja berjast ímóti av øllum alvi.

Vinnuhúsið:
*Í kjakinum hevur verið borið fram, at bátar ikki høvdu fingið fólk, um ikki hendan trygdin var fyri, at sjómenn fingu løn. Dømi sum Atlantic Navigator og ávísir línubátar eru nevnd.*

Okkara viðmerking:
Tað tykist sum at Vinnuhúsið heldur okkum hava tað sjónarmið, at fiskimenn ynskj at dúva upp á inntøkutrygd. Tað er als ikki so. Royndirnar vísa, at tað er bert hendinga túrar, sum undir vanligum viðurskiftum koma undir inntøkutrygd. Hetta er eisini galdandi fyri Atlantic Navigator, sum støðan er í dag. Men frammanundan hava nógvir túrar verið undir inntøkutrygd. Her er talan um nýtt frambrot, har byrjað var frá botni, og royndir hava verið gjørdar at fáa tað at bera til. Politisk undirtøka hevur eisini verið fyri hesum royndum. Vónandi fer tað at eydnast nú, og um tað hendir, koma útreiðslurnar nógvar ferðir aftur. Eydnast tað ikki, er einki at ivast í, at tað verður endin við hesum skipinum, men tá kunnu vit eisini ásanna, at "af skade bliver man klog".

Taka vit línuskipini, so hava hesi givið nógvan pening til samfelagið og eisini arbeiði uppi á landi. Men hjá teimum gongur tað av náttúrgivnum orsøkum meira upp og niður enn hjá skipum í aðrari veiðu. Línuskipini, og línuveiða annars, eru ein partur av tí fjølbroytni, sum er í okkara fiskiflota, og sum tað er politiskur vilji at varðveita.

So eru tað eisini tíðir, tá so lítið kemur burtur úr, at inntøkutrygdin er ein fortreyt fyri at hava flotan koyrandi. Vit kunnu bert hugsa um støðuna undir seinastu kreppuni.Tá kundi flotin eins væl heilt steðgað upp, og tá vildi støðan - eftir okkara tykki - verið munandi verri, enn hon hóast alt gjørdist.

Annars kann sigast, at skip, har manningin hevur inntøkutrygd sum grundarlag fyri inntøkuni, hava onga framtíð. Tey fara skjótt á húsagang.

Vit hava í aðrari grein greitt frá, at útreiðslurnar til inntøkutrygd í dag bert eru ein viðfáningur av tí tær vóru, inntil fyri einum 10 árum síðani, hóast Vinnuhúsið roynir at prógva tað mótsetta. Tað skal ein "góður" vilji til at pástanda, at verandi skipan, nú útreiðslurnar eru minkaðar so nógv, skal vera skaðilig.

Vinnuhúsið:
Men tað er júst tí, at ljóskastarin verður settur á skipanir, sum avlaga arbeiðsmarknaðin bæði á sjógvi og á landi. Fólk, sum skulu hava stuðul fyri at fara til arbeiðis, skapa ikki nóg stór virðir í samfelagnum. Avgerðina um at senda eitt ávíst skip til fiskiskap ella ikki eigur reiðaríið og eingin annar. Reiðarin skal meta um, um tað er vert at gera eina íløgu í skipið, ella um hann skal lata vera og gera íløguna onkra aðrastaðni. Gongur tað væl, eigur reiðarin ágóðan og verður ríkari - gongur tað illa, missir hann pening og verður fátækari. Hetta eru spælireglurnar í øllum vinnuvirksemi - eisini á landi.

Er tað so, at reiðarin ikki megnar at skaffa sær arbeiðsmegi, skapar reiðaríið ikki nóg stór virðir til bæði at gjalda manningini eina rímiliga hýru og sær sjálvum eitt avkast av íløguni. Arbeiðsmegin skal tí hava loyvi til at gera okkurt annað, har størri virðir verða skapt, og har arbeiðsmegin fær røttu lønina.

Okkara viðmerking
Vit skilja, at Vinnuhúsið heldur, at tann vinna, sum ikki kann standa, skal falla, uttan mun til avleiðingarnar. Vit eru tó nøkur, ið eru ósamd í hesum. Tað kunnu saktans vera dømi um, at ein vinna kann loysa seg samfelagsliga, hóast tørvur er á "stuðuli" av einum ella øðrum slagi. Eitt dømi um hetta er FAS skipanin. Einki uppskot er komið um at avtaka hana.

Vinnuhúsið:
*Arbeiðsmegin livir av lønini, sum íleggjarar liva av avkastinum. Lønin er ov lítil, tá neyðugt er at veita stuðul. Ein stuðul, sum vit føroyingar gjalda, og við tí lækka vit okkara livistøði. Vit føroyingar hava annað at brúka peningin til enn at geva stuðul til eitt rakst fólkaslag, sum kann skapa sína egnu løn - bara í onkrari aðrari fyritøku, sum ikki fær stuðul.*

*Í kjakinum hevur verið nevnt, at fiskaútflutningurin er 95% av føroyska útflutninginum, at tað er tað einasta vit liva av, og at hann heldur lív í øllum øðrum t.d. tænastuvinnuni.*

*Rætt er, at útflutningurin ger okkum ríkari, men vit útflyta bert fyri at kunna innflyta. Annars skuldu vit brúkt rættiliga nógv fólk til at framleitt innfluttu vøruna, og tá hevði vøran kanska ikki havt somu dygd. At vit hava ein stóran útflutning og við tí megna at innflyta alskyns vørur, merkir, at tey, sum annars høvdu framleitt hesar innflutningsvørur, kunnu nøkta annan tørv, sum vit hava, og sum vit vilja gjalda fyri. Fleiri dømir eru um hetta í frágreiðingini.*

*Stuðulsskipanir sum heild eiga at verða avtiknar til tess at skapa størsta dynamikkin á arbeiðsmarknaðinum.*

Okkara viðmerking:
Vit skilja hendan partin soleiðis, at Vinnuhúsið heldur, at vit høvdu kunnað klárað okkum heilt uttan at fiska. Týdningurin hjá fiskivinnuni er "bert" at útvega pening til innflutning. Hetta halda vit vera sera týdningarmikið!

Um einki varð útflutt, so varð heldur einki at flyta inn fyri. Fiskimenn kunnu so - sambært Vinnuhúsinum - flytast av skipunum til at framleiða ta vøru, sum annars verður innflutt, sum t.d. olju, sement, byggitilfar, køliskáp og fartelefonir - fyri bert at nevna nøkur dømi. Hetta er eisini tað, sum er galdandi í USA, har 250 mió. fólk búgva. Her er lítil innflutningur og lítil útflutningur, tí amerikanarar kunnu framleiða flestu vørur sjálvir.

Vinnuhúsið heldur, at hetta kann eisini gerast í Føroyum. Tað kann tað sjálvsagt eisini í ein ávísan mun á pappírinum. Men hví hendir tað so ikki? Hvussu kann tað t.d. bera til, at vit innflyta sild í gløsum frá Glyngøre, tá vit sjálvir eiga sildakvotu upp á fleiri túsund tons. Veruleikin er tann, at vit framleiða munandi færri vørur til egna nýtslu í dag, enn vit gjørdu fyrr. Vit kunnu bert nevna dømir sum margarin, súltutoy, bomm, sápu, spinning og veving. Vit framleiddu konserves fyri 100 árum síðani, og í dag innflyta vit blikkamat.

Kanska er alt ikki so einfalt, sum tað stendur í teimum 20 lærubókunum, sum eru grundarlagið undir frágreiðingini hjá Vinnuhúsinum.

Men fyri tað, skulu teir ikki sleppa at gera fiskimenn og útróðrarmenn til syndabukk.

Vit undrast á, at Vinnuhúsið kann fara út í eina so lættisoppakenda og ikki sørt forhánisliga herferð móti áhugamálunum hjá fiskimonnunum. Ikki minst undrar tað, at hann, sum stendur á odda fyri hesi herferð, er fyrrverandi fiskimaður.

Hann veit sera væl, hvussu lætt tað er at skapa øvundsjúku mótvegis fiskimonnum og fiskivinnuni, og hann átti at havt annað at brúkt sína megi uppá.

Men vit ætla ikki at lata eina slíka herferð móti áhugamálum fiskimanna fara aftur við borðinum.


AGN

sild
tobis
kúfiskur
makrelur
høgguslokkur



...dagligt samband um alt landið

P/F KAMBUR

STRENDUR
telefon: 448095 · fax: 448744


## Grind

Grind varð hildin til í Sandagerði seinnapartin mikudagin 13. sept. Tað vóru 176 hval, sum løgdu beinini - 1591 skinn íalt. Hesi skinn vóru býtt upp í 2124 drápspartar, 0,58 skinn í part.

Sýslumaðurin, Regin Jespersen, upplýsir, at drápið gekk væl og øgiliga skjótt - umleið 10 minuttir. Øll grindin gjørdi landgongd.

# Jona Henriksen

## IN MEMORIAM

Brádliga frættist, at Jona hevði lagt árarnar inn, bert 82 ára gomul. Hevði næstan roknað við, at hon altíð fór at vera millum okkara, tí lyndið hevði hon so lætt. Hon var nógv millum ungdómin og skilti hann væl. Jonu kendi eg sjálvandi frá skótunum, har hon hevði tann eginleika, altíð at koma við tí góða orðinum, heldur enn at brúka tíð upp á, at tosa fyri og ímóti, tá onkur vildi vera betri.

Jona var eitt semingsmenniskja burturav, vit máttu bara geva henni viðhald, ið tí, hon førdi fram.

Fýra vóru skótaliðini í Havn, og í mínum fyrstu árum innan skótarørsluna í sekstiárunum, var rættiliga kalt millum liðini. Skótatalið var tá munandi størri enn í dag, og ávís andstøða var millum liðini, - júst um sama mundið, tá býlingarnir í Havn bardist sínámillum, men vit høvdu tann sið hjá skótunum, at liðini hittust øll upp á skift hjá hvørjum øðrum tann 22. februar, og hesar vitjanir løgdu grund undir seming millum liðini. Tað var ein serstakur dagur, sum nú verður kallaður Hugsunardagur. Áður varð hann bert kallaður føðingardagurin hjá Baden-Powell og konu hansara Olavu.

Í hesum sambandi vóru serstakliga tvær kvinnur, ið sýndu blíðskap, sum gjørdi mun, tá teirra tørn var at vera vertir. Tað vóru Jona í KFUK og Paula í Frelsunarherinum.

Nú er báðar farnar, men hava tær verið og eru tveir tignarligir varðar í Føroya skótasøgu, serstakliga, tá hugsað verður um Skótalógina og ikki minni lóg Guðs.

Ikki untist mær at takka teim, áðrenn tær fóru, Paula ov brátt eftir mínum tykki, og trúði eg, at Jona treivst so væl á Ellisheiminum, at hon ikki longu legði frá sær.

Tí skrivi eg hesi orð til teirra, nú tær hittast aftur og kunnu minnast aftur á góðar dag, tá eg eisini var millum teirra.

Um lyndið hjá Jonu skal eg lýsa við hesi søgu. Tá Jona fylti 75 ár, búði hon norðuri í Funningsbotni, og eg, sum tá var til skips, sendi henni fjarrit á degnum. Stutt eftir, meðan vit lógu á Norðhavinum við SJÓVARTÚNI, lurtaðu vit eftir sending hjá Elis og teim, og tá fekk eg heilsan aftur frá Jonu, við ynski um góðan túr fyri meg og manning. Soleiðis takkaði Jona, og soleiðis var hon.

Við hesum vil eg lýsa frið yvir vinkonur Jonu Henriksen og Paulu Olsen.

*Lars*

norden

Nordplus Vaksin

## Stuðul frá Nordplus – Vaksin

Nordplus vaksin er ætlað at menna samstarvið fyri fólksliga upplýsing og undirvísing av vaksnum.

Stuðul verður veittur til flytføris- og samstarvsverkætlanir, sum kunnu menna nýggj hugskot, háttaløg (metodur), tilfeingi, partar av skeiðum o.tl. Bæði luttakarar og lærarar kunnu vera við í samstarvinum. Harafturat verður stuðul veittur til at kunna um royndir hjá hvørjum øðrum, til kortlegging og útgreining av ávísum økjum og til at byggja nýggj netverk upp.

- Stuðul kann td. vera veittur til fyrireikingar til verkætlanir at fyrireika vitjan hjá undirvísarum og øðrum við ábyrgd fyri frálæru.
- Stuðul kann vera veittur til uppihald í samband við eftirútbúgving, lestur ella undirvísing hjá lærarum og øðrum og til skifti millum luttakarar í fólkaupplýsing og í undirvísing fyri vaksin

**Málbólkurin fyri Nordplus Vaksin er:**

- Stovnar sum arbeiða við læru fyri vaksin
- Fólkaupplýsing og vaksnamannaútbúgving, bæði almennar útbúgvingar, yrkisútbúgvingar og serundirvísing.
- Sjálvbodnir felagsskapir og feløg

**Umsóknarfreistin til Nordplus Vaksin er 1. oktober 2006**

*Umsóknarfreistirnar til hinar fýra Nordplus-skipanirnar eru:*

**Nordplus Junior** Umsóknarfreistir: 15. mars 2007

**Nordplus Mál** Umsóknarfreist: 16. okt. 2006

**Nordplus** Umsóknarfreist: 1. februar 2007

**Meiri fæst at vita á www.ciriusonline.dk/nordplus-voksen ella hjá Altjóða Skrivstovuni í Tórshavn. Tlf. 322065 · e-mail: ask@ask.fo · www.ask.fo**




# Bíbilkunnleiki freistarans

"Jesus segði við hann: "Uppaftur stendur skrivað: "Tú mást ikki freista Harran, Guð tín.""

*Matteus 4,7*

Djevulin er bíbliusterkur; tað eiga vit at gera okkum greitt. Hann endurgevur við gleði bíbliuørindi, um hann sær seg kunna vinna sigur á tann hátt, og alt ov títt lata vit okkum tøla av honum.

"Skrivað stendur!" sigur hann. "Sært tú ikki, hvat stendur her?" Hann peikar á eitt ella annað trupult skriftstað. "Les sjálvur!" sigur hann. Ofta eydnast honum at kasta falskt ljós inn yvir orðið, og ólag kemur í alt. - Mangan sigurin vann hann á tann hátt, og tænarar Guðs gjørdust hansara sendiboð.

Jesus er freistaður í øllum eins og vit. Eisini hann hevur roynt tað at staðið andlit til andlits við freistarans bíbliukunnleika, tá ið hin óndi royndi at fáa hann at stoyta seg oman úr torninum á halgidóminum. "Ger tað bara! Tað skaðar teg ikki, tí skrivað stendur, at Guðs einglar vilja bera teg!" segði hann.

Men Jesus loftaði álopinum við at svara, at tað eisini stendur skrivað: "Tú mást ikki freista Harran, Guð tín!"

Minst til hetta, tá ið djevulin endurgevur bíliuørindi! Lat hann ikki svíkja teg. Tá ið djevulin vil stoyta teg oman í avgrund myrkursins, mást tú ikki sópa Guðs lyftir tilsíðis. Vís mótstøðumanninum aftur við hjálp av Guðs orði! Síg freistaranum tað beint upp í andlitið: "Tað stendur eisini skrivað - !"

Fyritreytin, fyri at vit kunnu halda honum burtur, er, at vit vita, hvat skrivað stendur. Djevulin vann mangan sigurin, tí menniskju ikki kendu Guðs orð at verja seg við.

Les í Halgubók! Tú hevur ikki ráð at lata vera. Tú eigur at lata teg í øll herklæði Guðs, um tú skalt sigra í bardaganum móti hinum bíbliukøna fíggindanum. Bara Guðs orð kann fella hann. Amen!

# Aftursvar til Vinnuhúsið




Blaðið í dag verður sent í hvørt hús í landinum. Hetta er partvíst fyri at kunna geva Vinnuhúsinum, og eisini visjónsbólkinum hjá løgmanni um samfelagsbygnaði, eitt mótspæl.

Vit vilja fegin vera við at luttaka í orðaskiftinum um tey viðurskifti, sum viðvíkjandi sjó- og fiskimonnum. Men hetta er treytað av, at málini verða fult upplýst, og at tað er hetta, sum er grundarlagið fyri kjakinum.

Her mugu vit staðfesta, at tær framløgur, sum eru gjørdar av strategibólkunum lúka ikki hesar treytir. Tann hjá løgmanni hevur einki grundarlag, meðan grundgevingarnar hjá Vinnuhúsinum hava sera stóra slagsíðu. Tað verður bert pilkað tað burtur úr heildini, sum hóskar til teirra niðurstøður. Teir siga seg vilja hava alt burtur, sum kann kallast studningur ella sersømdir til fiskimenn. Men studningar til egnar limir verða ikki tiknir uppá tungu, sum t.d. FAS, sum annars er ein skipan vit taka undir við.

Teir á Vinnuhúsinum, at "hetta er nakað heilt annað", sum er ein vanlig undanførsla, tá fólk verða kroyst. So verður sagt, at teimum tørvar ikki FAS. Teir kundi eins væl farið yvir til DIS, sum er ein enn størri studningsskipan enn FAS! Her er dupultmoralurin enn størri.

Umframt nógv annað tilfar royna vit í dag í fleiri greinum at lýsa umrøddu spurningar so væl, sum hetta letur seg gera.

Hetta sigur kanska lesaranum, at heilt so einfalt, sum uppsett av Vinnuhúsinum, eru málini um inntøkutrygd og skattaskipan hjá sjófólki ikki! Tað er annars eisini sjáldan, at mál bert eru svørt ella hvít. Tað kunnu vit í hvussu er ásanna.



# Vit hava stórt úrval av fiskireiðskapi til línu og snellu

Svøvlalínu frá 3,5 til 9 mm. Tit avgera sjálv, hvussu langt skal vera millum svøvlarnar.

Húkar í ymsum støddum og sniðum. Rippaðir og órippaðir. Teymar frá nr. 4 til 20 í fleiri litum.

Eisini eru handlarnir fullir av klæðum til sjó- og arbeiðsfólk. Frá innast til uttast.

VASTI 459010

**TEYMAVIRKIÐ**
FO-620 Runavík · Tel. 473000

**SNØRISVIRKIÐ**
FO-700 Klaksvík · Tel. 455254

**GLÆMAN**
FO-100 Tórshavn · Tel. 318600




## TAK ALLA FAMILJUNA VIÐ TIL DANLAND

Pakkið bilin heima í túninum, koyrið umborð og hugnið tykkum á ferðini. Soleiðis koma tit frísk og vælúthvíld til dyrnar á Danland í Hirtshals – bert fáar kilometrar frá Hanstholm, har Norröna leggur at. Lættari gerst tað ikki. Danland hevur alt, sum krevst fyri at tit og børnini fáa eina ógloymandi viku saman.

## 2 vaksin, 2 børn og 1 bilur í 1 viku í Danland úr bert

**7.024,-**

**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4 koyggjukamari við wc/bað innv. Hartil uppihald í 2 verilsis íbúð á Danland í Hirtshals. **Eykakostnaður:** Oljuavgjald kr. 200,- fyri hvønn ferðandi og avgreiðslugjald kr. 120,- fyri bíleggingina. Tilboðið er galdandi í tíðarskeiðnum 21.09–19.10.2006. Tilboðið er treytað av at pláss er umborð á Norrönu og á Danlandi í nevnda tíðarskeiðið.

SMYRIL LINE
J. BRONCKS GØTA 37 · P.O. BOX 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 34 59 00 · FAX 34 59 50 · BOOKING@SMYRIL-LINE.FO

SMYRIL LINE – EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

NOREG · ÍSLAND
HETLAND · DANMARK
CRUISE

WWW.SMYRIL-LINE.COM
TLF 34 59 00




# Heysttilboð til London

Galdandi til 30. oktober 2006.

**Flúgv og búgv í London**
Vitja London, eitt satt Eldorado av upplivingum.

**Americana Hotel*****
í miðbýnum við Baker Street
Prísur fyri hvønn í 3 nætur í dupultkamari
Eyka fyri einakamar 1089,-
**3536,-**

**Avni@Courtfield Gardens hotel *****
Cloucester Road
Prísur fyri hvønn í 3 nætur í dupultkamari
Eyka fyri einakamar 726,-
**3604,-**

**Saint Gregory Hotel ******
við Liverpool Street
Prísur fyri hvønn í 3 nætur í dupultkamari
Eyka fyri einakamar 1416,-
**3655,-**

*Íroknað prísirnar er flogferð, gisting við Continental morgunmati, og øll avgjøld.*

**Flúgv og koyr í London**
B-bilur í 3 dagar
Prísur fyri 2 fólk og bil. Íroknað prísin er flogferð fyri 2 fólk, bilaleiga og øll avgjøld.
**5795,-**

**Flúgv til london**
Bara flogferð
Íroknað prísin eru øll avgjøld (um bílagt verður á atlantic.fo)
Prísir úr: **2186,-**

Meira um London á heimasíðu okkara. Har kunnu tit bóka sangleikir, konsertir, útferðir og flutning frá Stansted inn í býin og útaftur.

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum www.atlantic.fo

**DEKKMASTER.FO** **Fastir, lágir prísir**

Bílig og góð dekk til persónbilar, vøruvognar & jeepar ...eisini øll tey kendu

## ...tá ið prísurin eisini er avgerandi!




**Prísdømi – summardekk**

| | |
|---|---|
| 175/70-13 | úr 540,- |
| 175/65-14 | úr 620,- |
| 185/65-14 | úr 650,- |
| 195/50-15 | úr 675,- |
| 195/65-15 | úr 695,- |
| 205/40-17 | úr 965,- |
| 225/45-17 | úr 995,- |
| 225/40-18 | úr 1.290,- |

Um tú ikki hevur hug at brúka uppsparingina uppá dekk, ber til at vitja inn á dekkmaster.fo og bíleggja bílig dekk beinleiðis á alnetinum.

Sum nakað serstakt bjóða vit eisini kundum okkara eina heildarloysn, har bilurin verður avheintaður og koyrdur uppá pláss aftur tá dekkini eru ásett.

DEKKMASTER
www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar
Tlf: 311569

**Tilboð til nýggjar haldarar:**

FF-BLAÐIÐ
ÓKEYPIS
RESTINA AV ÁRINUM

Vit bjóða nýggjum haldarum at fáa blaðið ókeypis restina av árinum.

Haldaragjaldið kr. 250 verður tá galdandi heilt fram til ársenda 2007.

FF-blaðið er fyrst og fremst blaðið hjá fiskimonnum. Einki annað blað verjir teirra áhugamál.

Afturat hesum er FF-blaðið eitt ørvísi blað. Tað er eingin vandi fyri at finna sama tilfar í FF-blaðnum, sum í hinum fjølmiðlunum.

Tey eru fleiri sum ikki halda onnur bløð og sum meta FF-blaðið at vera besta blað í Føroyum.

FF-blaðið kann fáast fyri kr. 250 fram til árslok 2007. Tískil er tað ókeypis restina av árinum 2006.

Tað ber til at tekna seg sum haldara við at venda sær til:

tlf 311569 - fax 318769
ella á teldupostin:
ff-blad@post.olivant.fo

Tekningarseðil er eisini inni í blaðnum á síðu 16.

Tað ber eisini til at kunna seg um blaðið á okkara heimasíðu:

www.fiskimannafelag.fo

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA



## Vitjan úr Hetlandi:

# Farnir at selja aldan kalva



*Ralph Marr og John Goodlad á skrivstovuni hjá FF sunnukvøldið.*

Í vikuskiftinum høvdu vit vitjan úr Hetlandi. Hetta var John Goodlad, sum saman við sínum samstarvsfelaga, Ralph Marr, var í Føroyum.

John er væl kendur føroyavinur. Hann hevur ferðast higar sum lesandi síðan einaferð í 70-unum. Seinni gjørdist hann kendur sum skrivari í Hetlendska Fiskimannafelagnum, og hevði hann nógv samskifti við Føroya Fiskimannafelag í hesum sambandi.

Tað var eisini John, sum skipaði fyri teirri væleydnaðu ferðini í Hetlandi, sum stjórnin í FF gjørdi í vár, og sum vit hava greitt væl og virðiliga frá her í blaðnum.

Fyri nøkrum árum síðani fór John burturav at fáast við aling. Hetta hevur gingist sera misjavnt, soleiðis sum vit eisini hava sæð tað í Føroyum. Men nú er alingin við at koma fyri seg aftur eisini í Hetlandi. Her er John eisini við at koma fyri seg aftur, og hann roknar við í ár at framleiða eini 1.500 t.

Men tað serliga er, at John satsar uppá umhvørvisliga aling. Hetta setir mark fyri, hvar ið kann gevast laksinum at eta, og eisini hvat tilfar kann verða nýtt í alinótinum. Hesi stig geva eisini bonus við hægri prísi, og meirprísurin er einar 10 kr. kg. Hetta er eitt óført ískoyti, tá nøgdin verður so stór, sum her er talan um. Laksurin hjá John verður útfluttur í nøkulunda sama prosentparti til Bretlands, Europa annars og USA.

John er eisini í ferð við eini sera spennandi verkætlan, og hetta er at ala kalva, og tað var í hesum ørindum, at teir báðir vóru í Føroyum. Her kunnaðu teir seg um, hvat hendi á økinum hjá okkum.

Men teir eru komnir rættiliga langt, tí fyri kortum fór tann fyrsti aldi kalvin á marknaðin, og hetta riggaði heilt væl, og hann smakkaði sum annar kalvi. Tað verður spennandi, hvussu hetta fer at rigga framyvir.

Annars er John fegin um nýggja flogsambandið millum Føroyar og Hetland, og sum frá Hetlandi fer víðari til London. Minni fegin er hann um útlitini fyri at Norrøna fer at leggja at í Hetlandi eru versnað.

# Einki nýtt frá skattakærunevndini

Vit hava í undanfarnum bløðum greitt gjølla frá málinum um skatting av provianti hjá fiskimonnum, sum hevur verið til viðgerðar í Skattakærunevndini, sum gav Toll og Skatt viðhald.

Vit hava síðan sjálvir funnið fram til tilfar, sum prógvar, at viðgerðin hevur verið á skeivum grundarlagi, og at hon er grundað á ongum og skeivum upplýsingum frá Toll og Skatt.

Tískil bóðu vit um, at málið varð tikið uppaftur og viðgjørt av nýggjum. Skattakærunevndin hevði fund um hetta mál tann 5. september, har FF eisini fekk møguleika at útgreina okkara tilfar, sum prógvar, at eingin ivi er um, hvussu hesin spurningur við fullum politiskum stuðli hevur verið umsitin í nærum 50 ár.

Tað var umráðandi at fáa skjót boð, tí samb. reglunum kann ein avgerð hjá nevndini leggjast fyri rættin innan 3 mánaðir, og henda freist nærkaðist í stórum.

Tað skuldi verið lætt hjá nevndini at tikið avgerð um, hvørt málið skuldi takast upp ella ikki. Men hóast tað nærum eru farnar 2 vikur, hava hvørki vit ella okkara advokatur hoyrt eitt orð aftur, og eingin fundur er fráboðaður í nevndini.

Vit fara ikki at gera viðmerkingar til hetta í hesum blað, men í komandi blaði verður heilt vist meira at frætta.

# Útróðrarmenn nógva havtasku



Tað er nógv løgið sum hendir viðvíkjandi fiskiskapi. Eitt dømi um hetta er havtaska. Henda var ikki vurderað nógv fyri ikki so nógvan árum síðan. Men so byrjaði garnaveiðan, sum eftir vanligari fatan skuldi "hótt" havtaskustovnin. Men so er ikki. Veiðan av havtasku er bara vaksin, eisini hjá trolarum og trolbátum. Nú frættist eisini, at stórur partur av veiðuni hjá vanligum útróðrarbátum er havtaska. Hon er upp til eini 10% av veiðuni. Havtaska gevur eisini góðan prís, so hetta kemur væl við, nú útróðurin kanska ikki er av tí besta.